# LANDSGRANNSKOÐANIN

## Fíggjarárið 2007

## Frágreiðing
## um frávik millum játtan og nýtslu o.a.

latin
løgtingsgrannskoðarunum

sambært § 12 í Ll. nr. 25/1999
“um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”

SEPTEMBER 2008

# Innihaldsyvirlit


1 INNGANGUR 9

2 LØGMANSFYRISITINGIN 11

2.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 11
2.1.1 LØGMANSSKRIVSTOVAN (RAKSTRARJÁTTAN) 2.11.1.02. 11
2.1.2 LØGMAÐUR OG LANDSSTÝRIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 2.12.3.01. 11
2.1.3 SENDISTOVUR (RAKSTRARJÁTTAN) 2.13.1.01. 11
2.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 12
2.2.1 VIÐLÍKAHALD (RAKSTRARJÁTTAN) 2.11.1.12. 12
2.2.2 UMBYGGING Í TINGANESI (RAKSTRARJÁTTAN) 2.11.1.21. 13
2.2.3 MENNINGARSAMSTARV 2.13.3.04. 13
2.3 GÓÐKENNINGARMANNAGONGDIR 15
2.3.1 GREINAROKNSKAPURIN 15
2.3.2 MÁNAÐARROKNSKAPURIN 15
2.3.3 ÁRSROKNSKAPURIN 15

3 FÍGGJARMÁL 17

3.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 17
3.1.1 VIÐLÍKAHALD (RAKSTRARJÁTTAN) 3.11.1.13. 17
3.1.2 LANDSINS OGNIR (RAKSTRARJÁTTAN) 3.11.1.23. 17
3.1.3 SÁTTMÁLAVIÐURSKIFTI (RAKSTRARJÁTTAN) 3.11.1.36. 18
3.1.4 SØLA AV PARTABRØVUM Í P/F ELEKTRON 3.11.1.46. 18
3.1.5 STUÐUL TIL FLUTNING OG DUPULT HÚSARHALD (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 3.21.2.01. 18
3.1.6 STUÐUL TIL RENTUÚTREIÐSLUR (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 3.22.4.01. 18
3.1.7 FAS-ENDURGJALD 3.35.1.05. 20
3.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 20
3.2.1 BÚSKAPARRÁÐIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 3.15.1.13. 20
3.2.2 UMSITING AV OGN OG SKULD LANDSINS (RAKSTRARJÁTTAN) 3.15.1.23. 21
3.2.3 HAGSTOVA FØROYA (RAKSTRARJÁTTAN) 3.15.2.01. 21
3.2.4 TÆNASTUMANNAEFTIRLØNIR (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 3.18.1.01. 21
3.2.5 ÚTGJALD ÚR TRYGDARGRUNNINUM (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 3.21.7.10. 21
3.2.6 STUÐUL TIL BYGGING OG UMVÆLING AV EGNUM BÚSTAÐI (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 3.22.4.04. 22
3.3 RENTUR/FRÁVIK 22
3.3.1 RENTUR AV LANDSINS SKULD 20.50.1. 22
3.3.2 MILLUMVERANDI VIÐ TJÓÐBANKAN OG LANDSBANKAN 20.50.2. 23
3.4 INNTØKUR/FRÁVIK 24
3.4.1 SKATTAINNTØKUR 20.52.1. 24
3.4.2 AVGJØLD OG TOLLUR 20.52.2. 24
3.4.3 YMISKAR INNTØKUR 20.52.3. 25
3.4.4 AÐRAR INNTØKUR 20.52.3.10. 25
3.4.5 HEILDARVEITING O.T. 20.54.1. 26
3.4.6 SERINNTØKUR, FØROYA BANKI, SØLA AV PARTABRØVUM 53.15.1. 27
3.5 AÐRAR VIÐMERKINGAR 27
3.5.1 ÓGREIÐA UM JÁTTANIR TIL FELAGS VIÐLÍKAHALD 27
3.5.2 FYRISITINGARÚTREIÐSLUR VERÐA SPJADDAR 28

**3.6 GÓÐKENNINGARMANNAGONGDIR** 28
3.6.1 GREINAROKNSKAPURIN 28
3.6.2 MÁNAÐARROKNSKAPURIN 29
3.6.3 ÁRSROKNSKAPURIN 30

**4 FISKIVINNA** 35

**4.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK** 35
4.1.1 NEYÐRÆTTUR, TILBÚGVING (RAKSTRARJÁTTAN) 5.11.1.53. 35
4.1.2 TILBÚGVINGARÆTLAN (LØGUJÁTTAN) 5.31.1.04. 35
4.1.3 FISKIVINNURÁÐ OG NEVNDIR (RAKSTRARJÁTTAN) 5.34.1.01. 35
4.1.4 LIMAGJALD Í ALTJÓÐA FELAGSSKAPUM 5.34.1.07. 35
4.1.5 FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 5.34.2.01. 35
4.1.6 MAGNUS HEINASON (RAKSTRARJÁTTAN) 5.34.3.04. 36
4.1.7 FISKIVINNUMENNING Á LANDI 5.34.4.16. 36
4.1.8 FLUTNINGSSTUÐUL (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 5.34.4.22. 37
4.1.9 ÚTLÁN 5.34.5.01. 37
4.1.10 EFFEKTIVAR VEÐHALDSÚTREIÐSLUR 5.34.5.07. 37
**4.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK** 37
4.2.1 FISKIMÁLARÁÐIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 5.11.1.05. 38
4.2.2 TILBÚGVINGARSAMSKIPAN (RAKSTRARJÁTTAN) 5.31.1.01. 38
4.2.3 LØNJAVNINGARSTOVAN (RAKSTRARJÁTTAN) 5.34.1.10. 38
4.2.4 FISKIRANNSÓKNARSTOVAN (RAKSTRARJÁTTAN) 5.34.3.01. 38
4.2.5 INNTØKUTRYGD HJÁ FISKIMONNUM (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 5.34.4.01. 38
4.2.6 SJÚKRATRYGD (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 5.34.4.04. 39
4.2.7 TRYGDARMIÐSTØÐIN (LØGUJÁTTAN) 5.35.1.10. 39
**4.3 GÓÐKENNINGARMANNAGONGDIR** 39
4.3.1 GREINAROKNSKAPURIN 39
4.3.2 MÁNAÐARROKNSKAPURIN 39
4.3.3 ÁRSROKNSKAPURIN 40

**5 VINNUMÁL** 43

**5.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK** 43
5.1.1 SØLA AV LANDSINS OGNUM (LØGUJÁTTAN) 6.11.1.47. 43
5.1.2 ENDURGJALD TIL SKIPASMÍÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 6.37.2.04. 44
5.1.3 LÁNSAFTURGJALD 6.37.6.01. 44
5.1.4 PARTABRØV, YMISK VIÐURSKIFTI 6.37.6.11. 44
5.1.5 KT-FYRISITING (RAKSTRARJÁTTAN) 6.38.3.19. 44
5.1.6 SØLA OG AVHENDAN AV PARTABRØVUM Í P/F FØROYA LÍVSTRYGGING 45
**5.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK** 46
5.2.1 VIÐLÍKAHALD (RAKSTRARJÁTTAN) 6.11.1.16. 46
5.2.2 JARÐFEINGI (RAKSTRARJÁTTAN) 6.32.1.03. 46
5.2.3 ALMENN JØRÐ, SØLA (LØGUJÁTTAN) 6.33.2.11. 47
5.2.4 KAPPINGARRÁÐIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 6.37.1.17. 47
5.2.5 UMBYGGING AV HEILSUFRØÐILIGU STARVSSTOVUNI (LØGUJÁTTAN) 6.37.5.05. 47
5.2.6 GRANSKINGARLUND (LØGUJÁTTAN) 6.37.5.06. 48
5.2.7 LÁN TIL FRAMTAKSGRUNN FØROYA 6.37.6.15. 48
5.2.8 LANDSVERK (RAKSTRARJÁTTAN) 6.38.1.02. 48
5.2.9 NÝGGIR LANDSVEGIR (LØGUJÁTTAN) 6.38.1.07. 51
5.2.10 VÁGA FLOGHAVN (LANDSFYRITØKA) 6.38.2.08. 51

5.2.11 P/F VÁGA FLOGHAVN, ÚTBYGGING 6.38.2.15. 52
5.2.12 POSTVERK FØROYA, UMSKIPAÐ TIL PARTAFELAG 6.38.3.02. 52
5.2.13 BARSILSSKIPANIN (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 6.39.4.01. 52
5.2.14 P/F ATLANTSFLOG, SØLA AV PARTABRØVUM 56.38.2.54. 53
**5.3 GÓÐKENNINGARMANNAGONGDIR 53**
5.3.1 GREINAROKNSKAPURIN 53
5.3.2 MÁNAÐARROKNSKAPURIN 54
5.3.3 ÁRSROKNSKAPURIN 54

**6 ÚTBÚGVING OG GRANSKING 57**

**6.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 57**
6.1.1 MENTAMÁLARÁÐIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 7.11.1.09. 57
6.1.2 LÆRARAEFTIRLØNIR (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 7.23.2.07. 57
6.1.3 TEKNISKI SKÚLI Í KLAKSVÍK (LØGUJÁTTAN) 7.23.3.07. 57
6.1.4 FISKIVINNUSKÚLIN (LØGUJÁTTAN) 7.23.3.08. 58
6.1.5 STUDENTASKÚLIN Í HOYDØLUM (LØGUJÁTTAN) 7.23.3.28. 58
6.1.6 ALMANNA- OG HEILSUSKÚLI FØROYA (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.6.11. 58
6.1.7 YMISKAR VERKÆTLANIR (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.6.23. 58
6.1.8 BÓKASØVN (RAKSTRARJÁTTAN) 7.24.3.01. 59
6.1.9 KIRKJUBØMÚRURIN (LØGUJÁTTAN) 7.24.3.23. 59
6.1.10 KRINGVARPSSENDISTØÐIR (RAKSTRARJÁTTAN) 7.38.3.07 59
**6.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 60**
6.2.1 ES-SAMSTARV (RAKSTRARJÁTTAN) 7.11.1.49. 60
6.2.2 PRÓVTØKUR (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.1.31. 61
6.2.3 FÓLKASKÚLIN (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.2.01. 61
6.2.4 SERNÁMSDEPILIN (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.2.02. 61
6.2.5 SKÚLIN Á TRØÐNI (LØGUJÁTTAN) 7.23.2.12. 61
6.2.6 SKÚLADEPIL Í SUÐUROY (LØGUJÁTTAN) 7.23.3.06. 61
6.2.7 SKÚLADEPIL Í MARKNAGILI (LØGUJÁTTAN) 7.23.3.09. 61
6.2.8 STUDNINGUR TIL LÆRUPLÁSS (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 7.23.3.14. 61
6.2.9 GJALD FYRI LÆRUSÁTTMÁLAR 7.23.3.15. 61
6.2.10 FØROYA FÓLKAHÁSKÚLI 7.23.5.01. 62
6.2.11 KLAKSVÍKAR SJÓMANSSKÚLI (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.6.04. 62
6.2.12 VINNUHÁSKÚLIN (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.6.05. 62
6.2.13 LESTRARSTUDNINGUR (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 7.23.7.04. 62
6.2.14 UNGDÓMS- OG BYGDARHÚS 7.24.1.25. 62
6.2.15 HEIÐURSGÁVUR TIL MENTAFÓLK 7.24.2.13 62
6.2.16 BÓKASØVN (LØGUJÁTTAN) 7.24.3.02. 62
6.2.17 BYGDASØVN 7.24.3.16. 62
6.2.18 KRINGVARP FØROYA (LØGUJÁTTAN) 7.24.4.03. 63
6.2.19 KRINGVARP FØROYA (LANDSFYRITØKA) 7.24.4.06. 63
**6.3 GÓÐKENNINGARMANNAGONGDIR 63**
6.3.1 GREINAROKNSKAPURIN 63
6.3.2 MÁNAÐARROKNSKAPURIN 63
6.3.3 ÁRSROKNSKAPURIN 63

**7 HEILSUMÁL 69**

**7.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 69**
7.1.1 KOMMUNULÆKNASKIPANIN (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.2.04. 69
7.1.2 LANDSSJÚKRAHÚSIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.3.04. 70
7.1.3 SØLA AV ÍBÚÐABYGNINGUM (LØGUJÁTTAN) 8.20.3.05. 75
7.1.4 LANDSSJÚKRAHÚSIÐ, ÚTBYGGING (LØGUJÁTTAN) 8.20.3.08. 76
7.1.5 KLAKSVÍKAR SJÚKRAHÚS (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.3.10. 76
7.1.6 SUÐUROYAR SJÚKRAHÚS (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.3.15. 77
7.1.7 SERVIÐGERÐ UTTANLANDS (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.3.20. 77
**7.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 79**
7.2.1 KOPPSETINGAR (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.20.1.10. 79
7.2.2 LÆKNAKANNINGAR AV BØRNUM (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.20.1.19. 79
7.2.3 ÚTBÚGVING AV YNGRI LÆKNUM (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.2.05. 80

**8 ALMANNAMÁL 81**

**8.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 81**
8.1.1 HJÁLPARTÓLAMIÐSTØÐIN (RAKSTRARJÁTTAN) 8.21.1.07. 81
8.1.2 BARNAVERND (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.3.01. 81
8.1.3 BARNAPENINGUR VEITTUR Í FORSKOTI (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.3.04. 81
8.1.4 STUÐUL TIL UPPIHALDSPENING (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.3.05. 82
8.1.5 DAGPENINGASKIPANIN (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.4.01. 82
8.1.6 ELDRARØKT (RAKSTRARJÁTTAN) 8.21.6.04. 82
8.1.7 STUÐULSTÆNASTAN (RAKSTRARJÁTTAN) 8.21.6.11. 83
8.1.8 VANLIG FORSORG (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.7.01. 83
8.1.9 EINKJUBARNASTYRKUR (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.8.10. 87
**8.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 87**
8.2.1 STUÐUL TIL FYRISKIPANIR FYRI HEIMLEYS 8.21.1.23. 87
8.2.2 BÚSTOVNAR O.A. (LØGUJÁTTAN) 8.21.6.02. 88
8.2.3 ANSINGARSAMSÝNING (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.6.10. 88
8.2.4 LÁN TIL ELLIS- OG RØKTARHEIM Í VÁGI (LØGUJÁTTAN) 8.21.6.14. 88
8.2.5 ELDRASAMBÝLI (LØGUJÁTTAN) 8.21.6.16. 88
8.2.6 FØROYA BLINDASTOVNUR (RAKSTRARJÁTTAN) 8.21.6.20. 88
8.2.7 FYRITÍÐARPENSJÓN (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.8.05. 89
8.2.8 UMSORGARARBEIÐI 8.21.8.08. 89
8.2.9 VIÐBÓT TIL ÁVÍSAR PENSJÓNISTAR (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.8.13. 89
**8.3 GÓÐKENNINGARMANNAGONGDIR 89**
8.3.1 GREINAROKNSKAPURIN 89
8.3.2 MÁNAÐARROKNSKAPURIN 89
8.3.3 ÁRSROKNSKAPURIN 90

**9 INNLENDISMÁL 95**

**9.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 95**
9.1.1 NEYÐRÆTTUR, UMHVØRVISVERND (RAKSTRARJÁTTAN) 15.11.1.52. 95
9.1.2 LÁNSAFTURGJALD 15.11.2.07. 95
9.1.3 FØROYA NÁTTÚRUGRIPASAVN (RAKSTRARJÁTTAN) 15.24.3.13. 95
**9.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 96**
9.2.1 INNLENDISMÁLARÁÐIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 15.11.1.39. 96
9.2.2 YMISKAR ÚTREIÐSLUR (RAKSTRARJÁTTAN) 15.14.1.01. 96
9.2.3 DÁTUEFTIRLITIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 15.14.2.02. 97
9.2.4 STUÐUL TIL ÚTOYGGJAMENNING 15.37.2.19. 97
9.2.5 UMHVØRVISSTOVAN (RAKSTRARJÁTTAN) 15.37.4.02. 97
9.2.6 TINGLÝSINGARSTOVAN (RAKSTRARJÁTTAN) 15.37.4.03. 97
9.2.7 STRANDFARASKIP LANDSINS (LØGUJÁTTAN) 15.38.2.02. 98
**9.3 GÓÐKENNINGARMANNAGONGDIR 98**
9.3.1 GREINAROKNSKAPURIN 98
9.3.2 MÁNAÐARROKNSKAPURIN 98
9.3.3 ÁRSROKNSKAPURIN 99

# 1 INNGANGUR

Yvirskipaðu reglurnar um grannskoðan av landsroknskapinum eru ásettar í § 45 í stýrisskipanarlógini. Neyvari reglur eru ásettar í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." (grannskoðanarlógin).

Sambært § 11, stk. 3, í grannskoðanarlógini skal hvør landsstýrismaður í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok greiða Landsgrannskoðanini frá um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið tilfarið fyri 2007, og hevur havt samskifti við avvarðandi landsstýrismenn/aðalráð um ymiskar spurningar.

Við hesum letur Landsgrannskoðanin, sambært § 12, løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um frávik millum játtan og nýtslu fyri árið 2007, hóast samlaða ársfrágreiðingin um grannskoðan av landsroknskapinum ikki er liðug. Hetta fyri at Løgtingið í størri mun kann nýta frágreiðingina í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina.

Sambært § 18 kunnu løgtingsgrannskoðararnir lata Løgtinginum frágreiðingina, sum sambært tingskipanini verður viðgjørd eftir § 80, stk. 2, sum skriv til Løgtingið.

Í frágreiðingini hevur Landsgrannskoðanin fyri hvørt málsøki sær víst á og umrøtt høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu, og tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá avvarðandi landsstýrismanni/aðalráði. Í frágreiðingini er eisini eitt brot um góðkenningarmannagongdir, og Landsgrannskoðanin hevur fyri hvørt málsøki sær víst á, hvørjir stovnar/stovnsnummar undir landsstýrismanninum hava latið Gjaldstovuni góðkenningaroyðublað fyri ársroknskapin, og um aðalráðið hevur góðkent greinaroknskapin. Harafturat hevur Landsgrannskoðanin í frágreiðingini umrøtt onnur viðurskifti, ið viðvíkja grannskoðanini av landsroknskapinum.

Argir, 17. september 2008

Beinta Dam

# 2 LØGMANSFYRISITINGIN

## 2.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Løgmansskrivstovan (rakstrarjáttan) | 13.493 | 13.809 | 316 |
| Løgmaður og landsstýrið (rakstrarjáttan) | 4.790 | 5.080 | 290 |
| Sendistovur (rakstrarjáttan) | 10.904 | 11.714 | 810 |

### 2.1.1 **Løgmansskrivstovan** (rakstrarjáttan) 2.11.1.02.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 13.493 t.kr. Meirnýtslan er 316 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur tvær undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 13.543 | 13.807 | 264 |
| 40. Inntøkufíggjað virksemi | -50 | 2 | 52 |
| **Tilsamans** | **13.493** | **13.809** | **316** |

Sambært løgmanni stendst meirnýtslan m.a. av vaksandi virksemi í alheimsgerðini (ferðing og umboðan). Harafturat var 2007 fyrsta árið, Løgmansskrivstovan hevði allar sínar KT útreiðslur bundnar í fastari gjaldsavtalu við Landsnet*. KT-kontan kundi tí ikki longur nýtast sum "stýringaramboð" í innanhýsis fíggjarstýringini. Hóast Løgmansskrivstovan visti av hesum frammanundan, "*tók tað Løgmansskrivstovuna eitt sindur á bóli.*"

### 2.1.2 **Løgmaður og landsstýrið** (rakstrarjáttan) 2.12.3.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 4.790 t.kr. Meirnýtslan er 290 t.kr. Sambært løgmanni vórðu lønir goldnar fyri 7 mánaðar eyka, tí tveir nýggir landsstýrismenn vórðu tilnevndir í ávikavist mai og november mánað 2007.

### 2.1.3 **Sendistovur** (rakstrarjáttan) 2.13.1.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 10.904 t.kr. Meirnýtslan er 810 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 21. Sendistova Føroya í Evropasamveldinum | 3.327 | 3.701 | 374 |
| 22. Sendistova Føroya í Keypmannahavn | 2.906 | 3.064 | 158 |
| 23. Sendistova Føroya í London | 2.569 | 2.794 | 225 |
| 24. Sendistova Føroya í Reykjavík | 2.000 | 2.155 | 155 |
| 29. Sendistovur, felags umsiting | 102 | 0 | -102 |
| **Tilsamans** | **10.904** | **11.714** | **810** |

* Landsnet er ein felags tøkniligur KT-depil/KT-net, sum KT-fyrisitingin rekur.

Meirnýtsla er á øllum sendistovunum. Sambært løgmanni er ein orsøk til meirnýtsluna, at tað er fyrstu ferð, at sendistovurnar sjálvar gjalda fasta upphædd fyri at vera við í Landsneti.

Sambært løgmanni varð upprit lagt fyri landsstýrisfund í november 2007, har biðið varð um undirtøku fyri, at uppskot til eykajáttan 620 t.kr. varð lagt fyri Løgtingið.

Landsstýrið valdi ikki at leggja uppskotið til eykajáttan fyri Løgtingið, tí liðið var so mikið langt út á árið. Niðanfyri er greitt gjøllari frá meirnýtsluni á hvørjari sendistovu sær.

Undirkonta 21. Sendistova Føroya í Evropasamveldinum

Meirútreiðslurnar eru 374 t.kr. Sambært løgmanni vóru tølini, sum danska uttanríkismálaráðið hevði sent Løgmansskrivstovuni fyri kostnaðin av “special attaché pakkanum”, ikki tey somu, sum Fíggjarmálaráðið fekk í sambandi við arbeiðið við fíggjarlógini fyri 2007. Harafturat vóru eykaútreiðslur til umbygging.

Undirkonta 22. Sendistova Føroya í Keypmannahavn

Meirútreiðslurnar eru 158 t.kr. Sambært løgmanni umflokkaði lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum á heysti 2007 starvið sum føroyskur sendimaður í Danmark, so hann fær løn eftir 37. lønarflokki galdandi frá 1. apríl 2006.

Undirkonta 23. Sendistova Føroya í London

Meirútreiðslurnar eru 225 t.kr. Sambært løgmanni er upphæddin til danska uttanríkismálaráðið í 2007 hækkað umleið 210 t.kr. av broytingum í persónligu viðurskiftum sendimansins. Upphæddin verður m.a. ásett eftir, hvussu stórt húski sendimaðurin á staðnum hevur.

Undirkonta 24. Sendistova Føroya í Reykjavík

Meirútreiðslurnar eru 155 t.kr. Sambært løgmanni vórðu óvæntaðar eykaútreiðslur til umbyggingina av hølunum.

## 2.2 Minninýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Viðlíkahald (rakstrarjáttan) | 500 | 466 | 34 |
| Umbygging í Tinganesi (rakstrarjáttan) | 2.300 | 1.411 | 889 |
| Menningarhjálp | 3.250 | 3.121 | 129 |

### 2.2.1 **Viðlíkahald** (rakstrarjáttan) 2.11.1.12.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 500 t.kr. Minninýtslan er 34 t.kr.

Høvuðskontan ber heitið “Viðlíkahald”, og sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina er *“endamálið við hesari rakstrarjáttan at røkja landsins ognir í Tinganesi og úti á Reyni”*. Í viðmerkingunum eru mettu viðlíkahaldsútreiðslurnar “játtaðar” á standardkontu 16 “Leiga, viðlíkahald og skattur”.

Sambært Búskaparskipan Landsins eru 13 t.kr. nýttar til m.a. ruskkoyring og aðra koyring, og um 9 t.kr. eru nýttar til ruskíløt, perur, vimplar og amboð. Útreiðslurnar eru bókaðar á standardkontu 14 “Keyp av vørum og tænastum”.

Sundurgreiningin á standardkontur í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið er ikki bindandi; men er talan um eina høvuðskontu, ið er markað til viðlíkahald, má Løgtingið rokna við, at játtanin í høvuðsheitum verður brúkt til viðlíkahald (standardkonta 16), soleiðis sum hetta útreiðsluslag er allýst í konteringarleiðbeiningini til Kontuskipan Landsins, og ikki til beinleiðis keyp av vørum og tænastum (standardkonta 14).

Verður tilfarsparturin av viðlíkahaldsarbeiðinum gjørdur upp fyri seg, skal tilfarið verða bókað undir standardkontu 14.

Sambært løgmanni hevur Løgmansskrivstovan brúkt standardkontu 14, tí hon vísir til útreiðsluslagið.

Landsgrannskoðanin skal gera vart við, at vit ikki hava sett spurnartekin við, um røtt standardkonta er nýtt. Vit hava sett spurnartekin við, um røtt høvuðskonta er nýtt.

Eftir okkara fatan eru útreiðslurnar nevndar frammanfyri ikki at rokna sum viðlíkahald ella tilfar í sambandi við viðlíkahald, soleiðis sum hugtakið er allýst í konteringarleiðbeiningini. Helst er talan um útreiðslur, ið skuldu verið bornar av rakstrarjáttanini til Løgmansskrivstovuna.

Landsgrannskoðanin hevur í frágreiðingum í oktober 2006 og 2007 gjørt vart við, at á fleiri málsøkjum tykjast høvuðskonturnar til felags viðlíkahald oftani vera nýttar til annað enn viðlíkahald, og vit reistu spurningin, um ikki hesar útreiðslur áttu at verið hildnar av vanligu rakstrarjáttanunum.

Spurningurin um ógreiðu um játtanirnar til felags viðlíkahald er gjøllari viðgjørdur í frágreiðingini undir Fíggjarmálaráðnum.

### 2.2.2 Umbygging í Tinganesi (rakstrarjáttan) 2.11.1.21.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 2.300 t.kr. Minninýtslan er 889 t.kr. Sambært løgmanni hevur tað gingið seint við at fáa tilfar til vega.

### 2.2.3 Menningarsamstarv 2.13.3.04.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 3.250 t.kr. Minninýtslan er 129 t.kr.

Á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 3.500 t.kr. Við fíggjarnevndarskjali 23. november varð játtanin lækkað 250 t.kr. Samstundis varð høvuðskonta 2.13.3.02. “Neyðhjálp” hækkað 250 t.kr. til neyðhjálp til Bangladesh, í sambandi við ódnina í oktober 2007.

Sambært landsroknskapinum eru brúktar tilsamans 3.121 t.kr. Av teimum eru 285 t.kr. brúktar til rakstrarútreiðslur og 2.836 t.kr. til stuðulsveitingar.

| Stuðulsveitingar: | kr. |
|---|---|
| 1. Center for Voksenuddannelse/Dansk Boldspil Union: Fótbóltsskúli í Kenya | 20.000 |
| 2. Mkuza Youth Development Association: Barnagarðsskúli í Tanzania | 41.726 |
| 3. World Food Programme: Matur til Senegal | 400.000 |
| 4. Adventist Development & Relief Agency: Hús í Congo | 495.000 |
| 5. ABC Barnahjálp: Skúli í Liberia | 927.288 |
| 6. Mercy Corps: Menning av fiskivinnumarknaði í Indonesia | 952.328 |
| **Tilsamans** | **2.836.342** |

Vit spurdu, um Løgmansskrivstovan hevur útvegað sær roknskap ella avrit av skjølum, ella á annan hátt hevur tryggjað sær, at peningurin verður nýttur sambært tilsagnunum til nevndu tiltøk.

Løgmansskrivstovan hevur svarað, at tey m.a hava útvegað sær frágreiðingar og roknskapir, og í ávísum førum hava tey fingið myndir.

| Rakstrarútreiðslur: | kr. |
|---|---|
| Ferðaútreiðslur, eftirlitsvitjanir o.t. | 126.883 |
| Samsýningar | 13.045 |
| Mercy Corps – Konsulentgjøld | 144.649 |
| **Tilsamans** | **284.577** |

Afturførd menningarhjálp

Í juli 2005 gjørdi Løgmansskrivstovan av at játta felagnum Barnabata 1,7 mió.kr. til at byggja barnaheim á Sri Lanka fyri.

Í juni 2007 kunnaði Løgmansskrivstovan um, at enn var einki brúkt av peninginum, burtursæð frá um 150.000 kr. til eina ferð til Sri Lanka. Barnabati hevði rent seg í trupulleikar av allahandaslagi gjøgnum tey skjótt tvey árini, sum liðin vóru, síðani tey fingu tilsøgn um stuðul, og tí var eingin peningur farin víðari til ætlaðu verkætlanina.

Løgmansskrivstovan kunnaði eisini um, at eftir at nevndin í Barnabata á aðalfundinum 15. mai í 2007 gjørdist meira skerd, og lyklapersónar, ið høvdu verið við í Sri Lanka verkætlanini frá fyrstan tíð, høvdu tikið seg úr nevndini, steðgaði Løgmansskrivstovan avtaluni við Barnabata og bóðu felagsskapin um at flyta peningin aftur til Landsstýrið. Tað játtaði Barnabati.

28. juni 2007 eru, sambært Búskaparskipan Landsins, kr. 1.519.375 bókaðar á høvuðskontu 20.52.3.10. “Aðrar inntøkur” á undirkontu 60. “Óvanligar inntøkur”.

Á skjalinum til bókingina sæst, at talan er um pening, sum er kravdur aftur frá Barnabata. Í telduposti 22. mai 2007 frá Fíggjarmálaráðnum til Løgmansskrivstovuna verður boðað frá, at upphæddin skal verða bókað, sum greitt frá frammanfyri.

Landsgrannskoðanin ivast í, um hesin bókingarháttur er rættur, við tað at talan er ikki um inntøkur, men um stuðul, sum verður kravdur aftur. Landsgrannskoðanin heldur, at

tað hevði verið skilabetri at bóka upphæddina sum “negativ útreiðsla” á høvuðskontuna fyri Menningarhjálp 2007, sum soleiðis hevði víst eina minninýtslu. Síðani hevði borið til at greitt frá um minninýtsluna.

Í skrivi í apríl 2008 til Fíggjarmálaráðið reisti Landsgrannskoðanin spurningin.

Í august 2008 svaraði Fíggjarmálaráðið, at endamálið var fyrst og fremst at tryggja, at afturførda menningarhjálpin ikki varð løgd afturat játtanini fyri 2007. Eisini varð hildið, at nýtslan tað árið hevði verið misvísandi í mun til játtanina fyri 2007. Tað er tó greitt, at við hesum hátti vísir roknskapurin ikki røttu søguligu nýtsluna av menningarhjálp yvir áramál. Ein annar møguleiki hevði verið at inntøkuført afturførdu menningarhjálpina á serstaka undirkontu undir høvuðskontuni.

## 2.3 Góðkenningarmannagongdir

Reglurnar um góðkenningarmannagongdir eru gjølla ri viðgjørdar undir Fíggjarmálum.

### 2.3.1 Greinaroknskapurin

Sambært yvirliti, sum Gjaldstovan hevur dagført í juni 2008, hevur Gjaldstovan fingið váttaðan greinaroknskap frá Løgmansfyrisitingini fyri 1. ískoytisskeið í 2007 (tíðarskeið 13), men ikki tað ískoytisskeið, sum er at rokna sum ársgreinaroknskapur.

Løgmaður hevur í juli 2008 boðað frá, at ársroknskapurin 2007 fyri Løgmansskrivstovuna varð undirskrivaður og sendur Fíggjarmálaráðnum og Gjaldstovuni 10. juni 2008.

### 2.3.2 Mánaðarroknskapurin

Sambært § 9, stk. 2, í roknskaparkunngerðini skulu stovnsleiðararnir góðkenna roknskapirnar viðvíkjandi stovnunum mótvegis hægri myndugleika.

Í juni 2008 spurdu vit, hvørjir stovnar, sum løgmaður varðaði av í 2007, luku ásetingarnar um at góðkenna mánaðarroknskapirnar mótvegis hægri myndugleika, og hvussu løgmaður/aðalráðið hevur eftirlit við, at stovnarnir lúka ásetingarnar í kunngerðini. Vit fingu einki svar.

### 2.3.3 Ársroknskapurin

Seinasti mánaðarroknskapurin er at rokna sum ársroknskapur, og stovnsleiðarin skal góðkenna ársroknskapin á serstøkum góðkenningaroyðublað.

Sambært yvirliti hjá Gjaldstovuni í juni 2008 hevur Gjaldstovan eingi góðkenningaroyðubløð fingið fyri nøkur stovnsnummar undir løgmansfyrisitingini:

| Grein | Stovnur/konta | Stovnsnr. | Tíðarskeið*) | Viðmerk. |
|---|---|---|---|---|
| 02 | Økissamstarv, The Northern Periphery | 131450 | | |
| 02 | IMO, Millumtjóða samstarv | 143344 | | |
| 02 | Neyðhjálp | 149720 | | |
| 02 | Menningarsamstarv | 149730 | | |
| 02 | Sendistovur felags umsiting | 149915 | | |
| 02 | NORA | 151080 | | |

*) ”Tíðarskeið 12” er desember mánaður. Tá ið talan er um grundarlag undir ársroknskapinum, má í minsta lagi tíðarskeið 14 vera góðkent.

| | | |
|---|---|---|
| 02 | Sendistova Føroya í Reykjavík | 151070 |
| 02 | Sendistova Føroya í Evropasamveldinum | 148403 |
| 02 | Sendistova Føroya í London | 145351 |
| 02 | Umbygging í Tinganesi | 136545 |
| 02 | Sendistova Føroya í Keypmannahavn | 145084 |
| 02 | Løgmaður og landsstýrið | 100720 |
| 02 | Løgmansskrivstovan | 100820 |
| 02 | Landsstýrið, viðlíkahald | 101020 |
| 02 | Studningur til politiska upplýsing | 106901 |
| 02 | Nord Atlantisk Brygge | 131020 |
| 02 | Inntøkufíggjað virksemi, Løgmansskrivstovan | 136385 |
| 02 | Stjórnarskipanarnevnd (Grundlógarnevndin) | 143195 |
| 02 | Altjóðagerð | 149700 |
| 02 | Einskiljing | 149710 |

Viðmerkingar frá løgmanni

Í juni 2008 bóðu vit løgmann um viðmerkingar til hesi viðurskifti. Vit fingu einki svar.

# 3 FÍGGJARMÁL

## 3.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Viðlíkahald (rakstrarjáttan) | 377 | 440 | 63 |
| Landsins ognir (rakstrarjáttan) | -2.071 | -1.630 | 441 |
| Sáttmálaviðurskifti (rakstrarjáttan) | 700 | 839 | 139 |
| Søla av partabrøvum í P/f Elektron | -5.000 | - | 5.000 |
| Stuðul til flutning og dupult húsarhald (lógarbundin játtan) | 12.500 | 13.903 | 1.403 |
| Stuðul til rentuútreiðslur (lógarbundin játtan) | 66.700 | 82.981 | 16.281 |
| FAS-endurgjald | 44.200 | 61.806 | 17.606 |

### 3.1.1 **Viðlíkahald** (rakstrarjáttan) 3.11.1.13.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 377 t.kr. Meirnýtslan er 63 t.kr. Sambært Búskaparskipan Landsins eru kr. 34.288 nýttar til m.a. rútavask, koyring og niðurtøku av rulluarkivi. Eftir okkara tykki eru slíkar útreiðslur ikki vanliga at rokna sum viðlíkahald ella tilfar í sambandi við viðlíkahald, soleiðis sum hetta hugtak er allýst í konteringarleiðbeiningini til Kontuskipan Landsins.

Landsstýrismaðurin ásannar, at ivi kann vera, um skrásetingarnar eru rættar. Útreiðslurnar til rútavask eru felagsútreiðslur hjá stovnunum í Fíggjarmálaráðnum. Útreiðslurnar til niðurtøku og koyring av rulluarkivi høvdu samband við at flyta stovnar, og kundu tað sama verið skrásettar á løgujáttanina 3.11.1.23. "Flyting av fíggjar- og búskaparstovnum landsins". Útreiðslurnar høvdu so einki við raksturin hjá nøkrum stovni at gera.

### 3.1.2 **Landsins ognir** (rakstrarjáttan) 3.11.1.23.

Á fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 2 mió.kr. Minniinntøkan er 441 t.kr. Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Oljugoymslur o.a. | - | -1.200 | -1.200 |
| 21. Húsaleiga og íbúðargjald | -1.883 | -445 | 1.438 |
| 22. Leiga av økjum, uppisitaraavgjald o.a. | -188 | 15 | 203 |
| **Tilsamans** | **-2.071** | **-1.630** | **441** |

<u>Undirkonta 20. Oljugoymslur o.a.</u>

Sambært landsstýrismanninum eru inntøkur 1,2 mió.kr. fyri leigu av oljutangunum, av tí at teir framvegis ikki vóru seldir í 2007.

<u>Undirkonta 21. Húsaleiga og íbúðargjald</u>

Sambært landsstýrismanninum stendst minniinntøkan av:

*at* leigararnir í bygninginum, har Umhvørvisstovan heldur til, t.e. Postverk Føroya og Tórshavnar kommuna, rindaðu minni enn mett var,

*at* rakstrarútreiðslur vóru av leigumálinum,

*at* Postverk Føroya steðgaði við leigumálinum 31. august 2007, og

*at* Atlantic Airways ikki rindaði 200 t.kr. fyri at leiga hangarin, tí hann varð skotin inn sum ogn í flogfelagið.

### 3.1.3 **Sáttmálaviðurskifti** (rakstrarjáttan) 3.11.1.36.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 700 t.kr. Meirnýtslan er 139 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er tað sera trupult at meta um nýtsluna, tí útreiðslurnar ofta standast av málum reistum av øðrum pørtum, so sum útreiðslur í sambandi við rættarmál og fastan gerðarrætt.

### 3.1.4 **Søla av partabrøvum í P/f Elektron** 3.11.1.46.

Á fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 5 mió.kr. Eingin inntøka er skrásett í landsroknskapinum.

Talan er um ætlaðan sølupris av partabrøvum, 1,9 mió.kr., sum landið eigur í P/f Elektron, og sum á fíggjarlógini 2006 og 2007 varð mettur til 5 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum er tað framvegis ætlanin at selja partabrøvini í P/f Elektron. Bíðað verður eftir, at umskipaða virksemið hjá fyritøkuni kemur í rættlag, soleiðis at fortreytirnar fyri søluni eru til staðar.

Í fíggjarlógaruppskotinum 2008 er søluprísurin aftur mettur til 5 mió.kr. Sambært viðmerkingunum *"kom sølan í drag, men verður sølan endaliga avgreidd í 2008. Høvuðsorsøkin til, at landið hevur ætlað at selt síni partabrøv í Elektron, er, at felagið er farið út í kapping á KT-marknaðinum. Fíggjarmálaráðið metir tað vera skeivt, at landið skal luttaka í kapping móti privatum KT-fyritøkum. Eisini er henda søla í tráð við einskiljingarætlanir Landsstýrisins."*

Landsgrannskoðanin kann skoyta uppí, at landið eigur allan partapeningin í P/f Føroya Tele, ið nú eigur 55% av KT-fyritøkuni Formula.fo.

### 3.1.5 **Stuðul til flutning og dupult húsarhald** (lógarbundin játtan) 3.21.2.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 12,5 mió.kr. Meirnýtslan er 1,4 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum var torført at meta um nýtsluna.

### 3.1.6 **Stuðul til rentuútreiðslur** (lógarbundin játtan) 3.22.4.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 66,7 mió.kr. netto. Meirnýtslan er 16,3 mió.kr. netto.

Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at hækka játtanina 12 mió.kr. netto. Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina "*hevur eitt hægri rentustøði ført við sær, at neyðugt er at søkja um brutto 18 mió.kr. til rentustuðul. Av tí, at kommunurnar endurrinda landinum umleið 1/3 av stuðlinum, verður søkt um netto 12 mió.kr. til stuðul til rentuútreiðslur.*" Lógaruppskotið fall burtur, tí at løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Niðanfyri eru roknskapartøl fyri árini 2002–2007:

t.kr.

| | 2002[1] | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Stuðul | 100.827 | 86.494 | 83.538 | 84.200 | 85.358 | 123.643 |
| Flyting frá kommunum | 31.136 | 28.069 | 27.152 | 27.775 | 28.165 | 40.662 |
| **Nettoútreiðslur** | **69.691** | **58.425** | **53.386** | **56.425** | **57.193** | **82.981** |

Er endamálið við rentustuðlinum rokkið?

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í november 2007 setti Landsgrannskoðanin enn einaferð spurningin, um endamálið við rentustuðlinum er rokkið:

> *Við Ll. nr. 148/1996 um "stuðul til rentuútreiðslur av lánum" varð rentufrádráttarskipanin í skattinum løgd um til eina stuðulsskipan. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur m.a.:*
>
> > "at rentufrádrátturin hevur leingi verið nýttur sum ein óbeinleiðis stuðul til sethúsabygging. Í 80´árunum vóru nógv og stór lán veitt til nógv ymisk endamál, t.d. keyp av fleiri húsum, bilum, summarhúsum, uttanlandsferðir og aðra privatnýtslu. Landsstýrið ynskti ikki at stuðla hesi nýtslu skattliga og legði tí uppskot fyri Tingið í 1990 um at avtaka rentufrádráttin fyri øll lán uttan sethúsalán, lestrarlán og lán til innfrían av veðhaldi."
>
> *Eftir hesum at døma er rentustuðulin til sethúsalán ein óbeinleiðis stuðul til sethúsabygging, og vóru avmarkingarnar gjørdar, tí Landsstýrið ikki framhaldandi ynskti at stuðla privatnýtslu.*
>
> *Sammett við siðvenju fyri bert fáum árum síðani, kemur í dag helst oftari fyri, at sethúsalán ikki verða goldin aftur. Talan er um lán, har 40% av rentuútreiðslunum verða latin sum rentustuðul frá landinum. Sum víst á frammanfyri, ber til at fáa rentustuðul í eitt óavmarkað tíðarskeið.*
>
> *Ein avleiðing av rentustuðlinum tykist sostatt vera, at fólk verða eggjað til ikki at rinda síni sethúsalán aftur, kanska heldur ikki renturnar. Eitt størri fíggjarligt rásarúm kann síðani verða brúkt til onnur endamál, m.a. privatnýtslu ella til uppsparing til eitt nú kapitalpensjón, ratupensjón ella íløgur í virðisbrøv o.t. Landsgrannskoðanin ivast í, um hetta var endamálið við at veita rentustuðul.*
>
> *"Landsgrannskoðanin heldur, at lógin um rentustuðul lýkur ikki krøvini til eina góða studningslóg. Endamálið við studninginum er ikki nóg greitt ella nóg neyvt, og ongar ábendingar eru um, hvørji ítøkilig úrslit/eyðkenni kunnu verða nýtt til at eftirmeta, um endamálið við studninginum er rokkið. Landsgrannskoðanin hevur mælt landsstýrismanninum til at viðgera henda spurning."*

Í áliti sínum til eykajáttanarlógina september 2006 helt Fíggjarnevndin, at:

> *"tað tykist sum gongdin í Føroyum viðvíkjandi sethúsafígging alsamt meira líkist gongdini í grannalondum okkara, við tað at tað verður alsamt meira vanligt, at lán í sethúsum ikki verða niðurgoldin. Við verandi rentustuðli verður vanligt forbrúk sostatt stuðlað úr landskassanum. Fíggjarnevndin heldur, at landsstýrismaðurin eigur sum skjótast at finna eina loysn, sum hevur eina breiða politiska semju."*

Spurdur, hvat er hent í málinum, svaraði landsstýrismaðurin í juli 2007:

> *"Landsstýrismaðurin er samdur við Landsgrannskoðanini í, at endamálið við rentustuðlinum er heldur ógreitt. Ásannast má eisini, at rentustuðulin í flestum førum ikki lættir um hjá sethúsaeigara, men ístaðin er vorðin ein fíggjarlig byrða hjá landskassa og kommunum. Henda gongd gerst týðiligari, nú tað verður meira vanligt, at sethúsalán í minni mun verða niðurgoldin, sum óbeinleiðis hevur við sær, at vanlig nýtsla verður*

[1] Í 2002 var stuðulin 42%. Síðani 2003 er stuðulin 40% av rentunum.

*stuðlað, og beinleiðis hevur við sær, at fíggjarliga byrðan hjá landskassa og kommunum veksur.*

*Landsstýrismaðurin er sannførdur um, at rentustuðulsskipanin eigur at verða endurskoðað, har neyðugu atlitini verða tikin fyri fíggjarligu bindingunum, sethúsaeigarar hava langt fram í tíðina. Ásannast má, at tað neyvan verða gjørdar tær stóru broytingarnar í hesum valskeiðnum, eftirsum flest allir flokkar fóru til val við lyftinum um at varðveita rentustuðulsskipanina, og sum harafturat er ásett í samgonguskjalinum. Landsstýrismaðurin er tó sinnaður til í heyst at gera eina roynd at finna eina loysn, sum hevur breiða politiska semju."*

Spurdur, hvat síðani er hent í málinum, hevur landsstýrismaðurin í juni 2008 svarað:

*"Landsstýrismaðurin og Landsstýrið eru samd við Landsgrannskoðanina um, at rentustuðulsskipanin, sum er vorðin ein alsamt vaksandi fíggjarlig byrða hjá landskassa og kommunum, eigur at verða endurskoðað.*

*Landsstýrismaðurin og Landsstýrið fara helst í sambandi við fíggjarlógararbeiðið fyri 2009 at gera eina roynd at finna eina loysn, sum hevur breiða politiska semju, og har neyðugu atlitini verða tikin fyri fíggjarligu bindingunum sethúsaeigarar hava langt fram í tíðina, so ikki beinini verða skrykt undan teimum."*

### 3.1.7 **FAS-endurgjald** 3.35.1.05.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 44,2 mió.kr. netto. Meirnýtslan er 17,6 mió.kr. netto.

Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at hækka játtanina 12 mió.kr. netto. Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina "*hevur FAS-endurgjaldið vegna økt virksemi verið størri enn væntað í ár.*" Lógaruppskotið fall burtur, tí at løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Sambært landsstýrismanninum er virksemið økt og útgjaldingarnar vaksnar uppaftur meira, enn mett var í uppskotinum til eykajáttanarlóg.

## 3.2 Minninýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---:|---:|---:|
| Búskaparráðið (rakstrarjáttan) | 740 | 472 | 268 |
| Umsiting av ogn og skuld landsins (rakstrarjáttan) | 1.632 | 1.222 | 410 |
| Hagstova Føroya (rakstrarjáttan) | 8.902 | 8.646 | 256 |
| Tænastumannaeftirlønir (lógarbundin játtan) | 17.500 | 16.495 | 1.005 |
| Útgjald úr Trygdargrunninum (lógarbundin játtan) | 500 | 34 | 466 |
| Stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði (lógarbundin játtan) | 25.000 | 491 | 24.509 |

### 3.2.1 **Búskaparráðið** (rakstrarjáttan) 3.15.1.13.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 740 t.kr. Minninýtslan er 268 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er virkishátturin hjá Búskaparráðnum broyttur, soleiðis at fulltíðar skrivari ikki longur er settur. Ístaðin er valdur ein leistur, har ráðslimir og formaðurin fáa størri fasta samsýning fyri at átaka sær størri lut av arbeiðsuppgávunum. Hesin leistur er ein ódýrari loysn.

### 3.2.2 **Umsiting av ogn og skuld landsins** (rakstrarjáttan) 3.15.1.23.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 1.632 t.kr. Minninýtslan er 410 t.kr. Sambært landsstýrismanninum var eingin lánsbrævaútgáva í 2007, og tí var eingin peningur nýttur til at keypa ráðgeving ella serkøna hjálp fyri.

### 3.2.3 **Hagstova Føroya** (rakstrarjáttan) 3.15.2.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 8.902 t.kr. Minninýtslan er 256 t.kr.

Á fíggjarlógini 2007 vóru upprunaliga játtaðar 8.302 t.kr. Á eykajáttanarlógini mars 2007-5 varð játtanin hækkað 600 t.kr. Peningurin skuldi nýtast til at seta ein stýrisbólk við 5 fólkum og einum verkætlanarsamskipara at fyrireika eitt fólkateljingarátak í samsvari við “Census 2010” hjá ST.

Sambært landsstýrismanninum byrjaði arbeiðið við fólkateljingarátakinum “Census 2010” ikki fyrr enn í oktober 2007.

### 3.2.4 **Tænastumannaeftirlønir** (lógarbundin játtan) 3.18.1.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 17.500 t.kr. Minninýtslan er 1.005 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er torført at meta um til- og frágongd av eftirlønartakarum.

### 3.2.5 **Útgjald úr Trygdargrunninum** (lógarbundin játtan) 3.21.7.10.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 500 t.kr. Minninýtslan er 466 t.kr. Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina varð útgjaldið úr Trygdargrunninum í 2007 mett til í mesta lagi 0,5 mió.kr.

Einki er goldið úr grunninum í 2007. Útreiðslurnar í 2007, 34 t.kr., eru eftirstøður, ið eru avskrivaðar.

Inniogn

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2006 umrøddi Landsgrannskoðanin inniognina hjá Trygdargrunninum. Í apríl 2006 vórðu 74,3 mió.kr. fluttar frá peningastovnskontum til kontu í Landsbankanum.

Spurdur, hvat ætlanin var við hesari peningaupphædd, svaraði landsstýrismaðurin í juni 2006:

> *“Endalig avgerð er ikki tikin um henda spurning. Trygdargrunnurin er tikin inn í fíggjarlógina og tikin við í landsroknskapinum, og kundi hetta talað fyri at tikið peningin inn í landskassans vanliga gjaldføri, men ásannast má tó, at peningurin er kravdur inn við serligari løgtingslóg til serligt endamál. Inntil løgtingslógin um Trygdargrunnin møguliga verður broytt, haldi eg, at rættast er at hava nevndu upphædd setta til síðis.”*

Landsgrannskoðanin spurdi síðani landsstýrismannin, nær støða fór at verða tikin til henda spurning.

Í oktober 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at ætlanin var í somu tingsetu at taka Trygdargrunnin av. Tað fór at hava við sær, at lógin um Trygdargrunnin varð tillagað soleiðis, at landið átók sær skyldurnar og yvirtók ognirnar.

Í juli 2007 boðaði landsstýrismaðurin frá, at eingin endalig støða var tikin í málinum, men hon fór vónandi at verða tikin í næstu tingsetuni.

Í august 2008 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at peningurin hjá Trygdargrunninum ikki er partur av gjaldføri landskassans, men er settur til síðis í Landsbankanum. Sambært landsstýrismanninum er framvegis eingin politisk avgerð tikin um framtíðina hjá grunninum, og tí heldur ikki um peningin.

### 3.2.6 Stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði
(lógarbundin játtan) 3.22.4.04.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 25 mió.kr. At kalla eingin peningur er brúktur, og minninýtslan er 24,5 mió.kr.

Á fíggjarlógini 2007 var upprunaliga eingin játtan. Á eykajáttanarlógini mai 2007 vórðu játtaðar 25 mió.kr. Eykajáttanin var ein avleiðing av, at mvg-lógin varð broytt í 2007, tá ið undantakið fyri at gjalda meirvirðisgjald av lønum til at byggja og umvæla egnan bústað varð strikað, og løgtingslóg um stuðul til at byggja og umvæla egnan bústað varð sett í gildi.

Sambært landsstýrismanninum vórðu nógvar byggiavtalur gjørdar sambært skiftisreglunum, áðrenn lógin fekk gildi 1. juli 2007, og tær eru tí frítiknar fyri mvg eftir gomlu reglunum.

## 3.3 Rentur/frávik

Talvurnar niðanfyri vísa játtan á fíggjarlóg og roknskapartøl fyri rentuútreiðslur og rentuinntøkur í 2007.

### 3.3.1 Rentur av landsins skuld 20.50.1.

mió.kr.

| | Rentuútreiðslur 20.50.1. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Rentur at gjalda | 88,0 | 63,3 | -24,7 |
| | **Tilsamans** | **88,0** | **63,3** | **-24,7** |

Á talvuni sæst, at rentuútreiðslur av landsins skuld eru 24,7 mió.kr. lægri, enn mett var.

Í viðmerkingunum til fíggjarlógina stendur:

> ”*Meginparturin av skuldini til danska statin varð í 2005 umlagdur til lánsbrævaskuld. Eftirverandi skuldin til danska statin er tí í dag 500 mió.kr. Hendan skuld er rentufrí og fellur bara til gjaldingar um olja verður funnin í føroysku undirgrundini áðrenn 2018. Kursvirðið á lánsbrævaskuld landskassans er 3 mia. kr.*
>
> *Tilsamans eru rentuútreiðslurnar av hesari skuld landskassans mettar til 52,5 mió.kr. í 2006 og 88 mió.kr. í 2007. Tó at stór óvissa er viðvíkjandi rentustøði v.m., eru rentuútreiðslur landskassans settar at minka í 2008. Orsøkin er, at inntøka landskassans av partvísu søluni av Føroya Banka í 2007 ger, at rentuútreiðslurnar netto minka í 2008, alt annað líka.*”

Sambært landsstýrismanninum er høvuðsorsøkin til minninýtsluna, at javnað er fyri tíðaravmarkaða/goldna rentu og ikki staðfestan kursmun. Harafturat varð rentuberandi skuld landskassans niðurgoldin við 75,7 mió.kr.

Landsgrannskoðanin hevur áður víst á, at *“talan er um “óneyðugar” bókingar av kursmunum, ið grugga tíðaravmarkanina av rentuútreiðslum millum árini.”* Vit kunnu í hesum

sambandi endurgeva viðmerkingar okkara í frágreiðingini til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2006 "um frávik millum játtan og nýtslu o.a.":

> *"Broytingin í kursvirðinum á brævalánunum pr. statusdagin verður bókað sum kursmunur saman við rentuútreiðslunum. Hesin roknskaparháttur kann hava við sær ávís sveiggj í rentuútreiðslunum. Kursmunurin hevur ávirkað roknskapin 2005 við um 3,6 mió.kr. netto (inntøka), í 2004 var hinvegin talan um eina nettoútreiðslu um 17,5 mió.kr.*
>
> *Hesin kursmunur er hvørki vinningur ella tap, uttan so at brævalán verða afturkeypt í úrtíð. Er tað ikki ætlanin, kann verða sagt, at talan er um "óneyðugar" bókingar av kursmunum, ið grugga tíðaravmarkanina av rentuútreiðslum millum árini. Tá brævalán er skrivað út og selt, veit Landsstýrið, hvønn kurs tað er selt fyri. Brævalánið skal rindast aftur til kurs 100, og tí kennir Landsstýrið eisini samlaða kursmunin. Hesin kursmunur kundi verið javnaður út liniert millum árini, brævalánið varir. Landsgrannskoðanin hevur tí reist spurningin, um ikki hesin bókingarháttur hevði verið rætta mannagongdin.*
>
> *Í juni 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at talan er um eina roknskaparliga meginreglu, ið hevur verið nýtt í mong ár. Landsstýrismaðurin heldur tað ikki verða rætt at broyta roknskaparmeginreglu á hesum øki. Galdandi roknskaparregla gevur eina rættvísandi mynd av rakstri og fíggjarstøðu við ársenda."*

### 3.3.2 Millumverandi við Tjóðbankan og Landsbankan 20.50.2.

mió.kr.

| | Rentuinntøkur 20.50.2. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Rentuinntøkur av innistandandi | 40,5 | 40,0 | -0,5 |
| 04. | Aðrar rentur | 5,0 | 2,5 | -2,5 |
| 07. | Útgoldið yvirskot frá Landsbanka Føroya | 8,0 | 15,6 | 7,6 |
| 10. | Útgoldið yvirskot frá Danmarks Nationalbank | 22,0 | 19,2 | -2,8 |
| | **Tilsamans** | **75,5** | **77,3** | **1,8** |

Undirkonta 07. Útgoldið yvirskot frá Landsbanka Føroya

Talan er um eina inntøku 15,6 mió.kr.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina "*røkir Landsbankin lán landskassans. Samsýningin fyri hetta er ¼ promillu av ríkisláninum og ½ promillu av øðrum lánum. Landsbankin fær herumframt 1% av fíggjarplaseringum landskassans. Hetta svarar í 2007 væntandi til umleið 16,5 mió.kr. tilsamans.*

*Í 2005 vórðu 11,9 mió.kr. útgoldnar av avlopinum hjá Landsbankanum. Metta upphæddin fyri 2007 er 8 mió.kr. Av tí at Landsbankin ætlandi skuldi verða upprættaður við rakstrarjáttan í 2006, varð eingin inntøka ásett á hesi høvuðskontu í fíggjarlógini tað árið."*

Í desember 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann arbeiddi við einari grundleggjandi umskipan av virkseminum hjá Hagstovuni, Landsbankanum og Búskaparráðnum. Fíggjarmálaráðið var liðugt at evna til lógaruppskot at fremja umskipanina.

Í oktober 2007 kunnaði landsstýrismaðurin um, at tað hevði ikki eydnast honum at fáa politiska undirtøku fyri at leggja stovnarnar saman í eina játtan á fíggjarlógini. Arbeitt verður tó framvegis við, at stovnarnir bygnaðarliga verða samskipaðir undir somu lon.

Í juni 2008 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at arbeitt verður framvegis við, at stovnarnir bygnaðarliga verða samskipaðir. Enn er eingin greið niðurstøða, men væntandi verður okkurt uppskot at taka støðu til seinni í 2008.

## 3.4 Inntøkur/frávik

Talvurnar niðanfyri vísa játtan á fíggjarlóg og roknskapartøl fyri inntøkur í 2007.

### 3.4.1 Skattainntøkur 20.52.1.

mió.kr.

| | Skattainntøkur 20.52.1. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Vanligur landsskattur | 1.390,0 | 1.420,9 | 30,9 |
| 06. | Kolvetnisskattur, persónar | 5,0 | 7,7 | 2,7 |
| 07. | Felagsskattur | 170,0 | 160,1 | -9,9 |
| 08. | Kolvetnisskattur, feløg | 5,0 | 2,6 | -2,4 |
| 10. | Vinningsbýtisskattur | - | 0,1 | 0,1 |
| 11. | Kapitalvinningsskattur | 60,0 | 89,3 | 29,3 |
| 13. | Avgjald av kapitaleftirlønum | 11,0 | 14,5 | 3,5 |
| 25. | Arvaavgjøld | 5,0 | 7,2 | 2,2 |
| 28. | Gjald til barsilsskipanina | 82,0 | 85,9 | 3,9 |
| 30. | Gjald frá Búnaðarstovuni | 2,7 | 2,7 | - |
| | **Tilsamans** | **1.730,7** | **1.791,0** | **60,3** |

Á fíggjarlógini 2007 eru játtaðar 1.390 mió.kr. á undirkontu 01. "Vanligur landsskattur". Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at hækka inntøkurnar 15 mió.kr., vísandi til, at meirinntøkurnar frá FAS-skipanini fóru at verða 15 mió.kr. Lógaruppskotið fall burtur, tí at løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Størstu frávikini eru "Vanligur landsskattur" og "Kapitalvinningsskattur", sum eru ávikavist 30,9 mió.kr. og 29,3 mió.kr. hægri, enn mett var. Sambært landsstýrismanninum er frávikið fyri "Vanligur landsskattur" stórt í krónum, men ikki í prosentum, um roknað verður við at eykajáttanarumbønin hevði verið samtykt. Orsøkin til, at "Kapitalvinningsskattur" er væl hægri enn mett var, er í stóran mun av hækkaða rentustøðinum.

### 3.4.2 Avgjøld og tollur 20.52.2.

mió.kr.

| | Avgjøld og tollur 20.52.2. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Meirvirðisgjald | 1.235,0 | 1.297,8 | 62,8 |
| 04. | Tollavgjøld | 35,0 | 44,4 | 9,4 |
| 07. | Punktgjald | 180,0 | 181,3 | 1,3 |
| 10. | Lønhæddargjald | 13,0 | 15,4 | 2,4 |
| 13. | Brennioljugjald | 60,0 | 66,6 | 6,6 |
| 16. | Framleiðsluavgjald | 20,0 | 20,5 | 0,5 |
| 19. | Skrásetingargjald | 115,0 | 153,4 | 38,4 |
| 22. | Vegskattur (vektgjald) | 80,0 | 84,1 | 4,1 |
| 25. | Ferðaavgjald | 12,0 | 13,3 | 1,3 |
| 28. | Umhvørvisavgjald á smyrjiolju | 2,2 | 2,0 | -0,2 |
| | **Tilsamans** | **1.752,2** | **1.878,8** | **126,6** |

Á fíggjarlógini 2007 eru upprunaliga játtaðar 1.210 mió.kr. á undirkontu 01. ”Meirvirðisgjald”. Á eykajáttanarlógini mai 2007 varð játtanin hækkað 25 mió.kr. Eykajáttanin var ein avleiðing av, at mvg-lógin varð broytt í 2007, tá ið meirvirðisgjaldsundantakið fyri lønir til at byggja og umvæla egnan bústað varð strikað.

Størstu frávikini eru “Meirvirðisgjald” og “Skrásetingargjald”, sum eru ávikavist 62,8 mió.kr. og 38,4 mió.kr. hægri enn mett. Sambært landsstýrismanninum vórðu inntøkurnar væl hægri, tí metingin bygdi á, at vøksturin í nýtsluveitsluni seinnu árini fór at hasa av. Soleiðis varð ikki í 2007, men sum inntøkurnar fyri 2008 higartil hava verið, sær út til at vøksturin nú er hasaður av.

### 3.4.3 Ymiskar inntøkur 20.52.3.

mió.kr.

| | Ymiskar inntøkur 20.52.3. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Útluting frá Fíggingargrunninum frá 1992 | 50,0 | - | -50,0 |
| 04. | Útluting frá almennum partafeløgum | 30,0 | 31,7 | 1,7 |
| 10. | Aðrar inntøkur | 8,3 | 13,2 | 4,9 |
| | **Tilsamans** | **88,3** | **44,9** | **-43,4** |

<u>Undirkonta 01. Útluting frá Fíggingargrunninum frá 1992</u>

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina “*verður í 2007 roknað við 50 mió.kr. frá Fíggingargrunninum. Í sambandi við, at Fíggingargrunnurin fer at selja síni partabrøv í Føroya Banka, fer vanliga vinningsbýtið úr grunninum væntandi at minka so hvørt sum sølan fer fram.*” Einki vinningsbýti er skrásett í landsroknskapinum 2007.

Sambært landsstýrismanninum gjørdu Føroya Banki og Fíggingargrunnurin av, í sambandi við søluna av partabrøvunum í Føroya Banka, ikki at rinda vinningsbýti fyri 2006.

<u>Undirkonta 04. Útluting frá almennum partafeløgum</u>

Talan er um vinningsbýti frá hesum partafeløgum:

| | |
|---|---|
| P/f Føroya Tele | 31,0 mió.kr. |
| P/f Virðisbrævamarknaður Føroya | <u>0,7 mió.kr.</u> |
| **Tilsamans** | <u>**31,7 mió.kr.**</u> |

### 3.4.4 Aðrar inntøkur 20.52.3.10.

t.kr.

| | Aðrar inntøkur 20.52.3.10. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Loyvisgjald | 50 | - | -50 |
| 02. | Skeinkiloyvi, avgjald | 65 | 45 | -20 |
| 04. | Navnaprógv | 10 | 9 | -1 |
| 05. | Bøtur | 1.000 | 660 | -340 |
| 07. | Burturlutingargjald | 1.100 | 779 | -321 |
| 09. | Løggilding av el-innleggjarum, avgjald | 75 | 120 | 45 |
| 11. | Víddargjald | 6.000 | 8.663 | 2.663 |
| 60. | Óvanligar inntøkur | - | 2.912 | 2.912 |
| | **Tilsamans** | **8.300** | **13.188** | **4.888** |

Størstu frávikini eru “Víddargjald” og “Óvanligar inntøkur”, sum eru ávikavist 2.663 t.kr. og 2.912 t.kr. hægri, enn mett var. Sambært landsstýrismanninum er ringt at meta um hesar inntøkur.

Víddargjald er eitt árligt gjald, sum oljufeløgini gjalda fyri øki, tey hava fingið tillutað. Byrjunargjaldið er 500 kr. pr. ferkilometur pr. loyvisdag. Eftir 6 árum hækkar gjaldið árliga.

Høvuðskontan “Óvanligar inntøkur” verður nýtt til óvanligar inntøkur og útreiðslur, sum ikki kunnu verða bókaðar aðrastaðni; m.a. eru 1.519 t.kr. bókaðar sum afturgjald av stuðli til “Barnabata”, sum ætlanin var at byggja barnaheim á Sri Lanka fyri.

Undir kontuni ”Menningarhjálp” undir Løgmansskrivstovuni hevur Landsgrannskoðanin víst á, at vit ivast í, um tað er rættur bókingarháttur, tí at talan ikki er um inntøkur, men um stuðul, sum verður kravdur aftur.

Landsgrannskoðanin heldur, tað hevði verið skilabetri, um peningurin varð bókaður sum “negativ útreiðsla” á høvuðskontuna fyri Menningarhjálp 2007, sum tá hevði víst eina minninýtslu. Síðani hevði borið til at greitt frá um minninýtsluna.

Í skrivi 29. apríl 2008 til Fíggjarmálaráðið reisti Landsgrannskoðanin spurningin.

Í august 2008 svaraði Fíggjarmálaráðið, at endamálið var fyrst og fremst at tryggja, at afturførda menningarhjálpin ikki varð løgd afturat játtanini fyri 2007. Eisini varð hildið, at nýtslan tað árið hevði verið misvísandi í mun til játtanina. Tað er tó greitt, at við hesum hátti vísir roknskapurin ikki røttu søguligu nýtsluna av menningarhjálp yvir áramál. Ein annar møguleiki hevði tí verið, at inntøkuført afturførdu menningarhjálpina á serstaka undirkontu undir høvuðskontuni.

### 3.4.5 **Heildarveiting o.t**. 20.54.1.

mió.kr.

| | Heildarveiting o.t. 20.54.1. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Heildarveiting | 615,5 | 615,5 | - |
| 02. | Endurgjøld | 19,5 | 17,0 | -2,5 |
| | **Tilsamans** | **635,0** | **632,5** | **2,5** |

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2005 umrøddu vit eitt endurgjald frá danska statinum viðvíkjandi sjúkrahúsverkinum. Hetta endurgjald var ikki komið við í roknskapirnar árini frammanundan, m.a., av tí at samskiftistrupulleikar høvdu verið millum danskar og føroyskar myndugleikar um, hvagar endurgjaldsuppgerðin skuldi sendast. Talan var um mett endurgjald 3 mió.kr. fyri tíðarskeiðið 1. januar 1977 – 31. desember 2004.

Í september 2005 spurdi Landsgrannskoðanin, nær upphæddin fór at verða goldin.

Í oktober 2005 kunnaði Fíggjarmálaráðið um, at Føroya Gjaldstova í næstum fór at gera kravið galdandi.

Í juli 2007 kunnaði landsstýrismaðurin um, at *“kravið er og verður árliga gjørt galdandi, men at tað hongur í fíggjarstøðuni, eftirsum tað ikki higartil er goldið av danska statinum. Tað er líkt til, at hjá donsku myndugleikunum valdar óvissa, bæði um rættleikan av endurgjaldskravinum og síðani eisini um, hvør stovnur/játtan skal halda útreiðslurnar.”*

Í juni 2008 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at líkt er til, at ein loysn verður funnin í málinum, bæði viðvíkjandi uppgerðini av kravinum og gjaldingini.

### 3.4.6 Serinntøkur, Føroya Banki, søla av partabrøvum 53.15.1.

mió.kr.

| | Serinntøkur 53.15.1.21. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Føroya Banki, søla av partabrøvum | 400,0 | 1.212,0 | 812,0 |
| | **Tilsamans** | **400,0** | **1.212,0** | **812,0** |

Meirinntøkan er 812 mió.kr. Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina, "*verður í 2007 farið undir at einskilja Føroya Banka. Fíggingargrunnurin frá 1992, ið er formligi eigarin av bankanum, stendur fyri hesi uppgávu. Fíggjarmálaráðið hevur mett, at inntøkurnar av einskiljing av Føroya Banka verða 400 mió.kr. í 2007. Henda upphædd svarar til áleið 1/3 av innara virðinum á bankanum.*

*Fíggjarmálaráðið leggur tó dent á, at avgerandi fyri hvør upphæddin í seinasta enda verður, er hvussu stóran part av bankanum Fíggingargrunnurin velur at selja í 2007 og til hvønn kurs partabrøvini verða seld fyri.*"

Sambært landsstýrismanninum stavar meirinntøkan frá, at 2/3 av partabrøvunum í Føroya Banka vórðu seldir til kurs 189, sum var munandi hægri kursur enn tann, sum var grundarlagið undir játtanini. Eingin niðurstøða er gjørd um at selja seinasta triðingin av partabrøvunum í Føroya Banka.

## 3.5 Aðrar viðmerkingar

### 3.5.1 Ógreiða um játtanir til felags viðlíkahald

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar 19. oktober 2007 vístu vit á s. 18-19 á ógreiðu um játtanir til felags viðlíkahald:

> *"Landsgrannskoðanin gjørdi vart við, at á flestu málsøkjum eru játtanir, sum eru markaðar til felags viðlíkahald. Víst varð á, at hesar játtanir í ávísan mun verða brúktar til at keypa vørur, tænastur og útbúnað, ið vanliga ikki er at rokna sum viðlíkahald ella tilfar í sambandi við viðlíkahald. Skipanin, at hava eina felags játtan á einum málsøki til viðlíkahald, byrjaði sum ein kreppuloysn við uppskotinum til fíggjarlógina 1994. Minkandi játtanir høvdu tá ført til, at viðlíkahald av bygningum ofta varð spart burtur, og fleiri bygningar vóru í ringum standi.*
>
> *Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum helt í oktober 2006, at tørvur framvegis er á tílíkum felags játtanum. Landsstýrismaðurin er samdur í, at tað er ov tilvildarligt og ógreitt, hvat verður bókað sum felags viðlíkahald. Fleiri av dømunum um viðlíkahaldsútreiðslur, sum nevnd eru í frágreiðingini, eru at rokna sum vanlig keyp av útbúnaði ella afturvendandi keyp av tænastum, ið av røttum skuldu verið skrásett undir vanligum rakstri. Tað kundi talað fyri, at tørvur er á einari reglugerð, sum útgreinar, hvat kann verða skrásett sum viðlíkahald. Sambært landsstýrismanninum er tað ein uppgáva hjá Fíggjarmálaráðnum, men hann heldur tað vera týdningarmikið, at Byggiumsiting Landsins tekur lut í hesum arbeiði.*
>
> *Í apríl 2007 spurdu vit, hvat síðani er hent í málinum.*
>
> *Í juli 2007 hevur landsstýrismaðurin svarað, at enn er eingin reglugerð gjørd, men tað frítekur ikki stovnsleiðarum at nýta vit og skil í sambandi við skráseting av útreiðslum á viðlíkahaldsjáttanunum. Fíggjarmálaráðið heldur framvegis, at tørvur er á einari reglugerð, men heldur ikki málið hava hægstu raðfesting."*

Í juni 2008 kann landsstýrismaðurin bert staðfesta, at enn er eingin reglugerð gjørd, men at Fíggjarmálaráðið hevur somu áskoðan á málið, sum fyrr fráboðað.

### 3.5.2 Fyrisitingarútreiðslur verða spjaddar

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar 19. oktober 2007 stendur á s. 19:

*Á s. 21 - 23 í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar 26. oktober 2006 "um frávik millum játtan og nýtslu o.a." stendur m.a.:*

*"Undir "Útbúgving og Gransking", hevur Landsgrannskoðanin m.a. víst á, at samanumtikið ivast vit í, um játtanin til umsitingar-/fyrisitingarútreiðslur til Mentamálaráðið í nóg stóran mun er gjøgnumskygd. Vísandi til viðmerkingar okkara til høvuðskontu:*

- *7.11.1.14. "Viðlíkahald",*
- *7.23.1.07. "Ymiskar felagsútreiðslur",*
- *7.23.2.01. "Fólkaskúlin" og*
- *7.23.1.31. "Próvtøkur"*

*verður spurningurin eisini reistur, um játtanin til sjálvt "Mentamálaráðið" í veruleikanum átti at verið einari 4-5 mió.kr. hægri.*

*Eisini á øðrum málsøkjum er spurningurin um at spjaða fyrisitingarútreiðslur umrøddur, og Landsgrannskoðanin hevur millum ár og dag gjørt fleiri stovnar varugar við, at tað er ikki rætt at blanda umsitingar-/fyrisitingarútreiðslur á einum stovni saman við øðrum játtanum, ið ein stovnur umsitur."*

*Landsgrannskoðanin helt ikki roknskapin vera nóg gjøgnumskygdan, tá ið ein stovnur ella aðalráð spjaðir fyrisitingarútreiðslur á aðrar játtanir, ið stovnurin/aðalráðið hevur ræði á. Henda mannagongd kann eisini vera við til at fjala hækkandi fyrisitingarútreiðslur.*

*Eisini Gjaldstovan helt seg síggja oftari, at stovnar, sum umsita stórar játtanir, leggja fyrisitingarútreiðslur undir hesar játtanir. Úrslitið er, at fyrisitingarútreiðslurnar ikki geva røttu myndina av, hvat fyrisitingin veruliga kostar, og søguligar samanberingar, sum er tað týdningarmesta politiska stýringaramboðið, verða eisini órógvaðar.*

*Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum helt eisini í oktober 2006, at fyrisitingarútreiðslur í mest møguligan mun eiga at verða savnaðar undir aðalráðunum. Fíggjarmálaráðið mælti til, at umrøddu høvuðskontur og aðrar verða gjøgnumgingnar fyri at fáa staðfest, í hvønn mun fyrisitingarútreiðslur eru á hesum játtanum, og um hesar útreiðslur eiga at verða fluttar til avvarðandi aðalráð.*

*Í apríl 2007 spurdu vit landsstýrismannin í fíggjarmálum, hvat var hent í málinum.*

*Í juli 2007 hevur landsstýrismaðurin svarað, at Fíggjarmálaráðið fer ætlandi at taka henda spurning upp við hini aðalráðini í sambandi við gerð av fíggjarlógaruppskotinum 2008."*

Í juni 2008 hevur landsstýrismaðurin ásannað, at dentur var ikki lagdur á henda spurning, tá ið fíggjarlógin fyri 2008 var til viðgerðar. Fíggjarmálaráðið fer at gera eina roynd aftur at taka spurningin upp við hini aðalráðini í sambandi við fíggjarlógararbeiðið fyri 2009.

## 3.6 Góðkenningarmannagongdir

### 3.6.1 Greinaroknskapurin

Sambært § 9, stk. 1, í kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 "um roknskaparverk landsins o.t." (roknskaparkunngerðin) skulu aðalráðini og aðrir javnsettir myndugleikar (eftir reglum, sum Føroya Gjaldstova hevur ásett) góðkenna roknskapir mótvegis Fíggjarmálaráðnum viðvíkjandi egnum virksemi og virkseminum hjá teimum stovnum, sum hoyra undir aðalráðini/ myndugleikarnar.

Síðani mars mánaði 2001 er álagt aðalstjórunum at góðkenna greinaroknskapin mótvegis Fíggjarmálaráðnum. Góðkenningin skal latast inn á serligum góðkenningarskjali í seinasta lagi 10. í øðrum mánaði eftir mánaðarlok (EK75).

Greinaroknskapurin er ein samandráttur av játtanar/mánaðarroknskapunum undir einari grein. Aðalstjórarnir skulu vegna landsstýrismannin vátta, at allir játtanarroknskapirnir, ið liggja undir greinaroknskapinum, eru góðkendir av stovnsleiðarum sambært galdandi reglum.

Á góðkenningarskjalinum skulu aðalstjórarnir kunna Fíggjarmálaráðið um viðurskifti, sum ikki eru í lagi. Gjaldstovan skal hava avrit av øllum góðkenningarskjølum og møguligum fylgiskjølum. Henda skipan er eisini við til at tryggja, at gjørt verður vart við møguligar feilir og munir, og at teir verða rættaðir so hvørt.

Sambært yvirliti, sum Gjaldstovan hevur dagført í juni 2008, hevur Fíggjarmálaráðið hildið reglurnar í 2007.

### 3.6.2 Mánaðarroknskapurin

Sambært § 9, stk. 2, í roknskaparkunngerðini skulu stovnsleiðararnir góðkenna roknskapirnar viðvíkjandi stovnunum mótvegis hægri myndugleika.

Í "góðkenningarskjali fyri játtanarroknskapin (EK76)" hevur Gjaldstovan ásett, at játtanarroknskapurin skal vera góðkendur í seinasta lagi 5. í øðrum mánaðinum eftir mánaðarlok.

*At játtanarroknskapurin er góðkendur merkir, at stovnsleiðarin, sambært § 9, stk. 2, í roknskaparkunngerðini og pkt. 2.1 í roknskaparrundskrivinum, váttar:*

1. *at hava dagfest og áteknað FSL-játtanarroknskapin (útskrift nr. Fgj 04-01-02),*
2. *at játtanin og møguligar eykajáttanir eru rætt skrásettar í FSL-játtanarroknskapinum,*
3. *at allar inntøkur og útreiðslur eru bókaðar,*
4. *at allar bókingar eru konteraðar rætt á standardroknskaparkontur sambært Kontuskipan landsins,*
5. *at allar inntøkur og útreiðslur eru bókaðar á rætt fíggjarár sambært § 13 í roknskaparkunngerðini,*
6. *at bókaðu lønarútreiðslurnar eru rættar og samsvara við lønarútgjaldingar í lønarskipanum,*
7. *at allar saldur á fíggjarstøðuni eru rætt tiknar við, her eisini, at allar peningastovnskontur, sum stovnurin hevur ræði á, eru skrásettar á fíggjarstøðuni og stemma við kontuavrit frá peningastovnunum,*
8. *at ogn, skuld og nýtsla eru gjørd rætt upp,*
9. *at nýtslan er hóskandi í mun til virksemið farna tíðarskeiði,*
10. *at neyðug tiltøk eru sett í verk, eru fyritreytirnar fyri játtanunum og lønarkarmi broyttar, so tær t.d. ikki fara at halda,*
11. *at samsvar er millum Búskaparskipan landsins og egnar búskaparskipanir,*
12. *at alt er stemmað av, so sum ásett er í roknskaparreglugerðini hjá stovninum,*
13. *at ásettu mannagongdirnar í roknskaparreglugerðini eru hildnar, at roknskaparreglugerðin, yvirlit yvir ábyrgdarøki og undirskriftarblað eru dagførd, og at eingin brúkari er skrásettur við rættindum í Búskaparskipan landsins, sum ikki skal hava heimild til tess,*
14. *at allar ásetingar frá aðalstýrinum um játtanar- og roknskaparviðurskifti eru hildnar,*
15. *at allar almennar ognir, sum ásett í roknskaparreglugerðini, eru skrásettar í roknskapi landsins (sí eisini roknskaparvegleiðing 2004-8.0-A).*

*Harafturat skal verða kannað, at allar áognir, frammanundan goldnar og skyldugar upphæddir, veittar trygdir o.a. eru skrásettar í roknskapinum, so hann gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum og somuleiðis av ogn og skuld við fíggjarárslok.*

Vit spurdu, hvørjir stovnar, sum landsstýrismaðurin varðaði av í 2007, luku ásetingarnar um at góðkenna mánaðarroknskapirnar mótvegis hægri myndugleika, og hvussu landsstýrismaðurin/aðalráðið hevur eftirlit við, at stovnarnir lúka ásetingarnar í kunngerðini.

Í august 2008 svaraði Fíggjarmálaráðið, at stovnsnumrini, landsstýrismaðurin í fíggjarmálum varðar av, eru býtt á 10 stovnsleiðarar, har 3 hoyra heima á øðrum greinum. Nakrir stovnsleiðarar lata stórt sæð inn til tíðina. Teir flestu lata inn regluliga, men í seinna lagi, eftir at rykt hevur verið. Onkur hevur als ikki latið inn góðkenningarskjal. Onkustaðni hevur útskifting av starvsfólki gjørt, at góðkenningarskjølini hava verið latin inn í seinna lagi ella eru dottin niður ímillum.

Í Fíggjarmálaráðnum er tað bókhaldarin, sum hevur eftirlit við stovnsleiðarunum og hevur samskifti við Gjaldstovuna viðvíkjandi góðkenningarskjølunum. Tað er ikki nøktandi, at mánaðarroknskapirnir ikki verða góðkendir og latnir inn sambært ásettu tíðarfreistunum, og fer Fíggjarmálaráðið tískil at stramma upp í hesum viðurskiftum. Í hesum sambandi eigur at verða nevnt, at Gjaldstovan arbeiðir við einari talgildari verkgongdarloysn til at góðkenna mánaðarroknskapirnar. Verkgongdarloysnin kemur væntandi at virka frá árskiftinum (2008/09).

### 3.6.3 Ársroknskapurin

Seinasti mánaðarroknskapurin er at rokna sum ársroknskapur, og stovnsleiðarin skal góðkenna ársroknskapin á serstøkum góðkenningaroyðublað. Eru viðurskifti, sum ikki eru í lagi, skal vera kunnað um tey á góðkenningarskjalinum.

Gjaldstovan skal hava avrit av øllum góðkenningaroyðubløðum og møguligum fylgiskjølum, og hon skrásetir tey, so hvørt stovnarnir hava sent oyðubløðini inn. Sambært yvirliti hjá Gjaldstovuni í juni 2008 hevur Gjaldstovan fingið góðkenningaroyðubløð fyri alt árið fyri nøkur stovnsnummar undir landsstýrismanninum í fíggjarmálum. Nøkur hava latið inn fyri tíðarskeið 12, meðan summi als ikki hava latið góðkenningaroyðubløð inn:

| Grein | Stovnur/konta | Stovnsnr. | Tíðarsk.*) | Viðmerk. |
|---|---|---|---|---|
| 03 | Hagstova Føroya | 103420 | 14 | |
| 03 | Hagstova Føroya, verkætlanir | 134590 | 14 | |
| 03 | Tænastumannaeftirlønir | 101801 | 15 | |
| 03 | Eftirlønir | 101901 | 15 | |
| 03 | Danskar eftirlønir | 102001 | 15 | |
| 03 | Eftirløn landsstýrismanna | 102101 | 15 | |
| 03 | Lønarforskot | 129401 | 15 | |
| 03 | Sáttmálaviðurskifti, FMS | 137902 | 15 | |
| 03 | Toll- og skattstova Føroya | 102920 | 12 | |
| 03 | Fas-endurgjald | 126901 | 12 | |
| 03 | Stuðul til rentuútreiðslur | 129501 | 12 | |
| 03 | Stuðul til flutning og dupult húsarhald | 129601 | 12 | |
| 03 | Felagsfyrisiting hjá Fíggjarmálaráðnum, T&S | 131968 | 12 | |
| 03 | Bygningur til almennar stovnar í Klaksvík | 136050 | 12 | |

*) "Tíðarskeið 12" er desember mánaður. Tá ið talan er um grundarlag undir ársroknskapinum, má í minsta lagi tíðarskeið 14 vera góðkent.

| | | | |
|---|---|---|---|
| 03 | Útgjald úr Trygdargrunninum | 142533 | 12 |
| 03 | EDV-skipanir hjá Toll- og skattstovu Føroya | 144143 | 12 |
| 03 | Stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði | 152080 | 12 |
| 03 | Búskaparráðið | 103220 | |
| 03 | Landskassin | 009999 | árið 2007 |
| 03 | Føroya gjaldstova | 103020 | árið 2007 |
| 03 | Flyting av búskaparstovnum landsins | 130010 | árið 2007 |
| 03 | Net hjá Fíggjarmálaráðnum | 133040 | árið 2007 |
| 03 | Búskaparskipan landsins | 134045 | árið 2007 |
| 03 | Mál- og avriksstýring | 144080 | árið 2007 |
| 03 | Føroya Gjaldstova, inntøkufíggjað virksemi | 145060 | árið 2007 |
| 03 | Fíggjarmálastýrið (Fíggjar- og búskapardeildin) | 102520 | 12 |
| 03 | Viðlíkahald, Fíggjar- og búskapardeildin | 102620 | 12 |
| 03 | Oljugoymslur o.a. (landsins ognir) | 102720 | 12 |
| 03 | Húsaleiga og íbúðargjald, (landsins ognir) | 102721 | 12 |
| 03 | Leiga av økjum, uppsitaragjald o.a., (landsins ognir) | 102722 | 12 |
| 03 | Endurgjald av skatti og avgjøldum | 126733 | 12 |
| 03 | Umsiting av gjaldførislánum, Føroya Realkreditstovnur | 137001 | 12 |
| 03 | Søla av partabrøvum í P/f Elektron | 147013 | 12 |
| 03 | FAS-endurgjald, føroyingar | 149820 | |
| 03 | FAS-endurgjald, útlendingar | 149830 | |
| 03 | Umsiting av ogn og skuld landsins, Landsbanki Føroya | 158451 | 12 |
| 20 | Vanligur landsskattur | 126701 | 12 |
| 20 | Gamal skattur fyri 1984 | 126702 | 12 |
| 20 | Skattainntøka frá útlendingum í FAS-skipanini | 126703 | 12 |
| 20 | Felagsskattur | 127001 | 12 |
| 20 | Kolvetnisskattur, feløg | 127017 | 12 |
| 20 | Vinningsbýtisskattur | 127101 | 12 |
| 20 | Avgjald av kapitaleftirlønum | 127201 | 12 |
| 20 | Rentuskattur | 127401 | 12 |
| 20 | Meirvirðisgjald | 127701 | 12 |
| 20 | Tollavgjøld | 127801 | 12 |
| 20 | Punktgjøld | 127901 | 12 |
| 20 | Lønhæddargjald | 128001 | 12 |
| 20 | Brennioljugjald | 128101 | 12 |
| 20 | Framleiðslugjald | 128201 | 12 |
| 20 | Ferðaavgjald | 128501 | 12 |
| 20 | Umhvørvisgjald | 128601 | 12 |
| 20 | Burturlutingargjøld | 128807 | 12 |
| 20 | Kolvetnisskattur, persónar | 137360 | |
| 20 | Gjald til barsilsskipan | 138595 | 12 |
| 20 | Kirkjuskattur | 140352 | 12 |
| 20 | Flutt til kommunur(kommunuskattur), vanligur landsskattur | 143090 | 12 |
| 20 | Kapitalvinningsskattur | 145391 | 12 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 20 | Flutt til kirkjur (kirkjuskattur) | 146313 | 12 | |
| 20 | Flutt til kommunur (kommunuskattur), felagsskattur | 148513 | 12 | |
| 20 | Skrásetingargjald | 128301 | 14 | |
| 20 | Vektgjald | 128401 | 14 | |
| 20 | Inntøkur, burturbeiningargjøld | 147883 | 14 | |
| 20 | Rentur av innistandandi | 126301 | árið 2007 | |
| 20 | Aðrar rentur | 126401 | árið 2007 | |
| 20 | Arvagjøld | 127601 | árið 2007 | |
| 20 | Endurrindan av keyps-mvg | 127689 | árið 2007 | Meirnýtsla 36,8 mió.kr. í vørum og tænastum |
| 20 | Bøtur | 128805 | árið 2007 | |
| 20 | Ymiskt | 128860 | árið 2007 | |
| 20 | Gjald fyri burturbeining av bilum | 147991 | árið 2007 | |
| 20 | Útgoldið yvirskot frá Landsbanka Føroya | 126501 | 12 | |
| 20 | Yvirskot frá Danmarks Nationalbank | 126601 | 12 | |
| 20 | Útluting frá Fíggingargrunninum frá 1992 | 128701 | 12 | |
| 20 | Útluting frá almennum partafeløgum | 128738 | 12 | |
| 20 | Skeinkiloyvi | 128802 | 12 | |
| 20 | Lóggilding av el-innleggjarum | 128809 | 12 | |
| 20 | Heildarveiting | 129001 | 12 | |
| 20 | Ríkisstuðul, endurgjøld | 129002 | 12 | |
| 20 | Afturgjald vegna skuldarumskipan | 131785 | 12 | |
| 20 | Gjald til Búnaðarstovuna | 144041 | 12 | |
| 20 | Samsýning til Landsbankan | 151030 | 12 | |
| 20 | Rentur at gjalda | 126201 | 12 | |
| 25 | Ymsar broytingar, ogn | 129010 | árið 2007 | |
| 25 | Ymsar broytingar, útjavningarkonta og skuld | 129020 | árið 2007 | |
| 25 | Afturgjald av lánum | 129101 | árið 2007 | |
| 25 | Útvegan av gjaldføri | 129201 | árið 2007 | |
| 53 | P/f Føroya Banki, søla av partabrøvum | 151060 | | |
| 20 | Vanligur landsskattur | 126701 | 12 | |
| 20 | Gamal skattur fyri 1984 | 126702 | 12 | |
| 20 | Skattainntøka frá útlendingum í FAS-skipanini | 126703 | 12 | |
| 20 | Felagsskattur | 127001 | 12 | |
| 20 | Kolvetnisskattur, feløg | 127017 | 12 | |
| 20 | Vinningsbýtisskattur | 127101 | 12 | |
| 20 | Avgjald av kapitaleftirlønum | 127201 | 12 | |
| 20 | Rentuskattur | 127401 | 12 | |
| 20 | Meirvirðisgjald | 127701 | 12 | |
| 20 | Tollavgjøld | 127801 | 12 | |
| 20 | Punktgjøld | 127901 | 12 | |
| 20 | Lønhæddargjald | 128001 | 12 | |
| 20 | Brennioljugjald | 128101 | 12 | |
| 20 | Framleiðslugjald | 128201 | 12 | |
| 20 | Ferðaavgjald | 128501 | 12 | |
| 20 | Umhvørvisgjald | 128601 | 12 | |
| 20 | Burturlutingargjøld | 128807 | 14 | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 20 | Kolvetnisskattur, persónar | 137360 | 14 |
| 20 | Gjald til barsilsskipan | 138595 | 14 |
| 20 | Kirkjuskattur | 140352 | 12 |
| 20 | Flutt til kommunur (kommunuskattur), vanligur landsskattur | 143090 | 12 |
| 20 | Kapitalvinningsskattur | 145391 | 12 |
| 20 | Flutt til kirkjur (kirkjuskattur) | 146313 | 12 |
| 20 | Flutt til kommunur (kommunuskattur), felagsskattur | 148513 | 12 |

Viðmerkingar frá landsstýrismanninum

Í august 2008 hevur Fíggjarmálaráðið boðað frá, at tað er ikki nøktandi, at ikki røttu-/síðstu mánaðarroknskapirnir liggja til grund fyri at góðkenna ársroknskapin, og at góðkenningin sum oftast ikki verður framd sambært ásettu tíðarfreistunum. Sum frammanfyri nevnt fer Fíggjarmálaráðið at stramma upp í hesum viðurskiftum. Gjaldstovan arbeiðir við einari talgildari verkgongdarloysn at góðkenna ársroknskapin, sum væntandi kemur at virka frá ársskiftinum (2008/09).

# 4 FISKIVINNA

## 4.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Neyðrættur, tilbúgving (rakstrarjáttan) | - | 1.144 | 1.144 |
| Tilbúgvingarætlan (rakstrarjáttan) | 9.000 | 9.377 | 377 |
| Fiskivinnuráð og nevndir (rakstrarjáttan) | 450 | 609 | 159 |
| Limagjald í altjóða felagsskapum | 1.200 | 1.394 | 194 |
| Fiskiveiðieftirlitið (rakstrarjáttan) | 39.989 | 43.556 | 3.567 |
| Magnus Heinason (rakstrarjáttan) | 9.527 | 10.304 | 777 |
| Fiskivinnumenning á landi | 1.000 | 1.169 | 169 |
| Flutningsstuðul (lógarbundin játtan) | 2.000 | 3.367 | 1.367 |
| Útlán | -2.600 | -2.530 | 70 |
| Effektivar veðhaldsútreiðslur | -1.000 | -119 | 881 |

### 4.1.1 **Neyðrættur, tilbúgving** (rakstrarjáttan) 5.11.1.53.

Á fíggjarlógini er eingin játtan. Sambært landsroknskapinum eru útreiðslurnar 1.144 t.kr., sum eru útreiðslur av bjargingararbeiðinum í sambandi við tilburðin, tá russiski trolarin “Olshana” rendi á Flesjarnar og sakk.

### 4.1.2 **Tilbúgvingarætlan** (løgujáttan) 5.31.1.04.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 9.000 t.kr. Meirnýtslan er 377 t.kr. Sambært landsstýrismanninum eru mvg-útreiðslur, 1.281 t.kr., av misgáum bókaðar sum útreiðsla. Í veruleikanum er talan um eina minninýtslu, um 900 t.kr.

### 4.1.3 **Fiskivinnuráð og nevndir** (rakstrarjáttan) 5.34.1.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 450 t.kr. Meirnýtslan er 159 t.kr. Sambært landsstýrismanninum hevur advokatur sent rokning fyri arbeiðið at endurskoða lógina um vinnuligan fiskiskap. Rokningin fevnir um tíðarskeiðið 2003-2007.

### 4.1.4 **Limagjald í altjóða felagsskapum** 5.34.1.07.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 1.200 t.kr. Meirnýtslan er 194 t.kr.

Talan er um limagjald Føroya í altjóða felagsskapunum:

- ICES - International Council for the Exploration of the Sea
- NEAFC - North East Atlantic Fisheries Commission
- NAFO - Northwest Atlantic Fisheries Organization
- NAMMCO - North Atlantic Marine Mammal Commission
- NASCO - North Atlantic Salmon Conservation Organization

Sambært landsstýrismanninum eru limagjøldini hækkað.

### 4.1.5 **Fiskiveiðieftirlitið** (rakstrarjáttan) 5.34.2.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 39.989 t.kr. Meirnýtslan er 3.567 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---:|---:|---:|
| 20. Vanligt virksemi | 38.399 | 42.240 | 3.841 |
| 21. Veðurtænasta | 430 | 453 | 23 |
| 24. Eygleiðaraskipan | 1.160 | 863 | -297 |
| **Tilsamans** | **39.989** | **43.556** | **3.567** |

Á talvuni sæst, at á undirkontu 20. “Vanligt virksemi” er ein meirnýtsla 3.841 t.kr

Sambært landsstýrismanninum er tað høgi oljuprísurin, sum ger meirnýtsluna. Tjaldrið varð lagt við bryggju 26. oktober 2007, og lá restina av árinum. Hóast tað, helt játtanin ikki. Millum annað var neyðugt at bunkra seinast í árinum, so skipið ikki lá oljubrent, um neyðstøða skuldi komið í.

Harafturat vóru krøv, 2.900 t.kr., viðvíkjandi avreiðingum uttanlands avskrivað í 2007.

### 4.1.6 Magnus Heinason (rakstrarjáttan) 5.34.3.04.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 9.527 t.kr. Meirnýtslan er 777 t.kr. Sambært landsstýrismanninum kom eldur í Magnus Heinason seinasta heyst, meðan skipið lá á Havnini og skifti trolspøl. Magnus Heinason kom ikki í sigling aftur fyrr enn 1. mars 2008. Tað hevði við sær vantandi inntøkur fyri 3. ársfjórðing 2007.

Sambært landsstýrismanninum varð roynt at avmarka útreiðslurnar mest møguligt, men tá ið manningin er í føstum starvi, ber ikki til at spara lønarútreiðslur, hóast skipið liggur. Umhugsað varð at biðja um eykajáttan fyri at minka um meirnýtsluna, men munnliga fekst at vita úr Fíggjarmálaráðnum, at ikki var neyðugt at søkja um eykajáttan, tá ið talan varð um vantandi inntøkur.

### 4.1.7 Fiskivinnumenning á landi 5.34.4.16.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 1.000 t.kr. Meirnýtslan er 169 t.kr.

Játtanin verður nýtt sambært løgtingslóg nr. 84 frá 28. mai 1996 “um stuðul til menning av fiskivinnu á landi”. Stuðul kann verða veittur fiskavirkjum til at:

- virka vørur úr innfluttum fiski
- vørumenna o.a.
- stuðla menning av innaneftirliti

Eisini verður játtanin nýtt til at gjalda fyri heilsuprógv hjá starvsfólkum á fiskavirkjum og verksmiðjuskipum.

t.kr.

| 5.34.4.16. Fiskivinnumenning á landi | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---:|---:|---:|
| 14. Keyp av vørum og tænastum (heilsuprógv) | - | 76 | 76 |
| 53. Stuðul til vinnu | 1.000 | 1.093 | 93 |
| **Tilsamans** | **1.000** | **1.169** | **169** |

Sambært landsstýrismanninum var av misgáum ikki tikið hædd fyri, at játtanin eisini verður brúkt til at gjalda fyri heilsuprógv hjá starvsfólkum á fiskavirkjum og verksmiðjuskipum, tá tilsagnir um stuðul til menning av fiskivinnu á landi vórðu givnar. Harafturat eru 92 t.kr. í stuðli til eina verkætlan í 2006 av misgáum bókaðar í 2007.

### 4.1.8 **Flutningsstuðul** (lógarbundin játtan) 5.34.4.22.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 2.000 t.kr. Meirnýtslan er 1.367 t.kr. Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at hækka játtanina 2 mió.kr. Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið "*fer játtanin við verandi gongd at vera brúkt umleið 1. oktober 2007.*" Lógaruppskotið fall burtur, tí at løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

### 4.1.9 **Útlán** 5.34.5.01.

t.kr.

| 5.34.5.01. Lán, effektiv veðhald o.t. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---:|---:|---:|
| 01. Útlán, inntøkur | -9.100 | -20.592 | 11.492 |
| 01. Útlán, útreiðslur | 6.500 | 18.062 | -11.562 |
| **Tilsamans** | **-2.600** | **-2.530** | **-70** |

Á fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 9.100 t.kr. og ein útreiðslujáttan 6.500 t.kr. Sambært Búskaparskipan Landsins eru inntøkurnar 20.592 t.kr. og útreiðslurnar 18.062 t.kr. Sostatt er talan um sera stór frávik.

Landsstýrismaðurin hevur áður greitt frá, at Fiskimálaráðið í 2008 fór at miða eftir, at betri samsvar skuldi vera millum játtan og nýtslu.

Á fíggjarlógini 2008 eru játtanartølini ikki broytt.

### 4.1.10 **Effektivar veðhaldsútreiðslur** 5.34.5.07.

t.kr.

| 5.34.5.07. Lán, effektiv veðhald o.t. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---:|---:|---:|
| 01. Inntøkur | -1.000 | -6.113 | 5.113 |
| 01. Útreiðslur | - | 5.994 | -5.994 |
| **Tilsamans** | **-1.000** | **-119** | **-881** |

Á fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 1.000 t.kr. Sambært Búskaparskipan Landsins eru inntøkurnar 6.113 t.kr. og útreiðslurnar 5.994 t.kr.

Landsstýrismaðurin hevur áður greitt frá, at Fiskimálaráðið í 2008 fór at miða eftir, at betri samsvar skuldi vera millum játtan og nýtslu.

Á fíggjarlógini 2008 eru játtanartølini ikki broytt.

## 4.2 Minninýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---:|---:|---:|
| Fiskimálaráðið (rakstrarjáttan) | 14.018 | 12.152 | 1.866 |
| Tilbúgvingarsamskipan (rakstrarjáttan) | 18.030 | 17.022 | 1.008 |
| Lønjavningarstovan (rakstrarjáttan) | 2.792 | 2.541 | 251 |
| Fiskirannsóknarstovan (rakstrarjáttan) | 11.763 | 11.184 | 579 |
| Inntøkutrygd hjá fiskimonnum (lógarbundin játtan) | 25.000 | 16.246 | 8.754 |
| Sjúkratrygd (lógarbundin játtan) | 8.000 | 6.268 | 1.732 |
| Trygdarmiðstøðin (løgujáttan) | 2.000 | -400 | 2.400 |

### 4.2.1 **Fiskimálaráðið** (rakstrarjáttan) 5.11.1.05.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 14.018 t.kr. Minninýtslan er 1.866 t.kr. Sambært landsstýrismanninum vóru í 2007 fleiri ósett størv í Fiski- og tilfeingismálaráðnum. Heldur ikki varð øll játtanin til KT-verkætlanir brúkt.

### 4.2.2 **Tilbúgvingarsamskipan** (rakstrarjáttan) 5.31.1.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 18.030 t.kr. Minninýtslan er 1.008 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 3.476 | 4.050 | 574 |
| 21. Brunaumsjón Landsins | 2.007 | 1.639 | -368 |
| 22. Neyð- og trygdartænasta (Tórshavn Radio) | 4.894 | 4.268 | -626 |
| 23. Sjóbjargingarstøðin (MRCC) | 5.153 | 4.575 | -578 |
| 24. Stuðul til bjargingarfeløg | 2.500 | 2.490 | -10 |
| **Tilsamans** | **18.030** | **17.022** | **-1.008** |

Sambært landsstýrismanninum varð hildið aftur við útreiðslunum, tá ið óhappið við Olshanu hendi, tí óvist var, um útreiðslurnar skuldu haldast innan fyri verandi karmar; m.a. var bíðað við at seta fólk í starv á Brunaumsjón Landsins.

### 4.2.3 **Lønjavningarstovan** (rakstrarjáttan) 5.34.1.10.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 2.792 t.kr. Minninýtslan er 251 t.kr. Sambært landsstýrismanninum hava ikki øll normerað størv verið sett í 2007, og harumframt er av ávísum orsøkum stórtsæð onki brúkt av játtanini til KT.

### 4.2.4 **Fiskirannsóknarstovan** (rakstrarjáttan) 5.34.3.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 11.763 t.kr. Minninýtslan er 579 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 9.952 | 9.973 | 21 |
| 22. Ferðing og atburður hjá toski | 663 | 663 | - |
| 23. Fuglakanningarstøð | 548 | 548 | - |
| 24. Varðveitan av fjølbroyttum flota | 600 | - | -600 |
| **Tilsamans** | **11.763** | **11.184** | **-579** |

Á talvuni sæst, at á undirkontu 24. “Varðveitan av fjølbroyttum flota” er eingin peningur brúktur, og minninýtslan er 600 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er trupult, soleiðis sum Ll. nr. 72/1996 “Um varðveiting av fjølbroyttum fiskiflota” er orðað, at finna hóskandi verkætlanir.

### 4.2.5 **Inntøkutrygd hjá fiskimonnum** (lógarbundin játtan**)** 5.34.4.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 25.000 t.kr. Minninýtslan er 8.754 t.kr.

Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at lækka játtanina 2 mió.kr. Lógaruppskotið fall burtur, tí at løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Niðanfyri hevur Landsgrannskoðanin sett upp roknskapartølini fyri árini 2001-2007:

t.kr.

| | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Minstaløn | 1.200 | 2.993 | 1.205 | 5.471 | 3.627 | 2.703 | 1.093 |
| Dagstudningur | 8.353 | 9.760 | 11.377 | 17.908 | 12.584 | 8.476 | 5.493 |
| Minstivinningur | 10.277 | 8.200 | 11.027 | 11.264 | 8.522 | 6.785 | 8.375 |
| Frítíðarløn | 1.146 | 1.528 | 1.510 | 2.805 | 1.936 | 1.345 | 790 |
| Almenn starvsfólkagjøld | 380 | 386 | 298 | 528 | 496 | 539 | 488 |
| **Tilsamans** | **21.356** | **22.867** | **25.417** | **37.976** | **27.165** | **19.848** | **16.239** |

Í september 2007 boðaði landsstýrismaðurin frá, at frá 2008 fer Fiskimálaráðið at gera eina roynd at útgreina fíggjarætlanina neyvari og eftirmeta útreiðslurnar javnan.

Í viðmerkingunum til fíggjarlógina 2008 eru ongi útgreinað ætlanartøl.

Sambært landsstýrismanninum er torført at meta um nýtsluna. Torført er at meta um lønirnar hjá fiskimonnum frammanundan, tí tær eru tengdar at ymiskum viðurskiftum, so sum veðri, oljuprísum, fiskaprísum og fiskiskapi.

Fiski- og tilfeingismálaráðið hevur arbeitt við at gera neyvari útgreiningar av inntøku-trygdini til fíggjarlógina, men er komið til ta niðurstøðu, at tað ikki gevur eina betri stýring at greina út inntøkutrygdina. Fiski- og tilfeingismálaráðið vil tískil ikki brúka meira orku til hetta arbeiðið.

### 4.2.6 **Sjúkratrygd** (lógarbundin játtan**)** 5.34.4.04.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 8.000 t.kr. Minninýtslan er 1.732 t.kr.

### 4.2.7 **Trygdarmiðstøðin** (løgujáttan) 5.35.1.10.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 2.000 t.kr. Minninýtslan er 2.400 t.kr. Eingin peningur eru nýttur í 2007. Sambært landsroknskapinum er ein inntøka 400 t.kr. frá Klaksvíkar kommunu. Sambært landsstýrismanninum er talan um pening, sum av misgáum var útreiðsluførdur í 2006. Hann var inntøkuførdur aftur í 2007.

## 4.3 Góðkenningarmannagongdir

Reglurnar um góðkenningarmannagongdir eru gjøllari viðgjørdar undir Fíggjarmálum.

### 4.3.1 Greinaroknskapurin

Sambært yvirliti, sum Gjaldstovan hevur dagført í juni 2008, hevur Fiskimálaráðið hildið reglurnar fyri 2007.

### 4.3.2 Mánaðarroknskapurin

Sambært § 9, stk. 2, í roknskaparkunngerðini skulu stovnsleiðararnir góðkenna roknskapirnar viðvíkjandi stovnunum mótvegis hægri myndugleika.

Vit spurdu, hvørjir stovnar, sum landsstýrismaðurin varðaði av í 2007, luku ásetingarnar um at góðkenna mánaðarroknskapirnar mótvegis hægri myndugleika, og

hvussu landsstýrismaðurin/aðalráðið hevur eftirlit við, at stovnarnir lúka ásetingarnar í kunngerðini.

Í august 2008 hevur Fiskimálaráðið kunnað um, at stovnarnir undir Fiski- og tilfeingismálaráðnum hvønn mánað vátta játtanarroknskapin yvirfyri landsstýrismanninum. Tað kann tó koma fyri at stovnsleiðarar av ávísum orsøkum ikki vátta roknskapin einstakar mánaðar í árinum. Sum heild heldur Fiskimálaráðið, at ásetingarnar í roknskaparkunngerðini verða fylgdar á nøktandi hátt.

### 4.3.3 Ársroknskapurin

Seinasti mánaðarroknskapurin er at rokna sum ársroknskapur, og stovnsleiðarin skal góðkenna ársroknskapin á serstøkum góðkenningaroyðublað.

Sambært yvirliti hjá Gjaldstovuni í juni 2008 hevur Gjaldstovan bert fingið góðkenningaroyðubløð fyri nøkur stovnsnummar undir landsstýrismanninum í fiskivinnumálum. Á yvirlitinum niðanfyri sæst, at bert 12 stovnar hava latið inn góðkenningaroyðubløð fyri tíðarskeið 13. Hinir stovnarnir hava ikki latið nakað góðkenningarblað inn:

| Grein | Stovnur/konta | Stovnsnr. | Tíðarsk.*) | Viðm. |
|---|---|---|---|---|
| 05 | Fiskivinnuroyndir | 110520 | 13 | |
| 05 | Fiskivinnumenning á landi | 111101 | 13 | |
| 05 | Fiskimálastýrið, Granskingarætlanir | 136677 | 13 | |
| 05 | Umsiting av inntøkutrygd (Lønj.grunnur) | 110020 | | |
| 05 | Inntøkutrygd hjá fiskimonnum | 110601 | | |
| 05 | Sjúkratrygd | 110701 | | |
| 05 | Flutningsstuðul | 111301 | | |
| 05 | Telefonstuðul til langfarafiskimenn | 129701 | | |
| 05 | Gjald til rækjuflotan | 132515 | | |
| 05 | Sjóvinnufyrisitingin (Skipaskrásetingin) | 107120 | | |
| 05 | Trygdarmiðstøðin (rakstrarjáttan) | 107121 | | |
| 05 | Trygdarmiðstøðin (løgujáttan) | 107310 | | |
| 05 | Fiskimálaráðið, (Fiskimálastýrið), ( Fiskivinnudeildin ) | 109520 | | |
| 05 | Fiskivinna, viðlíkahald | 109620 | | |
| 05 | Fiskivinnuráð | 109720 | | |
| 05 | Upplýsing um grind | 109820 | | |
| 05 | Stuðulslán, lóg nr. 35 frá 1. juni 1978 | 111401 | | |
| 05 | Effektivar veðhaldsútreiðslur, fiskivinna | 111501 | | |
| 05 | Studningslán (umskiping), lóg nr. 34 og 140 frá 1993 | 120617 | | |
| 05 | Ymisk lán, vinnumál | 121023 | | |
| 05 | Studningslán, lóg nr. 48 frá 30. mai 1964 | 121159 | | |
| 05 | Studningslán til útróðrarst., lóg nr. 42 frá 6. mai 1976 | 121760 | | |
| 05 | Serlán, lóg nr. 8 frá 16. jan. 1980 | 123357 | | |
| 05 | Hjálpargrunnur fyri óarbeiðsførar fiskimenn, stuðul til feløg hjá brekaðum, | 123705 | | |
| 05 | Kurslán, lóg nr. 24 frá 1. juni 1978 | 125102 | | |
| 05 | Serlán, lóg nr. 41 frá 20. mai 1988 | 129266 | | |

*) "Tíðarskeið 12" er desember mánaður. Tá ið talan er um grundarlag undir ársroknskapinum, má í minsta lagi tíðarskeið 14 vera góðkent.

| | | | |
|---|---|---|---|
| 05 | Fiskiveiðieftirlit, (V&B, tyrlutænastan) | 136469 | |
| 05 | Nýtt vaktarskip | 138711 | |
| 05 | Studningslán, lóg nr. 26 frá 14. mars 1997 | 139230 | |
| 05 | Fiskimálaráðið, EDV-verkætlanir | 142011 | |
| 05 | Søla av bygningi hjá Fiskimálaráðnum | 143312 | |
| 05 | Likviditetslán, lóg nr. 35 frá 1984 | 121599 | |
| 05 | Stuðul til Bjargingarfeløg (Bjargingarfeløg) | 107201 | 13 |
| 05 | Brunaumsjón Landsins | 107421 | 13 |
| 05 | Tilbúgvingarsamskipanin (Tilbúgving) | 107422 | 13 |
| 05 | Fiskiveiðieftirlitið, Vaktar- og bjargingartænastan | 110120 | 13 |
| 05 | Fiskiveiðieftirlitið, Vaktar- og bjargingartænastan, DMI | 110121 | 13 |
| 05 | Tilbúgvingarætlan | 130912 | 13 |
| 05 | Neyð- og Trygdartænasta (Tórshavn Radio) | 131486 | 13 |
| 05 | Sjóbjargingarstøðin (MRCC) (Fiskiveiðieftirlitið, (V&B),MRCC) | 133117 | 13 |
| 05 | Neyðrættur, tilbúgving | 144055 | |
| 05 | Fiskiveiðieftirlitið, eygleiðaraskipan | 146818 | 13 |
| 05 | Hvalagransking, hvalateljing o.a. | 132005 | |
| 05 | Skipaeftirlitið | 132829 | |
| 05 | Heilsukanningar av sjófólki | 148557 | |
| 05 | Limagjald í altjóða felagsskapum | 109901 | |
| 05 | Fiskirannsóknarstovan | 110320 | |
| 05 | Ferðing og atburður hjá toski, Fiskirannsóknarstovan | 110322 | |
| 05 | Fuglakanningarstøð, Fiskirannsóknarstovan | 110323 | |
| 05 | Magnus Heinason | 110420 | |
| 05 | Varðveitan av fjølbroyttum flota | 111001 | |
| 05 | Fiskirannsóknarstovan, inntøkufíggjað virksemi | 137615 | |
| 05 | Fiskirannsóknarstovan, verkætlanir | 141252 | |
| 05 | Útgerð til Magnus Heinason | 149840 | |
| 05 | FAS, Skipaeftirlitið | 149850 | |

<u>Viðmerkingar frá landsstýrismanninum</u>

Í august 2008 hevur Fiskimálaráðið kunnað um:

*at* 29 stovnar/stovnsnummar hava váttað tíðarskeið 13,

*at* 16 stovnar/stovnsnummar hava váttað tíðarskeið 14,

*at* 5 stovnar/stovnsnummar hava váttað tíðarskeið 15.

Sambært Fiskimálaráðnum kann tað koma fyri, at stovnsleiðarar av ávísum orsøkum ikki vátta roknskapin einstakar mánaðar í árinum, t.d. um eingin munur er á fyrsta og næsta ískoytisskeiðið.

# 5 VINNUMÁL

## 5.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Søla av landsins ognum (løgujáttan) | -10.000 | - | 10.000 |
| Endurgjald til skipasmíð | 10.000 | 10.830 | 830 |
| Lánsafturgjald | 2.500 | 1.663 | 837 |
| Partabrøv, ymisk viðurskifti | -4.600 | - | 4.600 |
| KT-fyrisiting (rakstrarjáttan) | 5.000 | 6.653 | 1.653 |
| P/f Føroya Lívstrygging, søla av partabrøvum | -43.300 | - | 43.300 |

### 5.1.1 **Søla av landsins ognum** (løgujáttan) 6.11.1.47.

Á fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 10 mió.kr. Eingin inntøka er skrásett í landsrokn-skapinum.

Talan er um ætlaða søluprísin fyri oljutangarnar, sum landið eigur í Sørvági og í Søldarfirði, og sum á fíggjarlógini 2006 og 2007 varð mettur til 10 mió.kr.

Í fíggjarlógini 2008 er eisini ein inntøkujáttan 10 mió.kr. Sambært viðmerkingunum gjørdist fyrireikingararbeiðið at fremja søluna í 2007 ikki liðugt.

Sambært landsstýrismanninum varð málið viðgjørt á landsstýrisfundi 11. september 2007. Har fekk landsstýrismaðurin undirtøku fyri at bjóða oljutangarnar í Sørvági og Søldarfirði, við tilhoyrandi lendi, alment út til sølu. Landsverk fekk boð um at selja tangarnar, men fyrireikingararbeiðið varð ikki liðugt, soleiðis at sølan kundi verða framd í 2007. Ætlanin er at selja oljutangarnar í 2008 eftir sama leisti.

<u>Virðismeting</u>

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2007 helt Landsgrannskoðanin tað vera skilagott at gera eina dagførda virðismeting av oljutangunum eftir viðurkendum meginreglum. Ein virðismeting ger seljaran føran fyri at meta um, hvørt tilboðini frá keyparum eru nøktandi, og virðismetingin kann vera ein stuðul í seinni samráðingum við keyparar.

Víkja tilboðini nógv frá virðismetingini, kann spurningur verða settur við, um sølan er nóg væl marknaðarførd, ella um nóg nógv kapping er um søluna. Tað er eisini góður siður, at seljari setir sær ein minstaprís.

Viðhvørt kann seljari seta uppá, at t.d. ein bygningur er trupul at virðismeta, av tí at hann er so serstakur, at einki er at bera saman við o.s.fr. Tó eigur at vera havt í huga, at keypararnir ikki hava fleiri og betri upplýsingar, enn seljarin hevur. Hevur seljari ikki megnað at útvega eina virðismeting, kann tað vera tekin um, at hann ætlar at selja fyri ein ónøktandi prís, uttan at vilja ábyrgjast fyri tað; sjálvandi má eitt mark vera fyri, hvussu kostnaðarmiklar tílíkar virðismetingarnar eru.

Í oktober 2007 spurdu vit:

- um Vinnumálaráðið hevur útvegað sær eina virðismeting av oljutangunum,

- hvørjar fortreytir metingin byggir á, og
- um metingin byggir á viðurkendar meginreglur um at virðismeta tílíkar ognir.

Landsstýrismaðurin svaraði, at Vinnumálaráðið var samt við Landsgrannskoðanina í spurninginum um at virðismeta oljutangarnar. Landsstýrismaðurin vísti á, at Byggi- og bygningsumsitingin hjá Landsverki kann standa fyri virðismetingini, ella lata hana gera, um tørvur er á tí.

Í juni 2008 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Norsk Veritas áður hevur sýnað tangarnar. Teir mettu tá, at tangarnir vóru í góðum standi. Við at bjóða tangarnar út í fríari sølu, fæst veruliga handilsvirðið (søluvirðið) til vega, sum helst er besti "indikator" fyri virðisáseting. Landsverk er ein óheftur stovnur, og eftir fatan Vinnumálaráðsins, er hann væl førur fyri at meta um innkomin tilboð.

### 5.1.2 **Endurgjald til skipasmíð** (rakstrarjáttan) 6.37.2.04.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 10.000 t.kr. Meirnýtslan er 830 t.kr.

Á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 7.000 t.kr. Á eykajáttanarlógini mars 2007-5 varð játtanin hækkað 3.000 t.kr.

Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at hækka játtanina 770 t.kr. Lógaruppskotið fall burtur, tí at løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Sambært landsstýrismanninum var virksemið innan føroyskt skipasmíð væl hægri, enn mett var frammanundan.

### 5.1.3 **Lánsafturgjald** 6.37.6.01.

Á fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 2.500 t.kr. Minniinntøkan er 837 t.kr.

Vinnumálaráðið hevur áður greitt frá, at Gjaldstovan umsitur játtanina, og at talan er um lán frá grunnum, sum eru niðurlagdir.

### 5.1.4 **Partabrøv, ymisk viðurskifti** 6.37.6.11.

Á fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 4.600 t.kr. Eingin inntøka er skrásett í landsroknskapinum.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina 2007 "*hevur landsstýrismaðurin avgjørt at selja tey minnilutapartabrøv, sum landið eigur í ymiskum feløgum. Inntøkur landskassans fyri søluna er ein leyslig meting.*"

Í fíggjarlógini 2008 er ein inntøkujáttan 6,6 mió.kr. Sambært viðmerkingunum verða partabrøvini í Atlanticon, Smyril Line og Tjaldur seld í 2008.

### 5.1.5 **KT-fyrisiting** (rakstrarjáttan) 6.38.3.19.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 5.000 t.kr. Meirnýtslan er 1.653 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur tvær undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 1.750 | 3.045 | 1.295 |
| 40. Verkætlanir | 3.250 | 3.608 | 358 |
| **Tilsamans** | **5.000** | **6.653** | **1.653** |

Á talvuni sæst, at á undirkontu 20. “Vanligt virksemi” er ein meirnýtsla 1.295 t.kr. Sambært landsstýrismanninum gjørdust inntøkurnar hjá KT-fyrisitingina lægri, enn mett var frammanundan. Landsstýrismaðurin vísir á, at tað kann vera trupult at meta um fíggjarligu gongdina hjá KT-fyrisitingini hvørt árið sær, tí nakað av óvissu er um, hvussu nógvir stovnar/ráð verða limað inn í Landsnet. Eisini skal havast í huga at KT-fyrisitingin er ein rættiliga nýggjur ”stovnur”, við stórum og mangan truplum uppgávum.

### 5.1.6 Søla og avhendan av partabrøvum í P/f Føroya Lívstrygging

mió.kr.

| 56.37.1. Serinntøkur vinnumál, handil og vinna annars | Játtan | Rokn-skapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 26. P/f Føroya Lívstrygging, søla av partabrøvum | -43,3 | - | 43,3 |
| 28. P/f Føroya Lívstrygging, avhendan av partabrøvum: | | | |
| Inntøkur | -43,5 | - | 43,5 |
| Útreiðslur | 43,5 | - | -43,5 |
| Tilsamans | 0 | - | 0 |
| 30. P/f Føroya Lívstrygging, ráðgeving | 1,7 | 0,9 | -0,8 |
| **Tilsamans** | **-41,6** | **0,9** | **42,5** |

Søla av partabrøvum, undirkonta 26

Á fíggjarlógini 2007 er ein inntøkujáttan 43,3 mió.kr., meðan ongar inntøkur eru í landsroknskapinum.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina er torført at meta um, hvørjar inntøkur landið fær við at selja 50% av partapeninginum í P/f Føroya Lívstrygging, men sett verður ein upphædd 43,3 mió.kr. Tá helvtin av felagnum er seld, fæst at vita hvussu stórar veruligu inntøkurnar verða.

Á fíggjarlógini **2008**, er eingin inntøkujáttan. Sambært viðmerkingunum “*verður støðan viðvíkjandi partapeningi landsins í Føroya Lívstrygging umhugsað politiskt, men verður søla av partapeninginum ikki sett á fíggjarlógina fyri 2008.*”

Avhendan av partabrøvum, undirkonta 28

Á fíggjarlógini 2007 er ein inntøkujáttan 43,5 mió.kr. og ein útreiðslujáttan 43,5 mió.kr., men sambært landsroknskapinum er einki bókað.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina er endamálið at fáa til vega fíggjarliga heimild til at lata Ognarfelagnum LÍV 50% av partapeninginum. Tað fer ikki at hava nakrar útreiðslur við sær fyri landskassan. Talan er bert um eina fíggjarlógartekniska uppsetan, sum heimilar landsstýrismanninum at avhenda partabrøvini. Útreiðslur og inntøkur javnviga. Upphæddin á eykajáttanini 43,5 mió.kr. er ásett eftir metta søluvirðinum, t.e. tað, sum landið kundi fingið, um partabrøvini í staðin vórðu seld.

Á fíggjarlógini **2008** er eingin inntøkujáttan og eingin útreiðslujáttan. Sambært viðmerkingunum "*verður støðan viðvíkjandi partabrøvum landsins í Føroya Lívstrygging umhugsað politiskt, men verður avhendanin av partapeninginum ikki sett á fíggjarlógina fyri 2008.*"

Ráðgeving, undirkonta 30

Á fíggjarlógini 2007 vóru játtaðar 1.700 t.kr. Minninýtslan er 751 t.kr. Sambært Búskaparskipan Landsins er í 2007 talan um hesar útreiðslur:

| Keyp av tænastuveitingum annars, sakkøn hjálp: | |
|---|---|
| BBA Legal, Ísland | 651.216 |
| PriceWaterhouse, Ísland | 298.218 |
| **Tilsamans** | **949.434** |

Á fíggjarlógini **2008** er eingin játtan. Sambært viðmerkingunum "*er søla av partabrøvunum ikki við á fíggjarlógini fyri 2008, og verður tí ikki avsett til ráðgeving í 2008.*"

## 5.2 Minninýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Viðlíkahald (rakstrarjáttan) | 400 | 50 | 350 |
| Jarðfeingi (rakstrarjáttan) | 30.232 | 17.890 | 12.342 |
| Kappingarráðið (rakstrarjáttan) | 1.730 | 1.492 | 238 |
| Umbygging av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni (løgujáttan) | 7.000 | 4.635 | 2.365 |
| Granskingarlund (løgujáttan) | 1.000 | 752 | 248 |
| Lán til Framtaksgrunn Føroya | - | - 25.000 | 25.000 |
| Landsverk (rakstrarjáttan) | 73.130 | 70.520 | 2.610 |
| Nýggir landsvegir (løgujáttan) | 130.100 | 124.564 | 5.536 |
| Vága floghavn (Landsfyritøka) | 1.000 | 881 | 119 |
| Postverk Føroya, umskipað til partafelag | - | - 21.500 | 21.500 |
| Barsilsskipanin (lógarbundin játtan) | 75.300 | 65.501 | 9.799 |

### 5.2.1 **Viðlíkahald** (rakstrarjáttan) 6.11.1.16.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 400 t.kr. Minninýtslan er 350 t.kr. Sambært Búskaparskipan Landsins eru bert nýttar 50 t.kr. Tær eru nýttar til at mála Maskinstøðina hjá Landsverki í Kollafirði fyri.

### 5.2.2 **Jarðfeingi** (rakstrarjáttan) 6.32.1.03.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 30.232 t.kr. Minninýtslan er 12.342 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 13.432 | 13.328 | -104 |
| 21. Landgrunsverkætlan | 16.800 | 4.562 | -12.238 |
| **Tilsamans** | **30.232** | **17.890** | **-12.342** |

Á talvuni sæst, at á undirkontu 21. "Landgrunsverkætlan" er ein minninýtsla 12.238 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum vórðu umfatandi seismiskar kanningar, sum skuldu verða gjørdar norðanfyri og sunnanfyri Føroyar, ikki framdar í 2007. Stórur eftirspurningur var eftir seismiskum tænastum, og tí var einki skip tøkt fyrr enn nakað út á árið. Tað varð hildið at vera ov vágið at fara undir kanningar um heystið, tá vandi var fyri vánaligum veðri, og at kanningarnar tí ikki blivu nøktandi.

### 5.2.3 Almenn jørð, søla (løgujáttan) 6.33.2.11.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 0 kr. netto. Á fíggjarlógini eru játtaðar 42 mió.kr. til útreiðslur og 42 mió.kr. til inntøkur. Sambært landsroknskapinum 2007 eru inntøkurnar 18 mió.kr. og útreiðslurnar 18 mió.kr.

t.kr.

| Almenn jørð, søla | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Inntøkur | -42.000 | -18.018 | -23.982 |
| Útreiðslur | 42.000 | 18.023 | 23.977 |
| **Tilsamans** | **0** | **-5** | **5** |

Til samanberingar kunnu vit nevna, at í 2006 vóru inntøkurnar 9,9 mió.kr. og útreiðslurnar 9,9 mió.kr.

Sambært løgtingslóg nr. 20 frá 17. mai 2004 um landsjørð, er heimilað at selja burtur av landsjørð til almenn endamál, t.d. til grundstykkir til húsabygging, handils-, ídnaðar-, havbúnaðar-, ítrótta- og frítíðarendamál.

Eftir § 5 í løgtingslóg nr. 21 frá 17. mai 2004 "um Búnaðargrunn" skal ágóðin av søluni verða fluttur Búnaðargrunninum og verða bókaður á kontu hjá avvarðandi festi. Talan er um eina fyri landskassan útreiðsluneutrala játtan.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina er tað sera ymiskt, hvussu nógv almenn jørð verður seld hvørt árið, men roknað varð við væl størri sølu í 2007 enn í 2006.

### 5.2.4 Kappingarráðið (rakstrarjáttan) 6.37.1.17.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 1.730 t.kr. Minninýtslan er 238 t.kr.

Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at hækka játtanina 200 t.kr. til at fyrireika og umsita Ll. nr. 35/2007 "um kapping", ið skuldi koma í gildi 1. januar 2008. Uppskotið til eykajáttanarlóg fall burtur, tí at løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

### 5.2.5 Umbygging av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni (løgujáttan) 6.37.5.05.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 7 mió.kr. Minninýtslan er 2.365 t.kr.

Á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 5 mió.kr. Á eykajáttanarlógini mars 2007-5 varð játtanin hækkað 2 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum fekst arbeiðstakari ikki til verkætlanina fyrr enn so langt var liðið út á árið, at ikki var møguligt at nýta alla játtanina.

### 5.2.6 **Granskingarlund** (løgujáttan) 6.37.5.06.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 1 mió.kr. Minninýtslan er 248 t.kr. Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina er ætlanin at byggja eina granskingarlund, sum skal vera pallur hjá almennum og privatum granskingar- og starvsstovuvirksemi innan humana- og veterinera økið o.a. Játtanin skuldi nýtast til at projektera fyri í 2007.

### 5.2.7 **Lán til Framtaksgrunn Føroya** 6.37.6.15.

Á fíggjarlógini er eingin játtan. Sambært landsroknskapinum eru inntøkur 25 mió.kr., sum eru bókaðar sum "Afturgjaldan av útlánum v.m.".

Sambært landsstýrismanninum broyttu landsstýrismaðurin og Framtaksgrunnur Føroya lánsavtaluna 15. februar 2007, soleiðis at ein partur av restskuld grunsins, 93 mió.kr., skuldi gjaldast niður við 25 mió kr. í 2007, og at restlánið er rentu- og avdráttarfrítt í 7 ár.

### 5.2.8 **Landsverk** (rakstrarjáttan) 6.38.1.02.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 73,1 mió.kr. Minninýtslan er 2,6 mió.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Landsverksskrivstovan | 6.420 | 7.623 | 1.203 |
| 22. Byggiumsiting landsins | 1.980 | 998 | -982 |
| 30. Landsvegahald | 57.600 | 57.097 | -503 |
| 35. Havnir | 5.650 | 6.019 | 369 |
| 38. Flogferðsla | 1.480 | 1.061 | -419 |
| 40. Inntøkufíggjað virksemi, hald av landsvegum | 0 | -2.278 | -2.278 |
| **Tilsamans** | **73.130** | **70.520** | **-2.610** |

Undirkontur 20. Landsverksskrivstovan og 22. Byggiumsiting landsins

Samanlagt er at kalla samsvar millum játtan og nýtslu á undirkontunum. Sambært landsstýrismanninum varð 1 mió.kr. ov nógv flutt frá undirkontu 20. "Landsverksskrivstovan" til undirkontu 22. "Byggiumsiting landsins", sum eftir ætlan bert skuldi hava eina játtan til 2 starvsfólk. Hetta mistak gjørdi, at høvuðsskrivstovan fekk eina góða millión í meirnýtslu, meðan minninýtslan á undirkontuni fyri byggiumsiting var 1 mió.kr.

Undirkonta 30. Landsvegahald

Minninýtslan er 0,5 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er trupult at meta um, hvussu veturin verður. Landsverk hevur tí í fleiri ár lagt pening til síðis til vetrarhaldið. Tað var minni kavi í 2007, enn roknað varð við, og vórðu útreiðslurnar tí nakað lægri.

Undirkonta 35. Havnir

Meirnýtslan er 0,4 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum varð neyðugt at gera eina nýggja omankoyring til parkeringsøkið á Krambatanga.

Undirkonta 40. Inntøkufíggjað virksemi, hald av landsvegum

Minninýtslan er 2,3 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum var ætlanin í 2007 at endurnýggja ein part av framleiðslutólunum á skerv- og asfaltsverkum stovnsins. Tað eydnaðist ikki til fulnar, av tí at allur útbúnaðurin ikki fekst til vega til tíðina, og tí varð avlop á undirkontuni.

Undirkonta 22. Byggiumsiting Landsins

Sambært landsroknskapinum 2007 eru lønir til starvsfólk (byggi- og verkfrøðingar) hjá Landsverki bókaðar á 14 ymiskar høvuðskontur á 5 málsøkjum:

kr.

| Høvuðskonta | Navn | Upphædd |
|---|---|---|
| 1.10.1.10. | Nýggjur bygningur til Føroya Løgting (løgujáttan) | 16.159 |
| 2.11.1.21. | Umbygging í Tinganesi (løgujáttan) | 32.489 |
| 6.37.5.05. | Umbygging av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni (løgujáttan) | 16.536 |
| 6.37.5.06. | Granskingarlund (løgujáttan) | 57.275 |
| 6.38.1.18. | Stuðul til infrakervið á útoyggjum (onnur játtan) | 3.430 |
| 7.23.2.12. | Skúlin á Trøðni (løgujáttan) | 14.504 |
| 7.23.3.06. | Skúladepil í Suðuroy (løgujáttan) | 150.842 |
| 7.23.3.07. | Tekniski skúli í Klaksvík (løgujáttan) | 85.717 |
| 7.23.3.08. | Fiskivinnuskúlin (løgujáttan) | 75.127 |
| 7.23.3.09. | Skúladepil í Marknagili (løgujáttan) | 37.296 |
| 7.23.3.28. | Studentaskúlin í Hoydølum (løgujáttan) | 134.820 |
| 7.23.6.04. | Klaksvíkar Sjómansskúli (løgujáttan) | 22.200 |
| 8.20.3.08. | Landssjúkrahúsið, útbygging (løgujáttan) | 279.898 |
| 8.21.6.02. | Bústovnar o.a. (løgujáttan) | 177.375 |
| **Tilsamans** | | **1.103.668** |

Landsverk hevur í 2007 "sent" rokningar fyri byggiumsiting, um 1,1 mió.kr., til viðlíkahalds- og løgukontur, sum Landsverk sjálvt hevur ræðisrættin á.

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2007 umrøddi Landsgrannskoðanin spurningin um Byggiumsiting Landsins:

> *"Í skrivi 21. februar 2007 til løgmann, í sambandi við fíggjarnevndarskjali viðvíkjandi Strandfaraskipum Landsins, sigur Fíggjarnevndin, at nevndin hevur fingið enn eitt dømi um, at skipanin við Byggiumsiting Landsins ikki virkar nøktandi:*
>
> "Nevndin heldur tað ikki vera rætt, at Landsverk fær inntøku av byggiverkætlanum, sum Landsverk umsitur. Tað, sum Byggiumsiting Landsins kostar, eigur at játtast á fíggjarlógini serstakt og ikki gjøgnum ta einstøku byggiverkætlanina.
>
> Fíggjarnevndin skal vísa á, at fíggjarlógin er ein heimildarlóg, og tí eigur játtanin at fylgja ræðisrættinum. Nevndin heldur, at innanhýsis flytingar gera tað ógjørligt hjá Løgtinginum at vita, hvørjum tað gevur heimild til at nýta pening, og í veruleikanum ganga tær ímóti játtanarreglunum um, at ikki skal flytast ímillum høvuðskontur."

*Í juli 2007 boðaði Fíggjarmálaráðið frá, at tað tekur fult undir við sjónarmiðum Fíggjarnevndarinnar, at kostnaðurin av Byggiumsitingini eigur at verða játtaður serskilt og eigur ikki at verða spjaddur út á byggiverkætlanirnar. Fíggjarmálaráðið fer ætlandi at taka hetta mál upp við Vinnumálaráðið í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina fyri 2008.*

*Landsgrannskoðanin skal vísa á, at á fíggjarlógini 2007 er á høvuðskontu 6.38.1.02. "Landsverk" stovnað ein nýggj undirkonta 22. "Byggi- og bygningsumsiting landsins" við einari lønarútreiðslu 1,9 mió.kr.*

*Sama upphædd er á fíggjarlógaruppskotinum 2008.*

*Sambært viðmerkingunum til undirkontuna er* "endamálið við kontuni at umsita landsins bygningar, bæði byggi- og víðlíkahaldsuppgávur. Við at savna umsitingina hjá Landsverk, verða allar uppgávur, sum hava við byggimál landsins at gera, loystar á einum staði. Við at savna vitanina til málsøkið hjá Landsverki, verður umsitingin munadyggari, betri skipað við langtíðarætlanum og møguleikum fyri at optimera nýtsluna.".

*Tað kundi bent á, at frá 2007 verða lønarútreiðslur fyri byggiumsiting til viðlíkahalds- og løgukontur, sum Landverk sjálvt hevur ræðisrættin á, bókaðar á hesari undirkontu."*

Í skrivi 18. august 2007 til Mentamálaráðið, í sambandi við fíggjarnevndarskjal viðvíkjandi Studentaskúlanum í Hoydølum, sigur Fíggjarnevndin: "*Nevndin heldur, at á fíggjarlógini er peningur avsettur beinleiðis til Landsverk, og at hesin peningur skal nýtast at ráðgeva almennum stovnum. Nevndin heldur tað tí ikki vera rætt, at Landsverk skal hava pengar fyri serstaka ráðgeving.*"

Í apríl 2008 bað Landsgrannskoðanin landsstýrismannin greiða frá, hvørjar útreiðslur "rokningarnar" fevna um, sum eru bókaðar á tær 14 ymisku høvuðskonturnar.

Í juni 2008 hevur landsstýrismaðurin víst til frágreiðing frá Landsverki, har tað m.a. stendur:

*"Landsverk hevur tey seinastu árini yvirtikið alsamt fleiri byggi- og viðlíkahaldskontur fyri onnur ráð, uttan tó at lønarjáttanir til at umsita hesar nógvu og tungu uppgávur hava fylgt við.*

*Lønarbókingarnar á Landsverki kunnu býtast upp í 3 høvuðsøki:*

1. *Lønir til vanligan rakstur*
2. *Lønir til íløgur (nýggjar landsvegir, bygningar etc.)*
3. *Lønir til rakstur (viðlíkahald) av bygningum hjá øðrum stovnum*

*Ad 1.: Lønir til vanliga raksturin hjá LV verða bókaðar á tær lønarkontur, sum vit hava fingið rakstrarjáttan til.*

*Ad 2.: Lønir í sambandi við leiðslu, stýring og umsiting v.m. viðvíkjandi gerð av nýggjum landsvegum og bygninum verða fluttar yvir á løgurnar eftir einum ávísum leisti, sum greitt frá niðanfyri.*

*Ad 3.: Lønir, ið standast av at umsita viðlíkahaldið av bygningum fyri onnur ráð verða fluttar yvir á tey einstøku viðlíkhaldsprosjektini.*

*Grundarlagið fyri hesum skrásetingum er ein gjøllig meting av tíðarnýtslu (tímaskrásetingar), sum viðkomandi starvsfólk gera til tær ymsu verkætlanirnar. So her er talan um, at flytingarnar eru gjørdar eftir einum skipaðum leisti.*

*Lønarflytingar verða beinleiðis bókaðar yvir á konto 11: lønir, á teimum ymsu verkætlanunum, soleiðis, at tað kann síggjast, hvussu stórar lønarútreiðslurnar hava verið til at umsita hesi projekt. Konturnar 71 og 76 verða ikki brúktar av okkum til hesar skrásetingar, tí eftir okkara metan, vil tað gera gjøgnumskygnið verri.*

*Lønirnar, sum verða skrásettar á henda hátt, eru tær veruligu lønirnar, tvs. ikki við nøkrum overhead, umsitingargjaldi ella tílíkum.*

*Eftir okkara tykki, er tann hátturin, vit hava praktiserað, tann roknskaparliga rætti, nevniliga at leggja útreiðslurnar á júst tær konturnar, sum arbeitt verður fyri. Um lønarparturin ikki verður bókaður út á verkætlanina, fæst ikki at vita, hvat tann veruligi kostnaðurin er av*

*verkætlanini. Nevndi lønarpartur er ein náttúrligur partur av samlaðu útreiðslunum av hvørjari einstakari verkætlan."*

Vinnumálaráðið heldur tað vera eina brúkiliga loysn, tí roknskapurin fyri verkætlanir o.a. sýnir at kalla allar útreiðslur til endamálini. Landsstýrismaðurin vísir á, at verandi mannagongd er ein smidlig skipan, har tað í prinsippinum er lættari at økja/minka starvsfólkatalið, alt eftir hvussu stórt virksemið er innan viðlíkahald og bygging hjá landinum.

### 5.2.9 **Nýggir landsvegir** (løgujáttan) 6.38.1.07.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 130,1 mió.kr. Minninýtslan er 5,5 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum eru fleiri minninýtslur á hesari kontu:

- vegagerðin í Leirvík kom ongantíð í gongd, av tí at loyvið frá lokala friðingarmyndugleikanum varð kært til yvirfriðingarmyndugleikarnar. Eisini heitti Leirvíkar kommuna á Løgtingið um at steðga verkætlanini, og at leggja vegin oman fyri bygdina,
- farið varð ikki undir at gera Dalstunnilin, av tí at loyvi fekst ikki frá friðingarmyndugleikunum, og
- ymisk formlig viðurskifti komu ikki í rættlag við Tórshavnar kommunu í sambandi við innkomuvegin til Tórshavn.

Nýggjar raðfestingar vórðu gjørdar til ymiskar verkætlanir, soleiðis at meginparturin av játtanini varð nýttur.

### 5.2.10 **Vága floghavn (Landsfyritøka)** 6.38.2.08.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 1.000 t.kr. netto. Minninýtslan er 119 t.kr. netto.

Á fíggjarlógini var upprunaliga eingin játtan. Á eykajáttanarlógini apríl 2007 vórðu játtaðar 16.500 t.kr. til útreiðslur og 15.500 t.kr. til inntøkur.

Sambært landsroknskapinum eru útreiðslurnar 16.080 t.kr. og inntøkurnar 15.199 t.kr.

t.kr.

| Vága floghavn (Landsfyritøka) | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---:|---:|---:|
| Inntøkur | -15.500 | -15.199 | -301 |
| Útreiðslur | 16.500 | 16.080 | 420 |
| **Tilsamans** | **1.000** | **881** | **119** |

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina apríl 2007 skuldi Vága floghavn verða yvirtikin 1. mai 2007, og partafelag skuldi verða stovnað, hvørs endamál skuldi vera at reka floghavnavirksemi og aðra vinnu, sum hevur samband við tað.

Sambært viðmerkingunum "*er neyðugt við serstakari rakstrarjáttan til at reka floghavnina í tíðarskeiðinum frá tí, at yvirtøkan er framd, til neyðugar fyrireikingar eru gjørdar, soleiðis at virksemið hjá Vága floghavn, umframt ognir, skuld, rættindi og skyldur, kunnu verða lagdar í P/f Vága floghavn. Hóskandi verður floghavnin rikin sum landsfyritøka hetta tíðarskeið*."

Í sambandi við uppskotið til eykajáttanarlóg september 2007 boðaði landsstýrismaðurin 15. november 2007 í skrivi til Fíggjarnevndina frá, at "*Vága floghavn (landsfyritøkan) hevur havt ymiskar eykaútreiðslur í ár, serliga í sambandi við yvirtøkuna. Eitt nú fyri trygging, sum verður kravd fyri at landsfyritøkan kundi fara undir sítt virksemi, fyri telduútbúnað, forrit o.t., sum áður var ogn hjá SLV. Vøksturin í ferðafólkatalinum, hevur verið*

*heldur minni enn roknað varð við, umframt talið á "operatiónum" (start og lending av flogførum).*" Vísandi til hesa frágreiðing varð biðið um eina eykajáttan 2,1 mió.kr.

Uppskot til eykajáttanarlóg fall burtur, tí at løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

### 5.2.11 P/f Vága floghavn, útbygging 6.38.2.15.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 180 mió.kr. til inntøkur og 180 mió.kr. til útreiðslur. Sambært landsroknskapinum er eingin peningur nýttur.

Á fíggjarlógini var upprunaliga eingin játtan. Á eykajáttanarlógini mars 2007-5 varð játtan fingin til vega.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina "*fer landsstýrismaðurin at leggja serstakt lógaruppskot fyri Løgtingið, ið hevur til endamáls at leggja virksemið hjá Vága Floghavn, umframt ognir, skuld, rættindi og skyldur í P/f Vága Floghavn, tá neyðugar fyrireikingar eru gjørdar. Endamálið við hesari eykajáttan er at fáa fíggjarliga heimild til at hækka partapeningin í P/f Vága floghavn við 180 mió.kr., sum skulu nýtast til at fíggja útbyggingarnar. Talan er um eina fyri landskassan útreiðsluneutrala játtan, tí inntøkurnar frá Íleggingargrunninum fíggja útreiðslur landskassans. Partabrøv felagsins verða ogn landsins.*"

2. november 2007 legði landsstýrismaðurin "Uppskot til løgtingslóg um at leggja virksemið hjá Vága Floghavn í P/f Vága Floghavn" fyri Løgtingið. Lógaruppskotið fall burtur, tí at løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

13. mars 2008 setti landsstýrismaðurin aftur fram "Uppskot til løgtingslóg um at leggja virksemið hjá Vága Floghavn í P/f Vága Floghavn". Endamálið við lógaruppskotinum var at fáa til vega materiella heimild at leggja virksemið hjá Vága Floghavn í P/f Vága Floghavn.

Lógaruppskotið varð samtykt 9. mai 2008

### 5.2.12 Postverk Føroya, umskipað til partafelag 6.38.3.02.

Á fíggjarlógini er eingin játtan. Sambært landsroknskapinum eru inntøkur 21,5 mió.kr., sum eru bókaðar sum "Afturgjaldan av útlánum v.m.".

Postverk Føroya varð í 2005 umskipað til partafelag, har samlaði innskotspeningurin 93,5 mió.kr. varð býttur soleiðis:

- Lán 21,5 mió.kr.
- Partapeningur 43,0 mió.kr.
- Ábyrgdarpeningur 29,0 mió.kr.

16. desember 2005 gjørdu Landsstýrismaðurin og P/f Postverk Føroya avtalu um lánsveiting. Avtalan ásetti, at 21,5 mió kr. var eitt rentuberandi lán, sum skuldi verða afturgoldið í seinasta lagið ultimo 2015.

Inntøkan 21,5 mió.kr. í 2007 stavar frá afturgjaldi postverksins av rentuberandi láninum.

### 5.2.13 Barsilsskipanin (lógarbundin játtan) 6.39.4.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 75,3 mió.kr. Minninýtslan er 9,8 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum vórðu færri, sum fingu barsilspening, enn mett var.

### 5.2.14 P/f Atlantsflog, søla av partabrøvum 56.38.2.54.

mió.kr.

| 56.38.2. Serinntøkur vinnumál, samferðsla og samskifti | Játtan | Rokn-skapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 54. P/f Atlantic Airways, søla av partabrøvum | -67,9 | -86,9 | 19,0 |
| **Tilsamans** | **-67,9** | **-86,9** | **19,0** |

Meirinntøkan er 19 mió.kr. Á fíggjarlógini 2007 fekk landsstýrismaðurin fíggjarligu heimildina at selja 33% av partabrøvunum í P/f Atlantsflog. Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina skuldi mannagongdin vera:

*“Landsstýrismaðurin selur í fyrsta søluumfari upp til 33% av partapeninginum í P/f Atlantsflog. Av teimum 33% verða 3% boðin út til starvsfólkini í P/f Atlantsflog. Hini 30% skulu verða boðin almenninginum.*

*Eftir søluna verður felagið skrásett á virðisbrævamarknaðinum. Í øðrum umfari ætlar landsstýrismaðurin at biðja um heimild til at selja 33% afturat av partapeninginum, sum verða seld virknum íleggjarum. Landið fer sostatt at sita eftir við 34% av partapeninginum, eftir at felagið er einskilt.*

*Landsstýrismaðurin fer at taka atlit í sambandi við søluna, so at virksemið hjá felagnum verður ikki flutt av landinum eftir tað, at meirilutin í felagnum er seldur.*

*Tá P/f Atlantsflog er skrásett á virðisbrævamarknaði, merkir tað, at øll, sum hava hug og keypsorku, kunnu ogna sær partabrøv í felagnum. Talan kann verða um føroyskar og útlendskar íleggjarar.*

*Samanumtikið verður sølan av P/f Atlantsflog skipað soleiðis:*

| *1. umfar 2007* | | *2. umfar 2008* |
|---|---|---|
| *Almenningurin* | *Starvsfólk* | *Virkin íleggjari* |
| *30%* | *3%* | *33%* |

*Tað er sera torført at meta um inntøkurnar hjá landinum av at selja 33% av partapeninginum í P/f Atlantsflog. P/f Atlantsflog hevði 31. desember 2005 ein bókførdan eginpening, sum var um 152 mió.kr. Harafturat hækkaði eginpeningurin samsvarandi partapeninginum, tá hangarurin og tyrlan vórðu skotin inn í felagið við ognarinnskoti (apportinnskoti), við leysliga mett 51,8 mió.kr. Eginpeningurin verður eftir hetta 203,8 mió.kr.*

*Hugsa vit okkum, at inntøkur landskassans av søluni verða 1/3 av fyribils metta eginpeninginum, verða inntøkurnar 67,9 mió.kr.*

*Endamálið við játtanini er at fáa fíggjarliga heimild til at selja upp til 33% av P/f Atlantsflog. Tað at inntøkurnar verða settar til 67,9 mió kr., er ein leyslig meting.”*

## 5.3 Góðkenningarmannagongdir

Reglurnar um góðkenningarmannagongdir eru gjøllari viðgjørdar undir Fíggjarmálum.

### 5.3.1 Greinaroknskapurin

Sambært yvirliti, sum Gjaldstovan hevur dagført í juni 2008, hevur Gjaldstovan ikki fingið váttaðan greinaroknskap frá Vinnumálaráðnum fyri februar 2007 og tey ískoytisskeið í 2007, sum eru at meta sum ársgreinaroknskapur.

Í september 2008 hevur Vinnumálaráðið boðað frá, at øll formlig viðurskifti eru komin í rættlag. Ráðið hevur sent Fíggjarmálaráðnum og Gjaldstovuni greinaroknskapirnar fyri februar 2007 fyri § 6 “Vinnumál” og fyri § 56 “Serinntøkur, vinnumál”, umframt 2. og 3. ískoytisskeið fyri 2007.

### 5.3.2 Mánaðarroknskapurin

Sambært § 9, stk. 2, í roknskaparkunngerðini skulu stovnsleiðararnir góðkenna roknskapirnar viðvíkjandi stovnunum mótvegis hægri myndugleika.

Vit spurdu, hvørjir stovnar, sum landsstýrismaðurin varðaði av í 2007, luku ásetingarnar um at góðkenna mánaðarroknskapirnar mótvegis hægri myndugleika, og hvussu landsstýrismaðurin/aðalráðið hevur eftirlit við, at stovnarnir lúka ásetingarnar í kunngerðini.

Í august 2008 hevur Vinnumálaráðið svarað, at stovnarnir lata roknskapirnar inn rímiliga regluliga. Hetta tó undantikið SamVit, sum ikki hevur latið mánaðarroknskapirnar inn í longri tíð, hóast Vinnumálaráðið fleiri ferðir hevur heitt á stovnin um at fáa tað í rættlag.

Eftirlitið við nýtslu og bókingunum annars fremur Vinnumálaráðið í størstan mun við at nýta leiðslukunningarskipanina, har allar kontur verða eftirkannaðar regluliga. Hugt verður eftir fíggjarstøðuni, um gongdin við útreiðslum og inntøkum sær út til at vera í lagi o.a. Sær okkurt óvanligt út, so setir Vinnumálaráðið seg í samband við stovnin. Eftir árslok verður altíð samskift við stovnarnar um at fáa allar bókingar uppá pláss, áðrenn fíggjarárið letur aftur.

### 5.3.3 Ársroknskapurin

Seinasti mánaðarroknskapurin er at rokna sum ársroknskapur, og stovnsleiðarin skal góðkenna ársroknskapin á serstøkum góðkenningaroyðublað.

Sambært yvirliti hjá Gjaldstovuni í juni 2008 hevur Gjaldstovan bert fingið góðkenningaroyðubløð fyri nøkur stovnsnummar undir landsstýrismanninum í vinnumálum. Á yvirlitinum niðanfyri sæst, at bert 15 stovnar hava latið inn góðkenningaroyðubløð fyri tíðarskeið 14, ein fyri tíðarskeið 13 og ein fyri tíðarskeið 12. Hinir stovnarnir hava als ikki latið nakað góðkenningarblað inn:

| Grein | Stovnur/konta | Stovnsnr. | Tíðarsk.*) | viðmerk. |
|---|---|---|---|---|
| 06 | Oljufyrisitingin (Oljumálaráðið, Oljumálastýrið) | 102320 | | |
| 06 | Heilsufrøðiliga starvsstovan, vanligt virksemi | 110220 | | |
| 06 | Heilsufrøðiliga starvsstovan, inntøkufíggjað virksemi, kanningarstovur | 110240 | | |
| 06 | Heilsufrøðiliga starvsstovan, inntøkufíggjað virksemi, verkætlanir | 110245 | | |
| 06 | Djóralæknatænastan | 111920 | | |
| 06 | Fiskasjúkutænastan | 112620 | | |
| 06 | Basan av fiskasjúkum | 144412 | | |
| 06 | Arbeiðseftirlitið | 125920 | | |
| 06 | Ráðið fyri ferðslutrygd | 109320 | | |
| 06 | Vinnumálastýrið | 111620 | | |
| 06 | Havbúnaðarroyndir | 112501 | | |
| 06 | El-nevndin | 113120 | | |
| 06 | Semingsmannaskipanin | 125720 | | |
| 06 | Vinnuframagrunnurin | 131044 | | |
| 06 | Norðoyatunnilin P/f | 135087 | | |

*) "Tíðarskeið 12" er desember mánaður. Tá ið talan er um grundarlag undir ársroknskapinum, má í minsta lagi tíðarskeið 14 vera góðkent.

| | | | |
|---|---|---|---|
| 06 | Umsiting av barsilsskipan | 138090 | |
| 06 | P/f Fiskaaling, afturgjaldan av innskoti | 141453 | |
| 06 | Fastur Gerðarrættur | 146125 | |
| 06 | Postverk Føroya, eftirlønir | 147020 | |
| 06 | P/f Fiskaaling, partapeningur | 148313 | |
| 06 | Sáttmálaeftirlitið | 113020 | |
| 06 | Endurgjald til skipasmíð | 113401 | |
| 06 | Vanlukkutryggingaráðið | 122520 | 13 |
| 06 | Søla av seismiskum kanningarúrslitum | 102421 | |
| 06 | Kolagrevstur | 113801 | |
| 06 | Landgrunsverkætlan, Jarðfeingi (Vísindaligar kanningar) | 132914 | |
| 06 | Jarðfeingi, (Oljufyrisitingin og Jarðfrøðisavnið) | 142571 | |
| 06 | Landbúnaðarstuðul, mjólk | 112301 | 14 |
| 06 | Landbúnaðarstuðul, neytakjøt | 112302 | 14 |
| 06 | Landbúnaðarstuðul, seyðakjøt | 112303 | 14 |
| 06 | Landbúnaðarstuðul, stráfóður | 112304 | 14 |
| 06 | Landbúnaðarstuðul, velting v.m. | 112306 | 14 |
| 06 | Landbúnaðarstuðul | 112305 | 14 |
| 06 | Landbúnaðarstuðul, húsdjóralógin | 112307 | 14 |
| 06 | Landbúnaðarstuðul, avloysaraskipan | 112308 | 14 |
| 06 | Landbúnaðarstuðul, føroysk húsdjór | 131485 | 14 |
| 06 | Koltursætlanin | 143133 | 14 |
| 06 | Almenn jørð, søla | 146515 | 14 |
| 06 | Vinnumálaráðið, Búnaðarstovan | 146919 | 14 |
| 06 | Rúsdrekkasøla landsins (landsf) | 139115 | |
| 06 | Ferðaráð Føroya | 109420 | |
| 06 | Menningarstovan | 112820 | |
| 06 | Menningarstovan, verkætlanir | 131313 | |
| 06 | Ferðaráð Føroya, inntøkufíggjað virksemi, verkætlanir | 136577 | |
| 06 | Ferðaráð Føroya, marknaðarføring | 138515 | |
| 06 | Ferðaráð Føroya, FITUR samstarv Ísland - Føroyar | 138616 | |
| 06 | SamVit | 149860 | |
| 06 | Marknaðarføring, vinnuframastovan | 149870 | |
| 06 | Verkætlanir, vinnuframastovan | 149880 | |
| 06 | Vága Floghavn | 152040 | |
| 06 | P/f Vága floghavn | 152050 | |
| 06 | P/f Vága floghavn, útbygging | 152060 | |
| 06 | Javnstøðunevndin | 125820 | |
| 06 | Barsilsskipan | 135575 | 12 |
| 06 | KT-fyrisiting, verkætlanir | 147121 | |
| 06 | KT-fyrisiting | 149099 | |
| 06 | Landsverksskrivstovan | 107420 | |
| 06 | Landsvegahald | 107520 | |
| 06 | Nýggir landsvegir | 107610 | |
| 06 | Havnir | 107820 | |
| 06 | Flogferðsla | 108220 | |
| 06 | Flogferðsla, endurgj. fyri toll og mvg | 108301 | |
| 06 | Flogferðsla | 108410 | |
| 06 | Vinnumál, viðlíkahald | 111720 | |
| 06 | Stuðul til infrakervið á útoyggjum | 133354 | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 06 | Umbygging av Heilsufrøðiligu starvsstovuni | 136599 | | |
| 06 | Havnir | 138010 | | |
| 06 | Inntøkufíggjað virksemi, LV | 138182 | | |
| 06 | Granskingarlund | 146414 | | |
| 06 | Søla av landsins ognum | 148577 | | |
| 06 | Byggi- og bygningsumsiting landsins | 149910 | | |
| 06 | Akstovan | 109120 | | |
| 06 | Tryggingareftirlitið, vanligt virksemi | 101720 | | |
| 06 | Fjarskiftiseftirlitið | 130520 | | |
| 06 | Kappingarráðið | 130920 | | |
| 06 | Posteftirlitið | 131529 | | |
| 06 | Felagsskráseting (Skráseting Føroya) | 137720 | | |
| 06 | Loyvisnevndin | 149890 | | |
| 06 | Ymsi lán | 110912 | | |
| 06 | Lán úr innistandandi í íløgugr. | 114120 | | |
| 06 | Lán til Framtaksgrunnin | 119035 | | |
| 06 | Lán úr Grunni til ídnaðarfremjandi endamál | 132233 | | |
| 06 | Brúkarasamtakið | 134117 | | |
| 06 | Partabrøv - ymsi viðurskifti | 135709 | | |
| 06 | Postverk Føroya, umskipað til partafelag | 147574 | | |
| 06 | Kvinnuluttøka í politikki | 149740 | | |
| 06 | Almennar royndir og ráðgeving | 112020 | | |
| 06 | Innsavnan av ull | 142275 | | |
| 06 | Stuðul til innsavnan av seyðaskinnum | 149622 | | |
| 20 | Skrásetingargjald | 128301 | 14 | |
| 20 | Vektgjald | 128401 | 14 | |
| 20 | Inntøkur, burturbeiningargjøld | 147883 | 14 | |
| 56 | P/f Føroya Lívstrygging, ráðgeving | 142585 | | |
| 56 | P/f Atlantsflog, ráðgeving | 147595 | | |
| 56 | P/f Føroya Lívstrygging, søla av partabrøvum | 141555 | | |
| 56 | P/f Føroya Lívstrygging, avhendan av partabrøvum | 142575 | | |
| 56 | Søla av partabrøvum | 144565 | | |
| 56 | P/f Atlantsflog, søla av partabrøvum | 152030 | | broytt stovnsleið. |

Viðmerkingar frá landsstýrismanninum

Í september 2008 hevur Vinnumálaráðið boðað frá, at Ráðið hevur fingið ársroknskapirnar, t.v.s. seinasta ískoytisskeið, til vega fyri allar stovnar/stovnsnummar, og verða skjølini send Gjaldstovuni.

# 6 ÚTBÚGVING OG GRANSKING

## 6.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Mentamálaráðið (rakstrarjáttan) | 15.656 | 16.520 | 864 |
| Læraraeftirlønir (lógarbundin játtan) | 34.300 | 36.854 | 2.554 |
| Tekniski skúli í Klaksvík (løgujáttan) | 5.000 | 5.741 | 741 |
| Fiskivinnuskúlin (løgujáttan) | 9.300 | 9.670 | 370 |
| Studentaskúlin í Hoydølum (løgujáttan) | 3.215 | 3.545 | 330 |
| Almanna- og heilsuskúli Føroya (rakstrarjáttan) | 11.500 | 13.370 | 1.870 |
| Ymiskar verkætlanir (rakstrarjáttan) | 915 | 1.111 | 196 |
| Bókasøvn (rakstrarjáttan) | 12.461 | 13.114 | 653 |
| Kirkjubømúrurin (løgujáttan) | 200 | 467 | 267 |
| Kringvarpssendistøðir (rakstrarjáttan) | 4.000 | 4.869 | 869 |

### 6.1.1 **Mentamálaráðið** (rakstrarjáttan) 7.11.1.09.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 15.656 t.kr. Meirnýtslan er 864 t.kr.

Á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 15.406 t.kr. Á eykajáttanarlógini mars 2007-5 varð játtanin hækkað 250 t.kr.

Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at hækka játtanina 375 t.kr. Lógaruppskotið fall burtur, tí at løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur tvær undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 13.446 | 14.724 | 1.278 |
| 21. Yrkisútbúgvingarskrivstovan | 2.210 | 1.796 | -414 |
| **Tilsamans** | **15.656** | **16.520** | **864** |

Sambært landsstýrismanninum var nógv eyka virksemi í aðalráðnum, m.a. í sambandi við yvirtøkuna av fólkakirkjuni og av serligum uttanhýsis løgfrøðiligum frágreiðingum í sambandi við norðurlandamál og starvsfólkamál.

### 6.1.2 **Læraraeftirlønir** (lógarbundin játtan) 7.23.2.07.

Á fíggjarlógini 2006 eru játtaðar 34,3 mió.kr. Meirnýtslan er 2,6 mió.kr.

Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at hækka játtanina 2,6 mió.kr. Lógaruppskotið fall burtur, tí at løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Sambært landsstýrismanninum er talan um lógarbundnar útreiðslur, ið ikki ber til at sleppa undan at gjalda.

### 6.1.3 **Tekniski skúli í Klaksvík** (løgujáttan) 7.23.3.07.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 5 mió.kr. Meirnýtslan er 741 t.kr.

Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at hækka játtanina 6,5 mió.kr., so útbyggingin kundi verða gjørd liðug í 2007. Lógaruppskotið fall burtur, tí at løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Sambært landsstýrismanninum gekk útbyggingin skjótari enn væntað.

#### 6.1.4 **Fiskivinnuskúlin** (løgujáttan) 7.23.3.08.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 9,3 mió.kr. Meirnýtslan er 370 t.kr. Sambært landsstýrismanninum gekk arbeiðið skjótari enn væntað.

#### 6.1.5 **Studentaskúlin í Hoydølum** (løgujáttan) 7.23.3.28.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 3.215 t.kr. Meirnýtslan er 330 t.kr. Á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 2.000 t.kr.

15. juni 2007 brann "Nýggja Hús", gamla gentukostdeildin í Hoydølum, í grund. Í "Nýggja Húsi" húsaðust lærugreinirnar evning og tónleikur.

Áðrenn eldsbrunan var gjørt av, at lærugreinin evning skuldi flyta í sonevndu "Læknahúsini". Kostnaðurin fyri tillagingar varð tikin av upprunaligu løgujáttanini til Studentaskúlan í Hoydølum.

Við fíggjarnevndarskjali 25. juni 2007 varð játtanin hækkað 600 t.kr. til at umbyggja goymslubygningin til tónleikahøli. Við fíggjarnevndarskjali 8. august 2007 varð játtanin hækkað 615 t.kr.:

- 500 t.kr. afturat til at umbyggja goymslubygningin til tónleikahøli,
- 115 t.kr. afturat til at umbyggja "Læknahúsið" til at hýsa fakinum evning/myndlist.

Sambært landsstýrismanninum er meirnýtslan:

- 265 t.kr. til Teknologisk Institut at eftirkanna bygningin, og
- 65 t.kr. til advokathjálp í sambandi við trætuna við Tórshavnar kommunu um vegin í Hoydølum.

#### 6.1.6 **Almanna- og heilsuskúli Føroya** (rakstrarjáttan) 7.23.6.11.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 11,5 mió.kr. Meirnýtslan er 1.870 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er meirnýtslan m.a. lønir í sambandi við sjúkufráveru og ósemju á Heilsuskúlanum. Harumframt var ein ávís meirútreiðsla til at innrætta hølini, tá ið Sjúkrarøktarfrøðiskúlin flutti í nýggj hølir. Eisini vórðu lønarútreiðslur til gestalærarar, sum undirvísa bachelorum, hægri enn mett var.

#### 6.1.7 **Ymiskar verkætlanir** (rakstrarjáttan) 7.23.6.23.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 915 t.kr. Meirnýtslan er 196 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum vóru fleiri grundir til meirnýtsluna:

- Tá ið valið varð skrivað út í desember 2007, fall nakað av arbeiðinum við Vakstraravtaluni um Suðuroynna burtur, og harvið eisini ein inntøka.
- Starvsbroytingar og lønarhækkanir í sambandi við nýggjan sáttmála við Magistarafelagið høvdu við sær meirútreiðslur.

### 6.1.8 **Bókasøvn** (rakstrarjáttan) 7.24.3.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 12.461 t.kr. Meirnýtslan er 653 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Føroya landsbókasavn | 5.760 | 6.927 | 1.167 |
| 21. Fólkabókasøvn | 6.173 | 5.659 | -514 |
| 22. Stuðul til ljóðbókaframleiðslu | 528 | 528 | - |
| **Tilsamans** | **12.461** | **13.114** | **653** |

Sambært landsstýrismanninum varð rakstrarkostnaðurin av bókasavnstelduskipanini hægri, enn mett var.

### 6.1.9 **Kirkjubømúrurin** (løgujáttan) 7.24.3.23.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 200 t.kr. Meirnýtslan er 267 t.kr. Sambært landsstýrismanninum vórðu útreiðslurnar til varðveitingarvirksemið hægri, enn mett var.

### 6.1.10 **Kringvarpssendistøðir** (rakstrarjáttan) **7.38.3.07**

Á fíggjarlógini eru játtaðar 4.000 t.kr. Meirnýtslan er 869 t.kr.

Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at hækka játtanina 700 t.kr. til "*at keypa eykalutir og til el-nýtslu fyri at tryggja, at verandi MB-sendari kann haldast virkin, til annar sendari er settur upp*".

Lógaruppskotið fall burtur, tí at løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Sambært Búskaparskipan Landsins eru:

- um 4,2 mió.kr. útreiðslur til el og leigu av telefonum, linjum og mastrum,
- um 0,4 mió.kr. útreiðslur til tilfar og aðrar entreprenørveitingar, og
- um 0,2 mió.kr. gjald til fyrisitingarútreiðslur hjá P/f FT-Net.

Grundarlagið fyri útreiðslunum er ein avtala frá 26. juni 2006 millum Mentamálaráðið og P/f FT-Net.

Sambært § 5 í avtaluni "*skal FT-Net hava eitt dagført yvirlit yvir eykalutir á goymslu, mátitól og annars allan útbúna, ið er rindaður av játtanini til sendinetini*".

Sambært § 6 "*ger FT-Net eftir áheitan frá Mentamálaráðnum eina ætlan fyri raksturin av sendinetinum komandi ár*".

Sambært § 7 "*skrivar FT-Net pr. 31.12 og 30.06 stutta statusfrágreiðing til MMR, um gongdina farnu 6 mánaðirnar*".

Í juni 2008 spurdu vit um, og hvussu ofta Mentamálaráðið fær avrit av yvirlitinum yvir eykalutir á goymslu, og vit bóðu um avrit av rakstrarætlanunum fyri 2007 og 2008, og avrit av statusfrágreiðingunum frá 30.06.2007 og 31.12.2007.

Í juli 2008 hevur landsstýrismaðurin svarað, at Mentamálaráðið hevur ikki fingið yvirliti yvir eykalutir á goymslu; harafturímóti hevur samskifti verið um vantandi eykalutir, og hvussu trupulleikarnir kunnu verða loystir.

Av tí at sendinetið er í so ringum standi, hevur verið neyðugt við einum sera tøttum samstarvi millum teknisku leiðsluna í Kringvarpinum, Mentamálaráðið og FT-net, og fundir hava verið millum partarnar aðru hvørja viku ella so.

Av vánaligu teknisku støðuni hevði ein rakstrarætlan fyri 2007 og 2008 víst eina sera stóra upphædd, fyri at fáa verandi teknik á eitt hóskandi støði. Í staðin fyri at gera rakstrarætlan, hevur verið arbeitt við ymiskum loysnum. Í 2008 verður millumbylgju-sendarin endurnýggjaður og FM-netið útbygt.

Sum víst á frammanfyri, rindaði Mentamálaráðið í 2007 200 t.kr. til fyrisitingarút-reiðslur hjá P/f FT-Net. Sambært landsstýrismanninum er hesin peningur partur av útreiðslum fyri tænastur, ið Mentamálaráðið keypir frá FT-net.

Landsgrannskoðanin sær ikki, at útreiðslur til fyrisiting eru nevndar í sáttmálanum millum Mentamálaráðið og P/f FT-Net.

### 6.1.11 Minninýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---:|---:|---:|
| ES-samstarv (rakstrarjáttan) | 2.200 | 1.699 | 501 |
| Próvtøkur (rakstrarjáttan) | 6.092 | 5.888 | 204 |
| Fólkaskúlin (rakstrarjáttan) | 241.001 | 238.463 | 2.538 |
| Sernámsdepilin (rakstrarjáttan) | 50.289 | 49.243 | 1.046 |
| Skúlin á Trøðni (løgujáttan) | 1.500 | 1.165 | 335 |
| Skúladepil í Suðuroy (løgujáttan) | 34.000 | 26.577 | 7.423 |
| Skúladepil í Marknagili (løgujáttan) | 1.000 | 736 | 264 |
| Studningur til læurupláss (lógarbundin játtan) | 12.300 | 10.118 | 2.182 |
| Gjald fyri lærusáttmálar | -990 | -1.278 | 288 |
| Føroya fólkaháskúli | 2.506 | 2.152 | 354 |
| Klaksvíkar Sjómansskúli (rakstrarjáttan) | 3.681 | 3.290 | 391 |
| Vinnuháskúlin (rakstrarjáttan) | 19.434 | 18.319 | 1.115 |
| Lestrarstudningur (lógarbundin játtan) | 79.649 | 71.383 | 8.266 |
| Ungdóms og bygdarhús | 660 | - | 660 |
| Heiðursgávur til mentafólk | 500 | 240 | 260 |
| Bókasøvn (løgujáttan) | 500 | 7 | 493 |
| Bygdasøvn | 3.289 | 2.609 | 680 |
| Kringvarp Føroya (løgujáttan) | 500 | - | 500 |
| Kringvarp Føroya (landsfyritøka) | - | -1.198 | 1.198 |

### 6.1.12 ES-samstarv (rakstrarjáttan) 7.11.1.49.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 2.200 t.kr. Minninýtslan er 501 t.kr. Sambært landsstýris-manninum var ein fulltrúi í farloyvi ein part av 2007, og nýggju størvini vórðu sett nakað seinni enn ætlað.

### 6.1.13 **Próvtøkur** (rakstrarjáttan) 7.23.1.31.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 6.092 t.kr. Minninýtslan er 204 t.kr. Sambært landsstýrismanninum vórðu færri sjúkrapróvtøkur, enn mett var.

### 6.1.14 **Fólkaskúlin** (rakstrarjáttan) 7.23.2.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 241 mió.kr. Minninýtslan er 2,5 mió.kr. Á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 237,6 mió.kr. Á eykajáttanarlógini mars 2007-5 varð játtanin hækkað 3,4 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum vórðu hesi tiltøk av ongum:

- serfrøðinganevnd 0,5 mió.kr.,
- lesiætlanarnevnd 1,0 mió.kr.,
- skúlatilboð fyri atferðartruplar næmingar 0,5 mió.kr., og
- sáttmálahækkingin 1. oktober 2007, tí sáttmálin var ikki undirskrivaður, tá árið var farið.

Harumframt vóru umleið 47 fulltíðarstørv sett við óútbúnum lærarum. Lønin hjá óútbúnum lærarum er munandi lægri enn lønin hjá útbúnum lærarum, og teir fáa heldur ikki eftirlønargjald.

### 6.1.15 **Sernámsdepilin** (rakstrarjáttan) 7.23.2.02.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 50,3 mió.kr. Minninýtslan er 1 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum tók tað drúgva tíð at seta fólk í starv undir Sernámsfrøðiligu tænastueindunum.

### 6.1.16 **Skúlin á Trøðni** (løgujáttan) 7.23.2.12.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 1,5 mió.kr. Minninýtslan er 335 t.kr. Sambært landsstýrismanninum var byggingin seinkað, av tí at tað var torført at útvega handverkarar.

### 6.1.17 **Skúladepil í Suðuroy** (løgujáttan) 7.23.3.06.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 34 mió.kr. Minninýtslan er 7,4 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum gekk arbeiðið ikki sum væntað. Av tí at veðrið var so vánaligt, varð einki gjørt í 6 vikur.

### 6.1.18 **Skúladepil í Marknagili** (løgujáttan) 7.23.3.09.

Á fíggjarlógini er játtað 1 mió.kr. Minninýtslan er 264 t.kr. Sambært landsstýrismanninum varð arbeiðið nakað bíligari, enn mett var.

### 6.1.19 **Studningur til lærupláss** (lógarbundin játtan) 7.23.3.14.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 12,3 mió.kr. Minninýtslan er 2,2 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er lærlingatilgongdin ójøvn frá ári til ár, og umsóknir um lønarendurgjald koma ikki inn til tíðina. T.d. kann ein lærumeistari koma við øllum umsóknunum fyri øll skúlaskeiðini í einum, tá lærlingurin er liðugur at læra.

### 6.1.20 **Gjald fyri lærusáttmálar** 7.23.3.15.

Á fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 990 t.kr. Meirinntøkan er 288 t.kr. Sambært landsstýrismanninum vórðu fleiri lærusáttmálar, enn mett var.

### 6.1.21 **Føroya fólkaháskúli** 7.23.5.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 2.506 t.kr. Minninýtslan er 354 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er næmingatalið lækkað.

### 6.1.22 **Klaksvíkar Sjómansskúli** (rakstrarjáttan) 7.23.6.04.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 3.681 t.kr. Minninýtslan er 391 t.kr. Sambært landsstýrismanninum var eingin sjóvinnuflokkur fyrra hálvár 2007, og eingin skiparaflokkur seinna hálvár 2007.

### 6.1.23 **Vinnuháskúlin** (rakstrarjáttan) 7.23.6.05.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 19,4 mió.kr. Minninýtslan er 1,1 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum var í 2007 meira samlestur í einstøkum lærugreinum í mun til løgdu ætlanina. Harumframt vóru lærarar í farloyvi og undir eftirútbúgving. Eisini vórðu skrivstovuútreiðslurnar lægri, enn upprunaliga mett.

### 6.1.24 **Lestrarstudningur** (lógarbundin játtan) 7.23.7.04.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 79,7 mió.kr. Minninýtslan er 8,3 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum vórðu nýttar:

- 5 mió.kr. minni í stuðli til lesandi uttan fyri Norðurlond,
- 1 mió.kr. minni í stuðli til lesandi í Føroyum, og
- 1 mió.kr. minni í ferðastuðuli til lesandi uttanlands.

Somuleiðis komu umleið 0,5 mió.kr. meira inn í afturgjaldi av lánsgjøldum, enn mett var.

### 6.1.25 **Ungdóms- og bygdarhús** 7.24.1.25.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 660 t.kr. Eingin peningur er nýttur í 2007.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina er "*játtanin hækkað við 460 tús. kr. í sambandi við, at Bygdarfelagið Báran fer undir bygging í 2007, og er ætlanin eisini at stuðla hesari bygging í 2008 og 2009.*"

Sambært landsstýrismanninum kom einki virksemi so langt í 2007, at studningur kundi verða goldin út.

### 6.1.26 **Heiðursgávur til mentafólk** 7.24.2.13

Á fíggjarlógini eru játtaðar 500 t.kr. Minninýtslan er 260 t.kr. Sambært landsstýrismanninum vórðu mentanarvirðisløn landsins og heiðursgáva landsins ikki latnar í 2007, av tí at val varð skrivað út 6. desember 2007.

### 6.1.27 **Bókasøvn** (løgujáttan) 7.24.3.02.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 500 t.kr. At kalla eingin peningur er brúktur. Sambært landsstýrismanninum gjørdist eingin verkætlan nóg búgvin í 2007 til, at stuðul kundi verða latin.

### 6.1.28 **Bygdasøvn** 7.24.3.16.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 3.289 t.kr. Minninýtslan er 680 t.kr. Sambært landsstýrismanninum varð ætlaða arbeiðið ikki gjørt í 2007, av tí at trot var á handverkarum.

### 6.1.29 Kringvarp Føroya (løgujáttan) 7.24.4.03.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 500 t.kr. Eingin peningur er nýttur í 2007. Sambært landsstýrismanninum varð verklagslóg um bygging av kringvarpshúsi ikki samtykt í 2007.

15. oktober 2007 legði landsstýrismaðurin fram uppskot til løgtingslóg "um at útbyggja kringvarpshúsið í Sortudíki". Lógaruppskotið fall burtur, tí at løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

### 6.1.30 Kringvarp Føroya (landsfyritøka) 7.24.4.06.

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 0 kr. netto. Meirinntøkurnar eru 1.198 t.kr. Sambært landsstýrismanninum svarar meirinntøkan til rakstraravlopið hjá Kringvarpinum í 2007.

## 6.2 Góðkenningarmannagongdir

Reglurnar um góðkenningarmannagongdir eru gjøllari viðgjørdar undir Fíggjarmálum.

### 6.2.1 Greinaroknskapurin

Sambært yvirliti, sum Gjaldstovan hevur dagført í juni 2008, hevur Gjaldstovan ikki fingið váttaðan greinaroknskap frá Mentamálaráðnum fyri oktober, november og desember mánað 2007, og heldur ikki tey ískoytisskeið í 2007, sum eru at meta sum ársgreinaroknskapur.

Í juli 2008 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at góðkenningarmannagongdin fyri § 7 hevur ligið í einari fastari legu. Á sumri í 2007 kom uppgávan í drag, men nú er fasta mannagongdin sett í verk aftur. Upplýsingar eru heintaðar inn frá rakstrarstøðunum fyri roknskaparárið 2007, og Mentamálaráðið følir seg trygt við støðuna. Landsstýrismaðurin leggur aftrat, at hóast seinasta EK75 skjal fyri 2007 er fyri 12. tíðarskeið, eru 13. og 14. tíðarskeið gjøgnumgingin fyri tey rakstrarstøð, ið hava bókingar í hesum tíðarskeiðum.

### 6.2.2 Mánaðarroknskapurin

Sambært § 9, stk. 2, í roknskaparkunngerðini skulu stovnsleiðararnir góðkenna roknskapirnar viðvíkjandi stovnunum mótvegis hægri myndugleika.

Í juni 2008 spurdu vit, hvørjir stovnar, sum landsstýrismaðurin varðaði av í 2007, luku ásetingarnar um at góðkenna mánaðarroknskapirnar mótvegis hægri myndugleika, og hvussu landsstýrismaðurin/aðalráðið hevur eftirlit við, at stovnarnir lúka ásetingarnar í kunngerðini.

Í juli 2008 hevur Mentamálaráðið latið Landsgrannskoðanini eitt yvirlit yvir, hvørjir stovnar hava sent ráðnum góðkendan mánaðarroknskap. Á yvirlitinum sæst, at fleiri stovnar hava ikki hildið reglurnar.

Landsstýrismaðurin vísir á, at Mentamálaráðið fylgir nýtsluni mánaðarliga. Eru ivamál verður viðkomandi stovnsleiðari spurdur um støðuna.

### 6.2.3 Ársroknskapurin

Seinasti mánaðarroknskapurin er at rokna sum ársroknskapur, og stovnsleiðarin skal góðkenna ársroknskapin á serstøkum góðkenningaroyðublað.

Sambært yvirliti hjá Gjaldstovuni í juni 2008 hevur Gjaldstovan bert fingið góðkenningaroyðubløð fyri nøkur stovnsnummar undir landsstýrismanninum í mentamálum. Á

yvirlitinum niðanfyri sæst, at bert 11 stovnar hava latið inn góðkenningaroyðubløð fyri tíðarskeið 14. Hinir stovnarnir hava ikki latið inn nakað góðkenningarblað:

| Grein | Stovnur/konta | Stovnsnr. | Tíðarsk.*) | viðm. |
|---|---|---|---|---|
| 07 | Stuðulsstovnurin, Altjóða skrivstova | 130925 | 14 | |
| 07 | Sernámsdepilin | 115821 | | |
| 07 | Sernámsfrøðiligt virksemi, fólkaskúlin o.a. | 115822 | | |
| 07 | Sernámsfrøðiligar tænastueindir | 147508 | | |
| 07 | Granskingargrunnurin | 131184 | | |
| 07 | Granskingarráð Føroya | 133015 | | |
| 07 | Filmseftirlitið | 104220 | | |
| 07 | Skúlabókagerð | 114820 | | |
| 07 | Barnabløð | 115101 | | |
| 07 | Barnabókaútgáva | 115201 | | |
| 07 | Fjølrit | 115320 | | |
| 07 | Fólkaskúlin | 115820 | | |
| 07 | Skúlabarnaflutningur | 115902 | | |
| 07 | Privatir skúlar | 115903 | | |
| 07 | Føroyskir skúlar uttanlands | 115904 | | |
| 07 | Læraraeftirlønir | 116101 | | |
| 07 | Føroya fólkaháskúli | 117420 | | |
| 07 | Húshaldsskúlar | 117520 | | |
| 07 | Frítíðarundirvísing | 117620 | | |
| 07 | Mentanargrunnurin (Mentanargrunnur Føroya Løgtings) | 104501 | | |
| 07 | Umsiting av Mentanargrunninum | 148033 | | |
| 07 | Musikkskúlar | 117720 | | |
| 07 | Føroya studentaskúli og hf-skeið, Hoydølum | 116521 | | |
| 07 | Miðnámsskúlin í Suðuroy (Studentaskúladeildin í Suðuroy) | 116523 | | |
| 07 | Ymsar felagsútreiðslur | 114620 | | |
| 07 | Próvtøkur | 115420 | | |
| 07 | Mentamálaráðið, (Mentamálastýrið), (Undirvísingar- og mentamálastýrið) | 132550 | | |
| 07 | Føroya landsskjalasavn | 105220 | | |
| 07 | Føroya Landsskjalasavn, inntøkufíggjað virksemi | 146524 | | |
| 07 | Føroya Handilsskúli | 116720 | | |
| 07 | Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya | 139119 | | |
| 07 | Heilsuskúli Føroya | 146075 | | |
| 07 | Almanna- og heilsuskúli Føroya, inntøkuf. virksemi | 148789 | | |
| 07 | Leiklist, inntøkufíggjað virksemi | 147323 | | |
| 07 | Tjóðpallur Føroya | 149301 | | |
| 07 | Dieselmotorsimulator | 118220 | | |
| 07 | Inntøkufíggjað virksemi, Føroya sjómans- og maskinmeistaraskúli | 134551 | | |
| 07 | Føroya Brandskúli | 144350 | | |
| 07 | Vinnuháskúlin (Føroya sjómans- og maskinmeistaraskúli) | 148586 | | |

*) "Tíðarskeið 12" er desember mánaður. Tá ið talan er um grundarlag undir ársroknskapinum, má í minsta lagi tíðarskeið 14 vera góðkent.

| | | | |
|---|---|---|---|
| 07 | Føroya Landsbókasavn | 105020 | |
| 07 | Fólkabókasøvn | 105120 | |
| 07 | Bókasøvn, inntøkufíggjað virksemi | 131041 | |
| 07 | Stuðul til ljóðbókaframleiðslu | 148401 | |
| 07 | Listasavn Føroya | 105920 | |
| 07 | Tekniski skúli í Havn | 116721 | 14 |
| 07 | Føroya Fornminnissavn | 105420 | 14 |
| 07 | Bygdasøvn | 105701 | 14 |
| 07 | Friðað hús og fornminni | 105820 | 14 |
| 07 | KT í skúlaverkinum | 145289 | |
| 07 | Málnevndin & Navnanevndin | 103920 | |
| 07 | Føroya Læraraskúli | 118320 | |
| 07 | Føroya Læraraskúli, inntøkufíggjað virksemi | 137502 | |
| 07 | Studningur til lærupláss | 117001 | |
| 07 | Ferðaendurgjald til lærupláss | 138578 | |
| 07 | Yrkisútbúgvingarstovan | 139015 | |
| 07 | Føroya Náttúrgripasavn, (Djóra- og plantusavn) | 137555 | |
| 07 | Føroya Náttúrugripasavn | 139614 | |
| 07 | Skúlabókagrunnurin | 114920 | |
| 07 | Eftirútbúgving og skeið | 115520 | |
| 07 | Nævmingaheimið undir Fjalli | 115702 | |
| 07 | Studentaskúlaheimið | 115703 | |
| 07 | Nævmingaheimið á Kambsdali | 115704 | |
| 07 | Útgerð til yrkisskúlar og hægri útbúgving | 129820 | |
| 07 | Gjald fyri lærusáttmálar o.a. | 143580 | |
| 07 | Felags fyri miðnámsskúlar | 145175 | |
| 07 | Norðurlandasamstarv, ráðharraráð | 101220 | |
| 07 | Skúlatilboð til ung við breki, eftirskúli (Skúlatilboð fyri menningartarnað) | 148353 | |
| 07 | Viðlíkahald (mentan) | 103620 | |
| 07 | Fiskivinnuskúlin | 131788 | |
| 07 | Skúladepil í Suðuroy, løgujáttan (Miðnámsskúlin í Suðuroy) | 133574 | |
| 07 | Skúladepil í Marknagili | 134010 | |
| 07 | Føroya Læraraskúli | 139512 | |
| 07 | Studentaskúlin í Hoydølum | 142013 | |
| 07 | Tekniski skúli í Klaksvík (Norðoya skúladepil) | 145403 | |
| 07 | Klaksvíkar Sjómansskúli | 146585 | |
| 07 | Skúlin á Trøðni, løga | 151090 | |
| 07 | Fiskivinnuskúlin | 116723 | 14 |
| 07 | Fiskivinnuskúlin, inntøkufíggjað virksemi | 130185 | 14 |
| 07 | Biofar | 118521 | |
| 07 | Biofar, inntøkufíggjað virksemi, verkætlanir | 136505 | |
| 07 | Fróðskaparsetur Føroya | 118420 | 14 |
| 07 | Stovnar á Debesartrøð, felagsútreiðslur | 118720 | 14 |
| 07 | Stuðul til útlendingar, sum lesa í Føroyum | 119101 | 14 |
| 07 | Fróðskaparsetur Føroya, inntøkufíggjað virksemi, verkætlan | 137305 | 14 |

| | | |
|---|---|---|
| 07 | Ymiskar verkætlanir, verkætlanin: Økismenningargransking | 138060 |
| 07 | Verkætlanin økismenningargransking - inntøkufíggjað virksemi | 138487 |
| 07 | Kringvarp Føroya | 148070 |
| 07 | Skúlin á Trøðni | 144417 |
| 07 | Føroyahúsið í Keypmannahavn | 103801 |
| 07 | Orðabókaútgáva | 104001 |
| 07 | Før.-ísl.-grønl. mentanarsamstarv | 104101 |
| 07 | Nørrøna felagið | 104102 |
| 07 | Ungmannafeløg og skótarørsla | 104103 |
| 07 | Stuðul til onnur endamál | 104104 |
| 07 | Ungdóms- og bygdarhús | 104301 |
| 07 | Tónleikur og sangur | 104401 |
| 07 | Norðurlandahúsið | 104701 |
| 07 | Sømdarpeningur til skald og listafólk | 104801 |
| 07 | Sjónleikarhús | 104901 |
| 07 | Listasøvn, onnur | 105930 |
| 07 | Studningur til Kirkjugrunnin | 106301 |
| 07 | Føroyskt kirkjumál | 106401 |
| 07 | Fótbóltssambandið | 106501 |
| 07 | ÍSF | 106601 |
| 07 | Studningur til ferðir innanoyggja | 106701 |
| 07 | Kringvarpssendistøðir (Útvarps- og sjónvarpssendistøðir) | 108820 |
| 07 | Meginfelag føroyskra studenta, MFS | 115601 |
| 07 | Næmingastudningur til listafólk | 119201 |
| 07 | Varðveiting av mentanarvirðum | 131244 |
| 07 | Nýggj tøkni - Sjónvarp Føroya og Útvarp Føroya | 131411 |
| 07 | Tiltøk fyri børn og ung, flyting frá P/f ítróttarvedding | 133085 |
| 07 | Tiltøk fyri børn og ung | 134498 |
| 07 | Stuðul til framleiðslu av føroyskum loftmiðlatilfari | 135225 |
| 07 | Føroysk sjómanskirkja | 135387 |
| 07 | ÍSB | 136777 |
| 07 | Ítróttaranlegg | 138412 |
| 07 | Menning av mentan og mentanararvi | 138994 |
| 07 | Listafólkasamband Føroya (LISA) | 141209 |
| 07 | Stuðul til yrkisleiklist | 142012 |
| 07 | Hugasamband Føroya | 142629 |
| 07 | Meginfelag áhugaleikara Føroya | 143011 |
| 07 | Altjóða ítróttaluttøka | 152090 |
| 07 | Kringvarpssendistøðir, løgujáttan (Útvarps- og sjónvarpssendistøðir) | 108910 |
| 07 | Kirkjubømúrurin | 137414 |
| 07 | Almanna og heilsuskúli Føroya | 142377 |
| 07 | Skúlatilboð til ung við breki, eftirskúli, løgujáttan (Skúlatilboð fyri menningartarnað) | 142391 |
| 07 | Bókasøvn | 142406 |
| 07 | Kringvarp Føroya | 145071 |

| | | |
|---|---|---|
| 07 | Savnshús | 147424 |
| 07 | Næmingaheim, løga | 149930 |
| 07 | Yvirtøka av prestagørðum | 149940 |
| 07 | ES-samstarv | 151050 |
| 07 | Vinnuháskúlin, løga | 152000 |
| 07 | Landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð | 114720 |
| 07 | Klaksvíkar sjómansskúli | 118020 |
| 07 | Tekniski skúli í Klaksvík | 116722 |
| 07 | Eysturoyar Studentaskúli og hf-skeið | 116520 |
| 07 | Klaksvíkar hf-skeið | 116522 |
| 07 | Stuðulsstovnurin | 114520 |
| 07 | Stuðul til lesandi, stuðulsveitingar | 119001 |
| 07 | Stuðul til lesandi, útlán | 119002 |

Viðmerkingar frá landsstýrismanninum

Landsstýrismaðurin hevur í juli 2008 boðað frá, at fyri 2007 eru upplýsingar heintaðar inn fyri stovnarnir, soleiðis at Mentamálaráðið kennir seg trygt við støðuna.

# 7 HEILSUMÁL

## 7.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Kommunulæknaskipanin (rakstrarjáttan) | 9.611 | 10.154 | 543 |
| Landssjúkrahúsið (rakstrarjáttan) | 322.243 | 342.224 | 19.981 |
| Søla av íbúðabygningum (løgujáttan) | -35.000 | - | 35.000 |
| Landssjúkrahúsið, útbygging (løgujáttan) | 40.000 | 41.784 | 1.784 |
| Klaksvíkar Sjúkrahús (rakstrarjáttan) | 51.598 | 55.177 | 3.579 |
| Suðuroyar Sjúkrahús (rakstrarjáttan) | 40.136 | 42.485 | 2.349 |
| Serviðgerð uttanlands (rakstrarjáttan) | 106.421 | 116.434 | 10.013 |
| Lánsafturgjald | -196 | - | 196 |

### 7.1.1 **Kommunulæknaskipanin** (rakstrarjáttan) 8.20.2.04.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 9.611 t.kr. Meirnýtslan er 543 t.kr.

Frágreiðing um meirnýtsluna

Sambært landsstýrismanninum søgdu tveir læknar seg úr starvi í 2007, umframt at ein lækni fór í farloyvi. Tá avloysarar verða settir, rindar kommunulæknaskipanin fyri hjálparfólk og fyri ferðaútreiðslur, billeigu, trygging og annað hjá avloysarunum.

Umsitingarútreiðslur

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina **2008** er lønarjáttanin hækkað 300 t.kr., m.a. tí at neyðugt er at fara undir at styrkja umsitingina umframt at endurskoða kommunulæknaskipanina.

Í skrivi til Fíggjarnevndina 19. mai 2008, í sambandi við fíggjarlógaruppskotið 2008, hevur landsstýrismaðurin greitt frá "hvør 'umsiting' er í kommunulæknaskipanini":

> *"Av tí, at umleið ein triðingur av kommunulæknastørvunum eru ósett, og tískil verða mannað við avloysarum, sum oftast starvast stutta tíð í senn, verður nógv starvsfólkaorka í Almanna- og Heilsumálaráðnum nýtt til at rekrutera avloysarar og til samskipan millum aðrar partar í skipanini til tess at fáa kommunulæknaskipanina at hanga saman, so frætt sum tað nú einaferð ber til í verandi støðu.*
>
> *Tá kommunulæknastørv verða sett við avloysarum, flytur umsitingin og útreiðslan av hjálparfólkum í kommunulæknaviðtaluni eisini til Almanna- og Heilsumálaráðið, og krevur hetta eisini starvsfólkaorku til umsiting. Mett verður, at tað verða áleið 1,5 starvsfólk nýtt til at fáa skipanina at virka. Almanna- og Heilsumálaráðið hevur ikki starvsfólkaorku til eina so umsitingarliga krevjandi skipan. Tá ætlanin eisini er at flyta hesa rekruteringsuppgávu út úr Ráðnum, verður mett neyðugt at hækka játtanina til sjálva kommunulæknaskipanina til eisini at fevna um umsiting av skipanini."*

Sambært § 9 í Ll. nr. 23 frá 16. mars 2007 "um broyting í løgtingslóg um kommunulæknaskipan" "*rindar kommunulæknaskipanin fyri keyp av vørum og tænastum í sambandi við starvssetan av kommunulæknum og kommunulæknaavloysarum.*"

Landsgrannskoðanin heldur ikki heimild vera í verandi lóg at nýta játtanina til kommunulæknaskipanina at rinda fyri lønarútreiðslur til at umsita og endurskoða kommunulæknaskipanina.

Eftir okkara tykki er talan um umsitingarútreiðslur, ið áttu at verið hildnar av játtanini til Almanna- og Heilsumálaráðið.

Í september 2008 hevur landsstýrismaðurin greitt soleiðis frá:

> *"Fyri fáum árum síðani var støðan í kommunulæknaskipanini heilt øðrvísi, tí allir kommunulæknar vóru í føstum starvi. Eitt sindur av umsiting stóðst av at fáa summar-feriuavloysarar í størvini, meðan tað restina av árinum ikki var stórvegis arbeiði av rakstrinum av skipanini. Støðan er ein heilt onnur í dag, har skipanin innanfyri fá ár er vorðin sera tung at umsita, orsakað av øllum teimum leysu størvunum, ið skulu mannast við kommunulæknaavloysarum umframt teimum hjálparfólkum, ið Almanna- og Heilsu-málaráðið tá varar av. Læknarnir starvast ofta stutt, 2-3 vikur ísenn, og er uppgávan at finna hesar avloysarar sera tung. Hetta er vorðin ein sera stór arbeiðsbyrða fyri umsitingina í Almanna- og Heilsumálaráðnum. Tí var avgerð tikin um at biðja um pening til umsiting av skipanini.*
>
> *Almanna- og Heilsumálaráðið metti, at rættast var at biðja um peningin á játtanini til kommunulæknaskipanina, tí hetta gevur eina rættari mynd av, hvussu rakstrarkostnaðurin av kommunulæknaskipanini er samansettur.*
>
> *Almanna- og Heilsumálaráðið hevur ætlanir um at skipa rakstrarligu umsitingina av bæði primera og sekundera heilsuverkinum undir einum stovni – Heilsuverkið. Ætlanin er, tá hesin stovnur er skipaður, at leggja umsitingina av kommunulæknaskipanini undir Heilsuverkið."*

<u>At spjaða fyrisitingarútreiðslur</u>

Landsgrannskoðanin hevur í frágreiðingum seinnu árini víst á spurningin um at spjaða fyrisitingarútreiðslur, og vit hava millum ár og dag gjørt fleiri aðalráð varug við, at tað ikki er rætt at blanda umsitingar-/fyrisitingarútreiðslur hjá einum áðalráði saman við aðrar játtanir, ið aðalráðið umsitur.

Landsgrannskoðanin hevur eisini víst á, at vit halda ikki roknskapin vera nóg gjøgnumskygdan, um ein stovnur/ráð pilkar nakrar av sínum útreiðslum út, og spjaðir tær meira ella minni tilvildarliga á aðrar játtanir, ið stovnurin/ráðið hevur ræði á. Tað kann verða við til at grugga og avlaga landsroknskapin og fjala hækkandi fyrisitingar-útreiðslur.

Í oktober 2006 tók landsstýrismaðurin í fíggjarmálum undir við, at fyrisitingarútreiðslur í mest møguligan mun eiga at verða savnaðar undir aðalráðunum.

Í apríl 2008 reistu vit aftur spurningin við Fíggjarmálaráðið. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ásannar, at hesin spurningur ikki var í miðdeplinum, tá ið fíggjarlógin fyri 2008 var til viðgerðar. Fíggjarmálaráðið fer at gera enn eina roynd at taka spurningin upp við hini aðalráðini í sambandi við fíggjarlógararbeiðið fyri 2009.

### 7.1.2 **Landssjúkrahúsið** (rakstrarjáttan) 8.20.3.04.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 322,2 mió.kr. Meirnýtslan er 20 mió.kr.

Á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 315,1 mió.kr. Á eykajáttanarlógini mars 2007-5 varð játtanin hækkað 7,1 mió.kr.:

- 1 mió.kr. til at umskipa føðideildina,
- 1 mió.kr. til skurðseingjarpláss á A3,
- 4,1 mió.kr. til heilivág, rannsóknarstovukanningar og vørur til viðgerð og røkt, og
- 1 mió.kr. til talgilda heilsuskipan.

Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at hækka játtanina 7 mió.kr.:

- 2 mió.kr. til lønir í sambandi við at í 2007 vórðu fleiri sáttmálar gjørdir fyri teir, sum fóru úr gildi í 2005, og
- 5 mió.kr. til nýggjan heilivág til at viðgera gikta-, sclerosu- og krabbameins-sjúklingar.

Lógaruppskotið fall burtur, tí løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Frágreiðing um meirnýtsluna

Landsstýrismaðurin hevur hesa frágreiðing til meirnýtsluna:

*"Sambært frágreiðing frá Landssjúkrahúsinum stavar meirnýtslan frá:*

1. *8,5 mió. kr.til lønir,*
2. *4,1 mió.kr. til heilivág,*
3. *4,2 mió.kr. til konsulenttænastur og*
4. *3 mió.kr. til aðrar útreiðslur (orku, mat og annan rakstur).*

*Ad 1. Lønir:*

*Orsøkin til meirnýtsluna av lønum, er í høvuðsheitum vantandi lønarafturbering í sambandi við, at nýggir lønarsáttmálar vórðu gjørdir fyri stórar partar av fakbólkunum á Landssjúkrahúsinum. Landssjúkrahúsið metir, at íalt vantaðu 5,4 mió.kr. í. Sambært Landssjúkrahúsinum hækkaðu lønarútreiðslurnar við umleið 3,9%, sum avleiðing av sáttmálahækkingunum í 2007, meðan lønarafturberingin var umleið 1,7%. Hini sjúkrahúsini eru komin fram til líknandi niðurstøður. Úrtíðarløn, ið var útgoldin, var íalt umleið 2,2 mió.kr. Lønarútgjaldingar í sambandi við konfliktmál vóru umleið 0,5 mió.kr., og meirútreiðslur til at dekka yvirbelegning á G4/A3 vóru umleið 0,4 mió.kr.*

*Landssjúkrahúsið viðmerkti eisini, at seinastu árini er gjaldið til Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin broytt soleiðis: Í 2006 var tað 1%, í 2007 var tað 1,5%. Landssjúkrahúsið hevur ikki fingið játtan til hesa hækkingina.*

*Sambært frágreiðing frá Landssjúkrahúsinum var lønarvøksturin fyri yvirlæknar í sambandi við nýggja sáttmálan í 2005 um 3,72%. Í hesum sáttmála hækkaðu vaktargjøldini nógv frá 2005 til 2006, við tað, at yvirlæknarnir fingu eyka fyri at hava vaktir leygardag, sunnudag og halgidagar. Undir vanligum umstøðum, har vaktlagið er dekkað við í minsta lagi 3 yvirlæknum, er talan um eina hækking uppá uml. 10,9%, men um talan er um eina deild við 4 yvirlæknum á deildini, so er miðalhækkingin umleið 13%. Landssjúkrahúsið hevur ikki fingið fulla afturbering fyri hetta.*

*Av tí, at tað á onkrum deildum hevur verið sera trupult at fáa sett størv við starvsfólkum við serkunnleika (m.a. á føðideildini í sambandi við konfliktina í 2007 og á intensivu deildini), hevur verið neyðugt at dekka vaktirnar við at fáa starvsfólkini at arbeiða meira, enn tey eru sett til.*

*Tær deildirnar, sum hava havt tað serliga trupult í seinastuni, hava eisini havt størri sjúkrafráverur, enn vanligt. Í miðal verður væntað, at sjúkrafráveran á einum arbeiðsplássi, sum Landssjúkrahúsinum skuldi verið um 4-4,5%. Har fólk eru nøgd, verður sjúkrafráveran mett at vera um 2,5%, har fólk eru ónøgd um 7%, og har talan er um sera stóra ónøgd, kann sjúkrafráveran fara upp á 12-15%.*

*Á føðideildini, har trupulleikar vóru serliga fyrra partin av 2007, fór sjúkrafráveran frá í 2006 at vera 4,8% til í 2007 at vera 6,1%. Á intensivu deildini, har støðan enn er trupul, er sjúkrafráveran í sama tíðarskeiði hækkað frá at vera 5% til at vera 10%. Á øðrum deildum, har sjúkrafráveran annars hevur verið høg (t.d. B8 og Deild 3) er harafturímóti ein ávís minking farin fram (ávikavist frá 8,6% til 7,8% og frá 8,5% til 8%).*

*Í fleiri førum hevur verið neyðugt í sambandi við hátyngd at taka starvsfólk inn at dekka vaktir á frídøgum. Hetta hevur havt við sær úrtíðargjald í stóran mun.*

*Stórur yvirbelegningur varð á G4 í 2006 og inn í 2007. Hesin trupulleikin er blivin handfarin við at lata 10 skurð-seingjarpláss upp á A3. Alternativið til hesa loysn vildi verið at niðursett produktivitetin á skurðdeplinum, sum aftur hevði havt við sær longri bíðitíðir ella útreiðslur á øðrum kontum (serviðgerð uttanlands, Nærverkið, sjúkradagpeningur v.m.).*

*Tá G-bygningurin varð tikin í nýtslu, var sjúkrahúsleiðslan greið yvir, at tey 24 seingjarplássini, sum vóru á skurðdeplinum, vóru í minna lagi, um ikki sjúklingahotell og endurvenjing innan skurðøkið var meira útbygt. Harumframt varð tørvur á stórum umleggingum frá innleggingum til ambulant virksemi. Tað hevur verið ein sera stór øking innan tær ambulantu viðgerðirnar á skurðøkinum, men tað hevur víst seg, at metingin viðvíkjandi seingjakapasitetinum, sum gjørd varð í sambandi við byggingina av nýggja G-bygninginum, ikki hevur hildið, tí at hinar fortreytirnar ikki eru fingnar til vega.*

*Sjúkrahúsleiðslan metti tí í 2007, at hon var noydd at geva grønt ljós til at lata upp aftur A3, har 10 seingjarpláss eru. Hetta fyri, at sleppast kann undan, at nógvir sjúklingar skuldu liggja á gongini í G-bygninginum við tí avleiðing, at Brunaumsjón Landsins og Arbeiðseftirlitið kundu steingja deildina.*

*Almanna- og Heilsumálaráðið varð kunnað um hesa ætlan, og Landssjúkrahúsið fekk 1 mió.kr. í eykajáttan til hetta virksemi. Endaligi kostnaðurin av at lata upp A3 var í 2007 1,4 mió.kr. til lønir og 400 tkr. til klárgeran og rakstur.*

*At A3 var upplatin hevur havt við sær, at sjúklingar ikki hava verið noyddir at liggja á gongini á G4. Hetta hevur í nógvum førum verið røktarkrevjandi sjúklingar innan maga/tarm- og gynækologiskar sjúkur. Tað er sera óheppið at hava hesar sjúklingar á gongini og at skula flyta teir óneyðugt vegna plásstrot.*

*Alt 2007 hevur belegningurin á G4, áðrenn A3 lat upp, verið millum 90 og 110%, har tað á øðrum sjúkrahúsum verður mett, at miðal belegningurin á skurðseingjardeildum ikki skal vera omanfyri 80-85%. Á A3 hevur beleggningur verið støðugt vaksandi frá at byrja við at vera á 38,3% til um ársskiftið at vera 76,7%.*

## Ad 2. Heilivágur:

*Gongdin í nýtsluni av heilivági hevur verið nógv vaksandi seinastu árini, sum tað eisini sæst á myndini niðanfyri.*




*Innan hetta økið er tað serliga stórur vøkstur í heilivágsútreiðslunum til krabbameinsviðgerðir, nýrasjúkur, giktasjúkur og multiplari sclerosu. Seinastu fáu árini er biologiski heilivágurin komin alt meira fram. Talan er um sera kostnaðarmiklan heilivág, men hevur hann eisini ein munandi betri virkning, enn tann gamli heilivágurin. Samfelagsligi*

*vinningurin av, at hesir sjúklingar í mongum førum verða førir fyri at liva eitt meira virkið lív, er væl størri, enn kostnaðurin av viðgerðini. Lívsgóðskan hjá hesum sjúklingum kann ikki samanberast við støðuna frammanundan.*

*Vøksturin hevur verið stórur seinastu árini, og hevur verið at sæð í heilsuverkum í londunum rundan um okkum. Talan er um, at nýggjur heilivágur er framkomin, sum virkar sera væl fyri sjúkur, sum hava verið truplar at viðgera.*

## Ad 3. Konsulenttænastur:

*Fyrstu ferð Landssjúkrahúsið nýtti eksternar vikarar var 2 vikur í 2006.*

*Vikarar eru bert nýttir innan serøkir, t.v.s. intensiva og neonatala økið, og í minni mun innan ljósmøðra- og læknaskrivaravirksemið.*

*Sjúkrarøktarfrøðingarnir innan hesi økir eru serútbúnir, og tað hevur ikki verið møguligt at skaffa kompetent fólk í Føroyum til at dekka vaktirnar.*

*Áðrenn Landssjúkrahúsið byrjaði at taka vikarar inn, vóru nógv tiltøk gjørd, fyri at sleppa undan at nýta tær dýru vikarstovurnar, sum avgjørt er ein seinasta loysn:*

*Lata settu starvsfólkini fáa meirarbeiði – í fleiri førum hevur verið neyðugt við úrtíðargjaldi – ella at lata tey vera í tilkallivakt.*

*Stórt arbeiði er gjørt fyri at fáa starvsfólk uttanífrá, bæði úr Føroyum, umframt frá grannalondunum til vanliga avloysaraløn.*

*At fáa skunda undir upplæring av nýggjum starvsfólkum til serøkini. Her er neyðugt, at starvsfólkini takað serútbúgvingar á útlendskum intensivum ella neonatalum deildum. Hesar útbúgvingarnar takað umleið 2 ár hvør. Hetta hevur við sær, at sjúkrarøktar-frøðingarnir eru burtur av deildini í long tíðarskeið, har neyðugt er við avloysarum. Tá hugsað verður um, at tað eru umleið 30 sjúkrarøktarfrøðingar á intensivu deild, sum skulu ígjøgnum hesa neyðugu útbúgving, sigur tað seg sjálvt, at tað gerst trupult at fáa mannað deildina, og harvið eisini kostnaðarmikið við avloysarum, meðan starvsfólkið nemur sær neyðuga serútbúgving.*

*Arbeitt verður við at fáa teoretiska partin av hesum útbúgvingum heim til Føroyar, men praktiktíðin má framvegis vera á serdeildum uttanlands.*

*Søkt verður um, at fáa stovnað eina skipan innanhýsis á Landssjúkrahúsinum við egnum starvsfólki, fyri at fáa samskipað avloysingina betur og harvið spara tíð til innkalling av avloysarum, og við møguleika fyri at løna hesum avloysarum eyka.*

*Innanhýsis umskipanir eru gjørdar á intensivu deildini fyri at kunna brúka tey fáu starvs-fólkini við serútbúgving, har størstur tørvur er á teimum.*

*Avgjørt seinasta loysn hevur í øllum førum verið, at takað vikarar inn frá privatum vikarstovum.*

*Eitt órealistiskt alternativ var, at minka um virksemið innan hesi økir og skerja.*

*Nýttar eru umleið 4,2 mió.kr. í 2007 til serútbúnar sjúkrarøktarfrøðingar, umframt útreiðslur til serlæknar og ljósmøður. Flutningur o.a. eru við í hesum útreiðslum.*

## Ad 4. Annað (orka, matur og annar rakstur):

*Aðrar útreiðslur eru dýrkaðar nógv seinasta árið – serliga olja, matur og vørur til sjúkraviðgerð og røkt. Hetta sæst aftur í útreiðslunum hjá Landssjúkrahúsinum, sum eru vaksnar meir, enn mett varð, tá ið fíggjarætlanin varð løgd.*

*Sambært frágreiðing frá Landssjúkrahúsinum, hava hesi tiltøk/broytingar verið framd seinastu árini fyri at tálma/minka um meirnýtsluna á Landssjúkrahúsinum:*

- *Innan goymsluna hevur Landssjúkrahúsið gjørt avtalur við allar teir stóru veitararnar, soleiðis at tey fáa vøruna væl bíligari sum stórkundi. Teir veitarar, sum ikki eru kappingarførir, eru skiftir út við aðrar.*
- *Innan goymsluna hevur Landssjúkrahúsið hækkað prísin á vørunum, sum seldar vera út av húsinum. Hetta hevur saman við teimum betri keypsavtalunum givið eina væl hægri inntøku innan hetta øki.*

- *Innan farmaflutning hevur Landssjúkrahúsið havt eitt útboð í lag. Her hava tey gjørt avtalu við eitt farmaflutningsfelag, har kostnaðurin á farmi er farin væl niður.*
- *Innan teknisku deild hevur Landssjúkrahúsið boðið út medisinsk gass í ein trý ára sáttmála og samtíðis er farið yvir til nýggjari tøkni, har Landssjúkrahúsið hevur fingið ein stóran tanga til medisinsk gass, sum ger, at Landssjúkrahúsið kann spara pening, tí tey ikki longur skulu hava smáar fløskur.*
- *Við innføring av digitalari røntgen er brúkið av framkallingarvesku næstan burtur. Hetta hevur tó ikki spart so nógv fíggjarliga, tí viðlíkahaldsavtalan við veitarar av digitalu røntgenini kostar nærum tað sama, sum útreiðslurnar til framkallingarveskuna. Landssjúkrahúsið sparir tó umhvørvinum nógv, nú hesar veskur ikki longur vera nýttar.*
- *Landssjúkrahúsið hevur í samráð við serfrøðingar gjørt broytingar innan reingerðingina, sum í longdini skal fáa reingerðardeildina á sjúkrahúsinum optimeraða. Hervið skuldi Landssjúkrahúsið í longdini fingið eina bíligari reingerðardeild, ella sum minimum, tálma vøkstrinum innan hetta økið, so hvørt sum fermetrarnir gerast fleiri á Landssjúkrahúsinum.*
- *Landssjúkrahúsið er í ferð við at innføra* THS* *og vil hendan KT-skipanin geva nógv betri hagtøl, enn tey sum eru til nú. Tað verður tí lættari at stýra aktivitetin á sjúkrahúsinum.*
- *Sambært Landssjúkrahúsinum eru fleiri tiltøk sett í verk fyri at fáa betri tamarhald á rakstrinum, og hóast tey hava havt góða ávirkan, so hevur tað ikki rokkið til, at Landssjúkrahúsið hevur havt ein rakstur, sum hevur svarað til játtanina.*

*Landssjúkrahúsið metir seg hava gjørt nógv fyri at fylgja við í, hvussu gongdin er í lønarútreiðslunum. Gjørdar eru útgreinaðar fíggjarætlanir fyri frammøti á einstaku deildunum, sum vísur lønarjáttanina, sum einstaku deplarnir hava at ráða yvir. Til hesar ætlanir verðar mánaðarligar uppgerðir gjørdar, bæði til deildar-, depils- og sjúkrahúsleiðslu fyri neyvt at kunna fylgja gongdini.*

*Innan annan rakstur eru rakstrarætlanir lagdar saman við ábyrgdarhavandi fyri økið á Landssjúkrahúsinum (medicoteknikk, KT, tøkniliga økið o.a.). Rakstrarætlanirnar eru lagdar inn á leiðslukunningarskipanina, so tey ábyrgdarhavandi tann vegin alla tíðina kunnu fylgja við gongdini."*

## Roknskapar- og játtanartøl 2004 -2007

Í mun til upprunaligu játtanina á fíggjarlógini 2007 er talan um eitt frávik um 27 mió.kr., svarandi til 8,6% av upprunaligu játtanini. Landsgrannskoðanin heldur talan vera um óvanliga stórt frávik.

Niðanfyri hevur Landsgrannskoðanin sett upp játtanar- og roknskapartøl seinastu árini hjá Landssjúkrahúsinum:

mió.kr.

| F-ár | F-lóg | Ey-lóg | **Tilsamans** | Roknskapartøl | **Frávik** |
|---|---|---|---|---|---|
| 2004 | 277,4 | - | **277,4** | 287,6 | **10,2** |
| 2005 | 290,4 | 6,2 | **296,6** | 298,0 | **1,4** |
| 2006 | 301,5 | 2,6 | **304,1** | 313,9 | **9,8** |
| 2007 | 315,1 | 7,1 | **322,2** | 342,2 | **20,0** |
| **Tilsamans** | **1.184,4** | **15,9** | **1.200,3** | **1.241,7** | **41,4** |

Sambært talvuni eru upprunaliga játtaðar 1.184 mió.kr. til Landssjúkrahúsið árini 2004–2007. Við eykajáttanarlógum eru játtanirnar síðani hækkaðar umleið 16 mió.kr., til 1.200 mió.kr. Nýtslan hesi árini er um 1.242 mió.kr., svarandi til eina meirnýtslu 41 mió.kr.

* Talgild heilsuskipan

Tað tykist, sum upprunaligu játtanirnar á fíggjarlógunum ikki eru nóg neyvt roknaðar út. Bæði í 2005 og 2007 verður longu í mars mánaði biðið um eykajáttan, ávikavist 6 og 7 mió.kr. Hóast eykajáttanirnar, er meirnýtslan árini 2004, 2006 og 2007 millum 10 og 20 mió.kr.

Talan er um 57 mió.kr. í fráviki millum upprunaligu játtanirnar á fíggjarlógunum 2004 – 2007 og roknskapartølini hesi árini.

Landsgrannskoðanin heldur tað ikki vera nøktandi, at so stór frávik eru nærum ár eftir ár, og frávikini tykjast bert at økjast. Vit spurdu í apríl 2008 hvørjar ætlanir landsstýrismaðurin hevur hesum viðvíkjandi.

Í mai 2008 svaraði landsstýrismaðurin, at hann *"hevur ætlanir um, at seta tiltøk í verk, bæði bráðfeingis og miðandi longur frameftir, sum skulu tryggja, at fíggjarlógin verður hildin frameftir. Tveir høvuðshættir eru í hesum, t.e. stovnsleiðararnir mugu veita vissu fyri, at innanhýsis fíggjar- og virksemisstýringin er so nærløgd og álítandi sum til ber, og politiski myndugleikin má tryggja at haldgott grundarlag verður lagt fyri raksturin, tá ið fíggjarlógin verður smíðað. Ætlanin er, at Almanna- og Heilsumálaráðið saman við Fíggjarmálaráðnum, útlenskari serfrøði og stovnunum fer at seta eina djúptøkna og nágreiniliga kanning av rakstrinum av sjúkrahúsunum í verk. Endamálið er at lýsa møguligar skeivleikar og forðingar fyri rationellum rakstri, og vísa á neyðugar ábøtur í rakstrinum, og eisini at kunna samanbera sjúkrahúsini við onnur sjúkrahús."*

<u>Innanhýsis fíggjarstýring</u>

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina 2006 vórðu 800 t.kr. settar av til at seta 2 fíggjarfulltrúar í starv til fíggjarstýring, ráðlegging og menning. Í skrivi til Trivnaðarnevndina 10. oktober 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at "*settir eru 2 ráðleggjarar 1. september 2006*".

Í apríl 2008 spurdu vit landsstýrismannin, hvørjar broytingar tað hevur havt við sær.

Í mai 2008 hevur landsstýrismaðurin greitt frá:

> *"Sambært frágreiðing frá Landssjúkrahúsinum vóru tveir ráðleggjarar settir á Landssjúkrahúsinum í 2006 at taka sær av uppgávum viðvíkjandi fíggjarstýring, ráðlegging og menning. Hesir hava síðani teir vóru settir arbeitt við m.a. at betra um leiðslukunningina innan virksemishagtøl. Landsjúkrahúsið er í løtuni við at innføra THS, og hava tey í hesum sambandi tørv á at greina út, hvørji hagtøl skulu fáast burturúr skipanini. Ráðleggjararnir hava í stóran mun verið nýttir til hesar uppgávur. Eisini eru ráðleggjararnir knýttir at øðrum menningaruppgávum á sjúkrahúsinum, t.d. á starvsfólka- og leiðslumenningarøkinum.*
>
> *Ein umlegging er farin fram á Landssjúkrahúsinum viðvíkjandi fakligum tíðarritum, har ráðleggjararnir hava lagt tað soleiðis til rættis, at Landssjúkrahúsið og aðrir stovnar undir Almanna- og Heilsumálaráðnum hava atgongd til elektronisk tíðarrit. Hetta ger fakligar greinar og tíðarrit atkomulig væl fyrr, enn við pappírsútgávum, og atgongd er fingin til fleiri tíðarrit, uttan at tað er komið at kosta meir, enn frammanundan.*
>
> *Tann eini ráðleggjarin var í starvi til á heysti 2007. Landssjúkrahúsið hevur ætlanir um at fáa annað fólk í starv, sum skal taka sær av menningaruppgávum, soleiðis at Landssjúkrahúsið eisini frameftir fær sum mest burturúr sínum tilfeingi."*

### 7.1.3 Søla av íbúðabygningum (løgujáttan) 8.20.3.05.

Á fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 35 mió.kr. Eingin inntøka er skrásett í landsroknskapinum.

Talan er um ætlaða søluprísin fyri íbúðabygningarnar hjá Landssjúkrahúsinum, hvørs virði á fíggjarlógini 2005 og 2006 vórðu mettur til 30 mió.kr., og á fíggjarlógini 2007 til 35 mió.kr.

Í juni 2007 kunnaði landsstýrismaðurin um, at framvegis varð arbeitt við at selja bygningarnar, sum væntandi fóru at verða klárir at seta alment til sølu fyrst í oktober í 2007.

Í apríl 2008 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at seinast í oktober 2007 varð staðfest, at tað fór at verða torført at selja bygningarnar í 2007. Greiða skuldi fáast á viðurskifti við Tórshavnar kommunu, áðrenn Matrikulstovan kundi fara í holt við matrikuleringina.

Landsstýrismaðurin kunnaði eisini um, at Landssjúkrahúsið í desember 2007 boðaði frá, at tørvurin hjá Landssjúkrahúsinum á bústøðum til starvsfólk er nógv størri, enn mett var í oktober 2003, og Landssjúkrahúsið heitti á Almanna- og Heilsumálaráðið um ikki at selja bygningarnar.

Landsstýrismaðurin væntar at fáa eitt endaligt tilmæli frá umsitingini, hvussu arbeitt skal vera við málinum í framtíðini.

Landsgrannskoðanin kann viðmerkja, at á fíggjarlógini 2008 er eingin játtan. Sambært viðmerkingunum er høvuðskontan niðurløgd. Tað bendir á, at ætlanirnar at selja bygningarnar eru sleptar.

### 7.1.4 Landssjúkrahúsið, útbygging (løgujáttan) 8.20.3.08.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 40 mió.kr. Meirnýtslan er 1,8 mió.kr.

Á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 33 mió.kr. Á eykajáttanarlógini mars 2007-5 varð játtanin hækkað 7 mió.kr.

Á eykajáttanarlógini oktober 2007 varð skotið upp at hækka játtanina 5 mió.kr. at keypa útbúnað. Lógaruppskotið fall burtur, tí løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Sambært landsstýrismanninum gekk arbeiðið so mikið væl, at játtanin slerdi ikki til. Tað ber ikki til at steðga ella seinka einum arbeiði, sum er í gongd, uttan at krav verður reist um endurgjald. Meirnýtslan varð 1,4 mió.kr.

Í øðrum lagi komst ein meirnýtsla 400 t.kr. av einari misskiljing millum Landssjúkrahúsið og Landsverk í sambandi við nakrar veitingar.

### 7.1.5 Klaksvíkar Sjúkrahús (rakstrarjáttan) 8.20.3.10.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 51,6 mió.kr. Meirnýtslan er 3,6 mió.kr.

Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at hækka játtanina 1,4 mió.kr.:

- 0,6 mió.kr. til lønir í sambandi við, at í 2007 vórðu fleiri sáttmálar gjørdur fyri teir, sum fóru úr gildi í 2005, og
- 0,8 mió.kr. til hækkaðar útreiðslur til heilivág og olju.

Lógaruppskotið fall burtur, tí løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Landsstýrismaðurin hevur hesa frágreiðing til meirnýtsluna:

*"Sambært Klaksvíkar sjúkrahúsi, var meirnýtsla í lønum orsakað av lønarvøkstri vegna sáttmálasamráðingar. Orsøkin til meirnýtsluna í øðrum rakstri eru hækkanir í øllum útreiðslum, men serliga heilivágsútreiðslum og oljuprísi.*

*Sambært Klaksvíkar sjúkrahúsi er avleiðingin av, at Norðuroyartunnilin læt upp í mai 2006 tann, at virksemið á sjúkrahúsinum hevur vaksið nógv. Talið av innleggingum er vaksið og eisini vísa hagtøl øktar rannsóknarkanningar og vitjanir á skaðastovu. Sjúkrahúsið metir eisini, at kommunulæknastøðan í Norðuroyggjum er ein faktorur, sum hevur stóra ávirkan á rakstur og aktivitetin á Klaksvíkar sjúkrahúsi. Síðani nýggja vaktarskipanin varð sett í gildi, hava bæði læknavaktir og sjúkrarøktarfrøðingar meir at gera."*

### 7.1.6 **Suðuroyar Sjúkrahús** (rakstrarjáttan) 8.20.3.15.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 40,1 mió.kr. Meirnýtslan er 2,3 mió.kr.

Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at hækka játtanina 1,3 mió.kr.:

- 0,6 mió.kr. til lønir í sambandi við, at í 2007 vórðu fleiri sáttmálar gjørdir fyri teir, sum fóru úr gildi í 2005,
- 0,7 mió.kr. til hækkaðar útreiðslur til heilivág og olju.

Lógaruppskotið fall burtur, tí løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Landsstýrismaðurin hevur hesa frágreiðing til meirnýtsluna:

*"Sambært Suðuroyar sjúkrahúsi, var meirnýtslan í lønum umleið 900 t.kr. Orsøkin var lønarvøkstur vegna sáttmálasamráðingar og sjúkrameldingar. Orsøkin til meirnýtsluna í øðrum rakstri eru hækkanir í heilivágsútreiðslum, hækkandi prísur á matvørum og høgir oljuprísir og elprísur. Neyðugt varð eisini at skifta út eitt medicotekniskt tól, sum ikki bar til at umvæla."*

### 7.1.7 **Serviðgerð uttanlands** (rakstrarjáttan) 8.20.3.20.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 106,4 mió.kr. Meirnýtslan er 10 mió.kr.

Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at hækka játtanina 7,9 mió.kr. Lógaruppskotið fall burtur, tí løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---:|---:|---:|
| 20. Vanligt virksemi | 78.892 | 81.201 | 2.309 |
| 22. Flutningur og uppihald | 15.639 | 20.860 | 5.221 |
| 23. Sjúklingahotellið Tórshavn | 11.890 | 14.373 | 2.483 |
| **Tilsamans** | **106.421** | **116.434** | **10.013** |

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2006 og oktober 2007 umrøddu vit ymisk ivamál viðvíkjandi játtanini til Serviðgerð uttanlands:

<u>Konsulentútreiðslur</u>

Landsgrannskoðanin mælti frá at bóka konsulentútreiðslur o.t. á hesa kontu. Í 2007 eru brúktar 805 t.kr. í konsulentútreiðslum.

Sambært landsstýrismanninum tekur Landssjúkrahúsið í 2008 yvir avtalurnar við konsulentarnar í psykiatri og onkologi/hæmatologi. Saman við avtalunum verður

tilfeingið - svarandi til avtalurnar - eisini flutt til Landssjúkrahúsið. Allir partar eru kunnaðir um ætlaðu broytingarnar og taka undir við hesari tilgongd.

Aðrar serviðgerðir "innanlands"

Vit hildu tað kundi tykjast fløkjasligt, at ein játtan, markað til serviðgerð uttanlands, eisini varð nýtt til serviðgerð innanlands. Í 2007 eru brúktar 925 t.kr. til serviðgerðir á Landssjúkrahúsinum.

Í fíggjarlógini 2008 eru settar 5 mió.kr. á undirkontu 24. "Heimtøkur". Sambært viðmerkingunum "*er endamálið við undirkontuni at gera eina liðiliga skipan fyri tey føroysku sjúkrahúsini, at fáa flutt virksemi av ávísum serviðgerðum til Føroya, har tað er møguligt at fáa heilsustarvsfólk við serkunnleika at koma higar, ístaðin fyri at senda sjúklingar av landinum.*"

Aðrar útreiðslur

Vit vístu á, at játtanin til "Serviðgerð uttanlands" hevði verið nýtt til at gjalda heilivág m.a. til dialysuviðgerð av sjúklingum í Føroyum. Í 2007 eru brúktar 573 t.kr. til at keypa heilivág o.l.

Landsgrannskoðanin heldur, at útreiðslur til heilivág eiga at verða játtaðar av Almannastovuni sambært reglunum í K. nr. 100 frá 20. desember 1999 "um stuðul til heilivág eftir forsorgarlógini og almannapensjónslógini".

Í juni 2007 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Almanna- og Heilsumálaráðið umhugsaði, hvussu málið kundi verða loyst, men enn var ikki komið longri við málinum.

Í mai 2008 greiddi landsstýrismaðurin frá, at:

> *"Fundur hevur verið um málið í november 2007, har umboð fyri Almanna- og Heilsumálaráðið og Almannastovuna viðgjørdu spurningin.*
>
> *Niðurstøðan á fundinum varð millum annað, at tað skulu lógarbroytingar til á økinum, áðrenn Almannastovan kann yvirtaka hesar útreiðslur.*
>
> *Fyri at heilivágur skal kunna verða umfataður av forsorgar- og almannapensjónslógini og harvið kunngerð um stuðul til heilivág skulu ávís viðurskifti verða uppá pláss, so sum:*
>
> - *Heilivágurin skal kunna útflýggjast til persónin og ikki bara til sjúkrahús.*
> - *Tað skal ikki verða ein sjúkrahúsviðgerð, t.v.s. dialysu viðgerð, sum verður ordinerað og regulera av serlækna og verður uppfatað sum sjúkrahúsviðgerð.*
> - *Tær viðgerðir, sum koma undir kunngerð nr. 100 frá 20. desember 1999, eru viðgerðir sum sjúkrakassin eisini gevur tilskot, herundir sertilskot, til. Sjúkrakassin gevur ikki tilskot til dialysuheilivág.*
>
> *Almannastovan metir, at tað kann fáa avleiðingar, sum ikki eru til at gjøgnumskoða, um farið verður inn í sjúkrahúsheilivág. Bæði viðvíkjandi stýringini av heilivágsnýtsluni, og eftirliti við viðgerðini og útreiðslunum."*

Inntøkur

Sambært Búskaparskipan Landsins er í 2007, á høvuðskontu 8.20.3.20. "Serviðgerð uttanlands", bókaðar 7,3 mió.kr. sum "flytingar úr Danmark". Sambært bókingartekstinum er talan um "Heildarveiting/Bónuspulja".

Talan er um eina bónusskipan, sum til 2007 hevði heimild í danskari kunngerð nr. 1171 frá 21. desember 1994 "om Hovedstadens Sygehusfællesskabs betaling til amtskommunerne, Københavns og Frederiksberg kommuner samt Færøernes og

Grønlands Hjemmestyre" seinni broytt við kunngerð nr. 477 frá 3. juni 1997, við heimild í lóg nr. 1132 frá 21. desember 1994 um "Hovedstadens Sygehusfællesskab".

Fyrr varð henda veiting avgreidd mánaðarliga, sum ein kreditnota frá Ríkissjúkrahúsinum, og varð bókað á "Serviðgerð uttanlands" á standardkontu 14. "Keyp av vørum og tænastum". Hon hevur sostatt ikki verið sjónlig á fíggjarlógini ella í landsroknskapinum áður.

Á donsku fíggjarlógini er nýggj høvuðskonta stovnað í 2007: "Tilskud til Færøernes hjemmestyre i forbindelse med nedlæggelse af bonuspuljen". Sambært viðmerkingunum *"er kontoen oprettet i forbindelse med ændringsforslagene. Bonuspuljen er som led i finansieringsreformen overført til regionernes bloktilskud fra og med 1. januar 2007, dog med fradrag af Færøernes og Grønlands andel af bonuspuljen. Færøernes andel beløber sig til 7,3 mio. kr. i 2007 og frem, som overføres til Færøernes hjemmestyre."*

Aðrar viðmerkingar

Landsgrannskoðanin mælti í 2006 og 2007 til, at játtanin á hesari høvuðskontu verður endurskoðað saman við Fíggjarmálaráðnum.

Í mai 2008 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at 5. juli 2007 var fundur millum umboð fyri Almanna- og Heilsumálaráðið og Fíggjarmálaráðið, har málið varð viðgjørt. Niðurstøðan var:

- at flyta avtalurnar, um at fáa ráðgevarahjálp til sjúkrahúsini nakrar ferðir árliga, yvir á sjúkrahúsini saman við tilfeinginum, og
- at stovna eina undirkontu undir Serviðgerð uttanlands, sum skal bera kostnaðin av heimtøkuverkætlanum.

Arbeitt hevur verið við málunum, og eru bæði málini tikin við á fíggjarlógina fyri 2008.

## 7.2 Minninýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Koppsetingar (lógarbundin játtan) | 2.480 | 1.965 | 515 |
| Læknakanningar av børnum (lógarbundin játtan) | 1.191 | 738 | 453 |
| Úbúgving av yngri læknum (rakstrarjáttan) | 3.091 | 2.599 | 492 |

### 7.2.1 **Koppsetingar** (lógarbundin játtan) 8.20.1.10.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 2.480 t.kr. Minninýtslan er 515 t.kr.

Á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 1.680 t.kr. Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at hækka játtanina 800 t.kr. Lógaruppskotið fall burtur, tí løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Við fíggjarnevndarskjali 8. oktober 2007 varð játtanin til ókeypis koppseting ímóti beinkrími av fólki, ið eru 67 ár ella eldri, hækkað 800 t.kr. Sambært landsstýrismanninum vórðu einans brúktar 459 t.kr.

### 7.2.2 **Læknakanningar av børnum** (lógarbundin játtan) 8.20.1.19.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 1.191 t.kr. Minninýtslan er 453 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum eru kommunulæknarnir ikki rættiliga farnir undir at kanna skúlabørnini. Kunngerð nr. 88/2007 “um fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung” kom í gildi 24. september 2007.

### 7.2.3 Útbúgving av yngri læknum (rakstrarjáttan) 8.20.2.05.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 3.091 t.kr. Minninýtslan er 492 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er trupult at meta um útreiðslurnar. Landsstýrismaðurin roknar við, at øll játtanin verður brúkt í 2008, av tí at skipanin er víðkað til eisini at fevna um introduktiónsstørv í smáum sergreinum, um viðkomandi deild er góðkend sum útbúgvingarstað.

# 8 ALMANNAMÁL

## 8.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Hjálpartólamiðstøðin (rakstrarjáttan) | 6.623 | 6.907 | 284 |
| Barnavernd (lógarbundin játtan) | 2.300 | 3.737 | 1.437 |
| Barnapeningur veittur í forskoti (lógarbundin játtan) | 415 | 1.129 | 714 |
| Stuðul til uppihaldspening (lógarbundin játtan) | 7.483 | 8.510 | 1.027 |
| Dagpeningaskipanin (lógarbundin játtan) | 51.075 | 56.404 | 5.329 |
| Eldrarøkt (rakstrarjáttan) | 286.366 | 287.063 | 697 |
| Stuðulstænastan | 15.632 | 15.836 | 204 |
| Vanlig forsorg (lógarbundin játtan) | 114.187 | 130.712 | 16.525 |
| Einkjubarnastyrkur (lógarbundin játtan) | 1.888 | 2.043 | 155 |

### 8.1.1 **Hjálpartólamiðstøðin** (rakstrarjáttan) 8.21.1.07.

Á fíggjarlógini 2007 eru játtaðar 6.623 t.kr. Meirnýtslan er 284 t.kr.

Á fíggjarlógini varð játtanin hækkað 1,2 mió.kr. til útreiðslur til sakkøna hjálp og flutning. Samstundis varð játtanin "Vanlig forsorg (lógarbundin játtan)" undirkonta 06. "Hjálpartól" lækkað samsvarandi, av tí at talan er um útreiðslur, sum ikki eiga at verða bókaðar sum lógarbundnar útreiðslur.

Sambært landsstýrismanninum vórðu hesar útreiðslur hægri, enn mett var.

### 8.1.2 **Barnavernd** (lógarbundin játtan) 8.21.3.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 2.300 t.kr. Meirnýtslan er 1.437 t.kr.

Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at hækka játtanina 1,7 mió.kr. Í viðmerkingunum verður greitt soleiðis frá:

> *"Við fíggjarlógaruppskotinum fyri 2007 varð biðið um 4 mió.kr. til hesa høvuðskontuna. Tá ið fíggjarlógin varð samtykt, varð játtanin skorin við 1,7 mió.kr. Sum tað sær út nú, er metingin, sum varð nýtt til fíggjarlógaruppskotið, røtt, og tí verður biðið um at hækka játtanina við 1,7 mió.kr. Umframt at nøkur børn, ið vóru sett á stovn uttanlands eftir gomlu barnaverndarlógini, hava fingið longt teirra uppihald, so verða børn sett á stovn uttanlands, tí nøktandi tilboð ikki kunnu veitast í Føroyum."*

Lógaruppskotið fall burtur, tí løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

### 8.1.3 **Barnapeningur veittur í forskoti** (lógarbundin játtan) 8.21.3.04.

Á fíggjarlógini vóru játtaðar netto 415 t.kr. Meirnýtslan er 714 t.kr.

Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at hækka játtanina 500 t.kr., tí roknað varð við, at inngjaldið fór at verða 500 t.kr. minni, enn væntað. Lógaruppskotið fall burtur, tí løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur tvær undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Forskotsrindan av barnapeningi | 11.736 | 11.983 | 247 |
| 02. Innkrevjing av forskotsrindaðum barnapeningi | -11.321 | -10.854 | 467 |
| **Netto, tilsamans** | **415** | **1.129** | **714** |

Sambært landsstýrismanninum hevur TAKS greitt frá, at tað er vorðið truplari at heinta inn barnapeningakrøv. Framvegis verður ikki heintað inn uttanfyri Norðurlond, samstundis sum krøvini móti persónum uttanfyri Norðurlond verða fleiri í tali.

### 8.1.4 **Stuðul til uppihaldspening** (lógarbundin játtan) 8.21.3.05.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 7.483 t.kr. Meirnýtslan er 1.027 t.kr.

Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at lækka játtanina 260 t.kr. Lógaruppskotið fall burtur, tí løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Sambært landsstýrismanninum vórðu játtaðu umsóknirnar í 2007 fleiri enn væntað.

### 8.1.5 **Dagpeningaskipanin** (lógarbundin játtan) 8.21.4.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 51,1 mió.kr. Meirnýtslan er 5,3 mió.kr.

Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at hækka játtanina 2.200 t.kr. Lógaruppskotið fall burtur, tí løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Løntakarar | 51.588 | 57.993 | 6.405 |
| 02. Sjálvstøðug og húsarhaldsfólk | 1.933 | 1.290 | -643 |
| 04. Gjald fyri læknaváttanir | 1.218 | 594 | -624 |
| 09. Arbeiðsgevarans partur, dagpeningur | -3.664 | -3.473 | 191 |
| **Tilsamans** | **51.075** | **56.404** | **5.329** |

Sambært landsstýrismanninum vórðu fleiri umsóknir játtaðar í 2007 enn í 2006. Samstundis er eindarkostnaðurin vaksandi.

### 8.1.6 **Eldrarøkt** (rakstrarjáttan) 8.21.6.04.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 286,4 mió.kr. Meirnýtslan er 0,7 mió.kr. Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Røktarheim | 165.260 | 165.786 | 526 |
| 23. Eldrarøkt í Sandoynni | 11.675 | 11.535 | -140 |
| 25. Heimatænastan | 107.373 | 108.446 | 1.073 |
| 27. Økisterapi | 2.058 | 1.296 | -762 |
| **Tilsamans** | **286.366** | **287.063** | **697** |

<u>Undirkontu 20. “Røktarheim”</u>

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 0,5 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum vísti tað seg, tá landsroknskapurin fyri 2007 var latin aftur, og roknskapirnir hjá sjálvsognarstovnunum skuldu stemmast av við rapporteringarnar frá røktarheimunum, at feilur var í rapporteringini hjá einum røktarheimi. Útreiðslurnar fyri alt árið vóru hægri. Framrokningin av nýtsluni, sum Nærverkið hevði gjørt, helt tí ikki.

<u>Undirkonta 25. “Heimatænastan”</u>

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 1,1 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum stendst meirnýtslan m.a. av avleiðingum av sáttmálasamráðingum. Útreiðslurnar til lønarhækkingar hava verið hægri enn játtanin.

### 8.1.7 **Stuðulstænastan** (rakstrarjáttan) 8.21.6.11.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 15,6 mió.kr. Meirnýtslan er 204 t.kr. Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at hækka játtanina 350 t.kr. tí Nærverkinum var álagt at taka yvir uppgávu frá Almannastovuni. Lógaruppskotið fall burtur, tí løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

### 8.1.8 **Vanlig forsorg** (lógarbundin játtan) 8.21.7.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 114,2 mió.kr. Meirnýtslan er 16,5 mió.kr. netto. Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at hækka játtanina 8,8 mió.kr.:

t.kr.

| Undirkonta | Uppskot eykajáttan |
|---|---:|
| 01. Fyribils hjálp § 9 | 375 |
| 03. Stakútreiðslur § 15 | -750 |
| 04. Meirútreiðslur brekað barn § 17 | 3.000 |
| 05. Endurbúgving § 18 | 1.375 |
| 06. Hjálparamboð v.m. § 18 | 4.900 |
| 07. Arbeiðsloysisforsorg § 9, stk. 2 | -1.100 |
| 08. Hjálp til viðgerð o.a. á serligum stovnum § 16 | 1.000 |
| **Tilsamans** | **8.800** |

Lógaruppskotið fall burtur, tí løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---:|---:|---:|
| 01. Fyribils hjálp § 9 | 11.400 | 12.719 | 1.319 |
| 02. Varandi veiting § 13 | 1.700 | 1.367 | -333 |
| 03. Stakútreiðslur § 15 | 3.100 | 2.243 | -857 |
| 04. Meirútreiðslur brekað barn § 17 | 19.000 | 23.546 | 4.546 |
| 05. Endurbúgving § 18 | 24.850 | 26.369 | 1.519 |
| 06. Hjálparamboð v.m. § 18 | 41.200 | 51.452 | 10.252 |
| 07. Arbeiðsloysisforsorg § 9, stk. 2 | 10.407 | 9.251 | -1.156 |
| 08. Hjálp til viðgerð o.a. á serligum stovnum § 16 | 2.530 | 3.765 | 1.235 |
| **Tilsamans** | **114.187** | **130.712** | **16.525** |

Undirkonta 01. “Fyribils hjálp § 9”

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 1,3 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er eindarkostnaðurin øktur meira enn 4.000 kr. fyri hvønn umsøkjara/móttakara. Útreiðslurnar til olju, tryggingar, leigu o.a. eru nógv øktar, tí gerst tørvurin á hjálp eisini størri, og tað ger at veitingarnar hækka. Veitingin fyri hvønn persón kann tó í mesta lagi vera upp til dagpeningahámarkið.

Undirkonta 04. “Meirútreiðslur brekað barn § 17”

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 4,5 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er eindarkostnaðurin øktur við nærum 3.000 kr. fyri hvønn umsøkjara/móttakara.

Landsstýrismaðurin vísir á, at nýggj barnaverndarlóg kom í gildi 1. januar 2006. Lógin hevði við sær at nøkur børn og ung við staðfestum breki vórðu visiterað til Brekdeildina á Almannastovuni. Talan er um børn, sum fyrr vóru fevnd av gomlu barnaforsorgarlógini, men sum nú koma undir § 17 í forsorgarlógini. Talan hevur serliga verið um børn og ung við autismu ella empatiórógv. Umframt hækkaða kostnaðarstøðið annars, er útreiðslan til endurgjald fyri inntøkumiss økt.

Útreiðslurnar á kontuni “Meirútreiðslur brekað barn § 17” eru hækkaðar nógv, og niðan fyri hevur Landsgrannskoðanin sett upp roknskapartølini fyri árini 2000-2007:[2]

t.kr.

| | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Endurgjald fyri inntøkumiss | 4.891 | 5.403 | 6.271 | 6.207 | 6.502 | 9.131 | 9.241 | 10.021 |
| Heilivágur | 2.489 | 3.875 | 3.859 | 3.958 | 4.150 | 5.464 | 4.922 | 5.142 |
| Annar stuðul | 3.723 | 3.888 | 4.254 | 4.496 | 5.531 | 5.842 | 6.323 | 8.383 |
| **Tilsamans** | **11.103** | **13.166** | **14.384** | **14.661** | **16.183** | **20.437** | **20.486** | **23.546** |

Útreiðslurnar eru hækkaðar úr 11,1 mió.kr. í 2000, til 23,5 mió.kr. í 2007, ella meira enn tvífaldaðar.

Við Ll. nr. 82 frá 8. mai 2003 “um broyting í lóg um almenna forsorg” varð heimilað landsstýrismanninum í kunngerð at áseta neyvari reglur um útreiðslur til ávísar viðgerðir og um endurgjald fyri inntøkumiss.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2002 (Lm. nr. 56-6/2003), sum varð samtykt 18. mai 2004, heitti Løgtingið á landsstýrismannin um at áseta neyvari reglur sum skjótast. Landsstýrismaðurin hevur ongar reglur ásett enn.

Í juni 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at við táverandi arbeiðsorku var óvist, nær kunngerðin fór at verða gjørd, og at aðrar uppgávur vórðu raðfestar hægri.

Í september 2007 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann ætlaði at fáa ásett reglur um endurgjald fyri inntøkumiss í kunngerð, men av vantandi arbeiðsorku var óvist, nær tað varð gjørt.

[2] Útreiðslurnar til stuðlar hjá brekaðum børnum eru ikki tiknar við, tí tær vórðu í 2006 fyri ein part lagdar til kommunurnar, og fyri ein part lagdar í eina rakstrarjáttan á høvuðskontu 8.21.3.08. “Børn og ung: Stuðlar til børn”.

Í september 2008 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Almanna- og Heilsumálaráðið arbeiðir við at orða uppskot til kunngerð um stuðul til ávísar viðgerðir. Kunngerðin verður væntandi lýst seinni í ár (2008).

Almanna- og Heilsumálaráðið miðar ímóti at gjøllari reglur um stuðul til mista arbeiðsinntøku verða ásettar í kunngerð, sum verður lýst komandi summar (2009).

Undirkonta 05. "Endurbúgving § 18"

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 1,5 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er eindarkostnaðurin øktur meira enn 3.500 kr. fyri hvønn umsøkjara/móttakara.

Sambært landsstýrismanninum stava hækkaðu útreiðslurnar í stóran mun frá øktum talið av vardum størvum, umframt vøkstri í lønarsáttmálum.

Útreiðslurnar til "Endurbúgving § 18" eru hækkaðar nógv, og niðan fyri hevur Landsgrannskoðanin sett upp roknskapartølini fyri árini 2000-2007:

t.kr.

| | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Endurbúgving § 18 | 15.745 | 17.589 | 18.314 | 15.471 | 20.716 | 22.251 | 24.637 | 26.369 |

Talvan vísir, at útreiðslurnar eru hækkaður úr 15,7 mió.kr. í 2000 til umleið 26,4 mió.kr. í 2007 ella um 67%.

Meira enn 15 ár eru liðin, síðani Landsgrannskoðanin fyrstu ferð heitti á Landsstýrið um, sambært § 18, stk. 6, í forsorgarlógini, at áseta gjøllari reglur um stuðul til endurbúgving o.a.

Í uppskotum til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin hava løgtingsgrannskoðararnir fleiri ferðir átalað, at landsstýrismaðurin ikki hevur ásett neyvari reglur á hesum týðandi øki, har nógvur peningur verður brúktur.

Sambært almennu viðmerkingunum til uppskotið um broyting í § 18 í forsorgarlógini, sum Løgtingið samtykti 25. oktober 2007, vísti Føroya Kærustovnur í sínari viðmerking á, at enn vantaðu greiðar reglur fyri, hvør kundi fáa stuðul og undir hvørjum treytum, og at uppskotið ikki bøtti um støðuna.

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2007 vísti Landsgrannskoðanin á fleiri ivamál viðvíkjandi umsitingini av endurbúgvingarútreiðslunum.

Í oktober 2007 ásannaði landsstýrismaðurin, at vantandi reglur var ein av orsøkunum til ivamálini. Landsstýrismaðurin ætlaði at taka stig til at orða neyvari reglur um endurbúgving.

Eisini kann verða nevnt, at Løgtingsins Umboðsmaður í frágreiðing frá juli 2008 "um kanning av 15 endurbúgvingarmálum hjá Almannastovuna" vísir á, at:

> *"Samanumtikið tykist viðgerðin av endurbúgvingarmálum nakað tilvildarlig, men hetta kann koma av, at so fáar reglur eru á økinum. Eftir mínari meting eigur tað at verða ásett í lóg ella kunngerð, hvat endurbúgvingarstuðul kann veitast til, at myndugleikarnir skulu gera eina ætlan fyri endurbúgvingartilboðnum, hvat stuðulin skal fevna um, hvørjar upphæddir skulu verða galdandi v.m.*
>
> *Eg fari at heita á Landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum um at umhugsa at áseta meira útgreinaðar reglur á endurbúgvingarøkinum."*

Í september 2008 hevur landsstyrismaðurin boðað frá, at vegna vantandi arbeiðsorku hevur enn ikki verið møguligt at fáa gongd á arbeiðið við at áseta reglur fyri endurbúgving í kunngerð. Landsstýrismaðurin hevur tó ætlanir um at fara undir arbeiðið seinni í ár.

Undirkonta 06. "Hjálparamboð v.m. § 18"

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 10,2 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum eru serliga útreiðslurnar til sethúsaumvælingar og bilar øktar meira, enn mett var frammanundan.

Útreiðslurnar til "Hjálparamboð v.m. § 18" eru hækkaðar nógv, og niðanfyri hevur Landsgrannskoðanin sett upp roknskapartølini árini 2000-2007:

t.kr.

| | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Kostískoyti o.a. | 774 | 1.021 | 1.184 | 1.469 | 1.647 | 1.838 | 2.319 | 2.788 |
| Heilivágur | 3.595 | 3.622 | 6.622 | 6.244 | 6.068 | 6.470 | 6.732 | 6.035 |
| Tannviðgerð | 823 | 1.158 | 571 | 686 | 872 | 868 | 992 | 1.152 |
| Protesur | 926 | 1.165 | 1.046 | 1.109 | 1.255 | 1.573 | 1.394 | 1.546 |
| Ortopediskur fótbúnaður | 855 | 758 | 1.563 | 1.320 | 1.583 | 2.036 | 2.498 | 2.500 |
| Hoyritól | 6.778 | 4.779 | 4.343 | 9.443 | 5.926 | 6.218 | 6.950 | 7.101 |
| Bústaðarbroytingar | 1.433 | 1.273 | 2.589 | 2.592 | 2.772 | 2.825 | 1.525 | 4.039 |
| Avlamisbilar | 1.855 | 2.197 | 4.197 | 5.089 | 2.086 | 2.086 | 2.887 | 5.048 |
| Koyristólar | 1.182 | 1.900 | 2.241 | 3.870 | 2.439 | 3.078 | 2.697 | 3.848 |
| MVG | - | 1.632 | 2.494 | 3.757 | 2.773 | 2.571 | 2.237 | 3.114 |
| Annar stuðul | 8.675 | 8.023 | 10.362 | 12.811 | 12.879 | 12.426 | 13.533 | 14.281 |
| **Tilsamans** | **26.896** | **27.528** | **37.212** | **48.390** | **40.300** | **41.989** | **43.764** | **51.452** |

Talvan vísir, at útreiðslurnar eru hækkaðar úr sløkum 27 mió.kr. í 2000, í góðar 51 mió.kr. í 2007, ella nærum tvífaldaðar.

Í 2003 boðaði landsstýrismaðurin frá, at *"Almannamálaráðið arbeiðir í løtuni við at gera kunngerðir á økinum, men roknað verður ikki við, at kunngerðirnar náa at fáa ávirkan á útreiðslurnar í ár."*

Í november 2004 greiddi landsstýrismaðurin frá, at talan m.a. var um kunngerðir um stuðul til heilivág og hoyri- og sjóntól. Eisini kunnaði landsstýrismaðurin um, at kunngerðirnar fóru at verða lidnar í 2005.

Í álitinum til eykajáttanarlógina september 2005 mælti Fíggjarnevndin landsstýrismanninum til at steðga vøkstrinum í útreiðslum til hjálpartól. Fíggjarnevndin helt, at landsstýrismaðurin, við reglum ásettum í kunngerð, átti at kunna hildið seg innan fyri givnar karmar.

Í viðmerkingunum til fíggjarlógina 2007, ið varð løgd fyri Løgtingið 29. september 2006, verður kunnað um, at "*landsstýrismaðurin, við heimild í § 18, stk. 6, í forsorgarlógini, arbeiðir við at áseta nærri reglur í nýggjari kunngerð um hoyritól*."

Í viðmerkingunum til uppskotið til eykajáttanarlógina september 2007 verður enn einaferð boðað frá, at ”*landsstýrismaðurin arbeiðir við einum uppskoti til kunngerð um hoyritól, sum millum annað hevur tað endamál, at avgerð og játtan koma at liggja á sama stað. Miðað verður ímóti at fáa kunngerðina í gildi 1. januar 2008. Mett verður, at kunngerðin kann tálma vøkstrinum í útreiðslunum til hoyritól.*”

Í september 2008 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Almanna- og Heilsumálaráðið hevur arbeitt leingi við at fáa ásett reglur fyri umsiting av hoyritólum. Uppskot til kunngerð og rundskriv er orðað og sent til hoyringar. Kunngerðin verður væntandi lýst seinni í ár (2008).

Landsstýrismaðurin ger eisini vart við, at av vantandi arbeiðsorku er óvist, nær kunngerðin um heilivág verður broytt.

Undirkonta 08. “Hjálp til viðgerð o.a. á serligum stovnum § 16”

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 1,2 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum eru fleiri persónar á stovni í Danmark.

### 8.1.9 **Einkjubarnastyrkur** (lógarbundin játtan) 8.21.8.10.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 1.888 t.kr. Meirnýtslan er 155 t.kr.

Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at hækka játtanina 235 t.kr. Lógaruppskotið fall burtur, tí løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Sambært landsstýrismanninum vórðu fleiri umsóknir játtaðar í 2007, enn mett var frammanundan.

## 8.2 Minninýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---:|---:|---:|
| Stuðul til fyriskipanir fyri heimleys | 400 | - | 400 |
| Bústovnar o.a. (løgujáttan) | 12.000 | 7.849 | 4.151 |
| Ansingarsamsýning (lógarbundin játtan) | 11.210 | 10.800 | 410 |
| Lán til ellis- og røktarheim í Vági (løgujáttan) | 8.600 | 1.203 | 7.397 |
| Eldrasambýli (løgujáttan) | 12.000 | 8.203 | 3.797 |
| Føroya Blindastovnur (rakstrarjáttan) | 5.776 | 5.332 | 444 |
| Fyritíðarpensjón (lógarbundin játtan) | 216.817 | 211.401 | 5.416 |
| Umsorgararbeiði | 6.806 | 6.536 | 270 |
| Viðbót til ávísar pensjónistar (lógarbundin játtan) | 24.684 | 19.481 | 5.203 |

### 8.2.1 **Stuðul til fyriskipanir fyri heimleys** 8.21.1.23.

Á fíggjarlógini var upprunaliga eingin játtan. Á eykajáttanarlógini mars 2007-5 vórðu játtaðar 400 t.kr. í stuðuli at reka eini nýggj hús. Eingin peningur er nýttur í 2007.

Í áliti sínum til eykajáttanarlógina ivaðist Fíggjarnevndin í, um tað fór at eydnast at byggja húsið í 2007.

Sambært landsstýrismanninum varð játtanin ikki brúkt, tí arbeiðið at gera kunngerð og fysiskar karmar til víðkaða virksemið hjá sjálvbodnu felagsskapunum tók longri tíð enn væntað.

### 8.2.2 **Bústovnar o.a.** (løgujáttan) 8.21.6.02.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 12 mió.kr. Minninýtslan er 4,2 mió.kr.

Á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 6 mió.kr. Á eykajáttanarlógini mars 2007-5 varð játtanin hækkað 6 mió.kr. til at keypa hús í Klaksvík at hýsa fólki við bústaðar- og umlættingartørvi.

Á eykajáttanarlógini oktober 2007 varð skotið upp at lækka játtanina 2 mió.kr., tí at verkætlanirnar viðvíkjandi sambýlinum fyri sinnisveik í Tórshavn og økisdeplinum í Suðuroynni vóru seinkaðar. Lógaruppskotið fall burtur, tí løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Sambært landsstýrismanninum er ein grund til minninýtsluna, at arbeiðið at byggja sambýli í Havn til fólk við sinnisórógvi ikki fór í gongd sum ætlað. Vantandi áhugi var millum arbeiðstakarar. Tí varð peningur bert nýttur til projektering.

### 8.2.3 **Ansingarsamsýning** (lógarbundin játtan) 8.21.6.10.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 11,2 mió.kr. Minninýtslan er 410 t.kr. Sambært landsstýrismanninum fingu færri fólk, enn mett var, stuðul fyri ansing.

### 8.2.4 **Lán til ellis- og røktarheim í Vági** (løgujáttan) 8.21.6.14.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 8,6 mió.kr. Minninýtslan er 7,4 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum fór verkætlanin í Vági ikki rættiliga í gongd í 2007.

### 8.2.5 **Eldrasambýli** (løgujáttan) 8.21.6.16.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 12 mió.kr. Minninýtslan er 3,8 mió.kr.

Á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 18 mió.kr. Á eykajáttanarlógini mars 2007-5 varð játtanin lækkað 6 mió.kr.

Á eykajáttanarlógini oktober 2007 varð skotið upp at lækka játtanina 3 mió.kr. Lógaruppskotið fall burtur, tí løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Sambært landsstýrismanninum fóru ikki allar verkætlanir, sum landsstýrismaðurin hevði givið tilsøgn til í 2006, í gongd í 2007. Av teimum 9 verkætlanunum er peningur einans goldin til útbyggingina av Tjarnargarði og til røktarheimið í Vági.

### 8.2.6 **Føroya Blindastovnur** (rakstrarjáttan) 8.21.6.20.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 5,8 mió.kr. Minninýtslan er 444 t.kr.

Á fíggjarlógini 2007 var játtanin hækkað fyri at kunna taka húsið Traðabrekka 1 í Tórshavn í nýtslu til verkstað, har tey seinmentu blindu kunnu koma dagliga og vera virkin, saman við starvsfólki.

Sambært landsstýrismanninum kom gongd ikki á ætlaði virksemið í 2007.

### 8.2.7 **Fyritíðarpensjón** (lógarbundin játtan) 8.21.8.05.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 216,8 mió.kr. Minninýtslan er 5,4 mió.kr.

Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at lækka játtanina 4,4 mió.kr. Lógaruppskotið fall burtur, tí løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Sambært landsstýrismanninum vóru færri umsóknir um fyritíðarpensjón, enn mett var.

### 8.2.8 **Umsorgararbeiði** 8.21.8.08.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 6,8 mió.kr. Minninýtslan er 270 t.kr. Sambært landsstýrismanninum varð ónýttur peningur frá einari kommunu fyri 2006 fluttur landskassanum aftur.

### 8.2.9 **Viðbót til ávísar pensjónistar** (lógarbundin játtan) 8.21.8.13.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 24,7 mió.kr. Minninýtslan er 5,2 mió.kr.

Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at lækka játtanina 3,7 mió.kr. Lógaruppskotið fall burtur, tí løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Sambært landsstýrismanninum varð játtanin á fíggjarlógini 2007 hækkað 4 mió.kr., av tí at Landsstýrið hevði samtykt at hækka viðbótina og at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið hesum viðvíkjandi. Lógin kom tó ikki í gildi fyrr enn 1. januar 2008, og tískil varð játtaði peningurin ikki nýttur.

## 8.3 Góðkenningarmannagongdir

Reglurnar um góðkenningarmannagongdir eru gjøllari viðgjørdar undir Fíggjarmálum.

### 8.3.1 Greinaroknskapurin

Sambært yvirliti, sum Gjaldstovan hevur dagført í juni 2008, hevur Almanna- og Heilsumálaráðið hildið reglurnar í 2007.

### 8.3.2 Mánaðarroknskapurin

Sambært § 9, stk. 2, í roknskaparkunngerðini skulu stovnsleiðarar góðkenna roknskapirnar hjá stovnunum mótvegis hægri myndugleika.

Vit spurdu, hvørjir stovnar, sum landsstýrismaðurin varðaði av í 2007, luku ásetingarnar um at góðkenna mánaðarroknskapirnar mótvegis hægri myndugleika, og hvussu landsstýrismaðurin/aðalráðið hevur eftirlit við, at stovnarnir lúka ásetingarnar í kunngerðini.

Í september 2008 hevur landsstýrismaðurin greitt soleiðis frá:

> *"Fyri fíggjarárið 2007 hevur Almanna- og Heilsumálaráðið ikki útgreinað yvirlit yvir, hvørjir av stovnsleiðarunum hava hildið ásetingarnar um at góðkenna mánaðarroknskapirnar mótvegis hægri myndugleika. Um Landsgrannskoðanin vil hava eitt útgreinað yvirlit yvir, hvørjir stovnsleiðarar ikki hava lokið ásetingarnar í kunngerðini, kann yvirlitið gerast, men tað krevur, at øll góðkenningarskjøl verða gjøgnumgingin av nýggjum fyri alt árið.*
>
> *Almanna- og heilsumálaráðið sendir javnan (2-3 ferðir árliga) rykkjarar til teir stovnsleiðarar, sum ikki hava latið inn mánaðarroknskapin. Mannagongdin er, at umsitingin í ráðnum fylgir neyvt við, hvørjir mánaðarroknskapir koma inn. Eitt innanhýsis yvirlit verður gjørt mánaðarliga (tó ikki fyri 2007) og verður síðani ein rykkjari sendur út til stovnsleiðararnar, um mánaðarroknskapurin ikki er móttikin."*

### 8.3.3 Ársroknskapurin

Seinasti mánaðarroknskapurin er at rokna sum ársroknskapur. Stovnsleiðarin skal góðkenna ársroknskapin á serstøkum góðkenningaroyðublað.

Sambært yvirliti hjá Gjaldstovuni í juni 2008 hevur Gjaldstovan bert fingið góðkenningaroyðubløð fyri nøkur stovnsnummar undir landsstýrismanninum í Almanna- og Heilsumálum. Á yvirlitinum niðanfyri sæst, at bert ein stovnur hevur latið inn góðkenningaroyðubløð fyri tíðarskeið 14 og tríggir fyri tíðarskeið 12. Hinir stovnarnir hava ikki latið inn nakað góðkenningaroyðublað:

| Grein | stovnur/konta | Stovnsnr. | Tíðarsk.*) | Viðm. |
|---|---|---|---|---|
| 08 | Apoteksverkið | 137619 | 12 | |
| 08 | Apoteksverkið, løgujáttan | 149750 | | |
| 08 | Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu | 121020 | | |
| 08 | Upplýsing og ráðgeving, Fyribyrgingarráðið | 138066 | | |
| 08 | Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu, gransking | 143513 | | |
| 08 | Fólkaheilsa, Upplýsing og ráðgeving | 149960 | | |
| 08 | Ráðgevandi toymi, Stuðul til feløg | 149980 | | |
| 08 | Almanna- og heilsumálaráðið (Almanna- og heilsudeildin) | 119820 | | |
| 08 | Studningur annars, almanna- og heilsumál | 122901 | | |
| 08 | Stuðul til fyriskipanir fyri heimleys | 149990 | | |
| 08 | Ráðgevandi toymi | 152010 | | |
| 08 | Lán til ellis- og røktarheim í Vági | 152020 | | |
| 08 | KT-heildarskipan til Almannastovuna | 152070 | | |
| 08 | Hvíldarheimið Naina | 121820 | | |
| 08 | Føroya blindastovnur | 144285 | | |
| 08 | Viðgerðarstovnurin Heilbrigdi | 143625 | | |
| 08 | Viðgerðarstovnurin Blákrossheimið | 143730 | 14 | |
| 08 | Trivnaðartænastan (Serforsorg, vanligur rakstur) | 123920 | | |
| 08 | Serforsorg, stovnsuppihald v.m. í Danmark | 123921 | | |
| 08 | Serforsorg, endurgj. av pens. til føroyingar í Danmark | 123922 | | |
| 08 | Serforsorg, ferðaútreiðslur til klientar og avvarðandi | 123923 | | |
| 08 | Serforsorg, viðbót til eksternar klientar | 123924 | | |
| 08 | Røktarheim, røkt av eldri | 124120 | | |
| 08 | Eldrarøkt í Sandoynni, røkt av eldri | 124123 | | |
| 08 | Stuðulstænastan fyri vaksin | 131472 | | |
| 08 | Heimatænastan (Røkt av eldri, heimarøktin) | 135015 | | |
| 08 | Nærverkið, Meginskrivstovan (fyri eldri og brekað) | 135584 | | |
| 08 | Barnatænastan (Heilsufrøðiskipanin, heilsusystrar) | 136575 | | |
| 08 | Heim fyri heilaskadd | 143012 | | |
| 08 | Økisterapi | 143584 | | |
| 08 | Deildin fyri sinnisveik | 144171 | | |
| 08 | Bussur til eldrarøkt á Sandoynni | 149770 | | |
| 08 | Serviðgerð uttanlands, Sjúklingahotellið Tórshavn | 134015 | | |

*) ”Tíðarskeið 12” er desember mánaður. Tá ið talan er um grundarlag undir ársroknskapinum, má í minsta lagi tíðarskeið 14 vera góðkent.

| | | | |
|---|---|---|---|
| 08 | Vísindasiðseminevndin | 133089 | |
| 08 | Almanna- og heilsumálaráðið, KT-økið (AHS-netið) | 131024 | |
| 08 | Talgild heilsuskipan | 148412 | |
| 08 | Arbeiðsgevarans partur, dagpengar | 148890 | 12 |
| 08 | Barnaískoyti | 151040 | |
| 08 | Alv-skúlin | 144067 | |
| 08 | Ílegusavnið | 149095 | |
| 08 | Landssjúkrahúsið | 121220 | |
| 08 | Landssjúkrahúsið, inntøkufíggjað virksemi, hoyritól | 135719 | |
| 08 | Landssjúkrahúsið, inntøkufíggjað virksemi, vaskarí | 138418 | |
| 08 | Kommunulæknaskipanin | 120820 | |
| 08 | Bústovnar o.a. (Bústovnur, serforsorg) | 124010 | |
| 08 | Landssjúkrahúsið, útbygging | 135112 | |
| 08 | Avhendan av eldrasambýlunum í Kollafirði og Vestmanna | 149780 | |
| 08 | Serflutningsskipan landsins | 108501 | |
| 08 | Almanna- og heilsudeildin, viðlíkahald | 119920 | |
| 08 | Tiltøk móti rúsdrekkamisnýtslu | 120201 | |
| 08 | Koppsetingar | 120301 | |
| 08 | Upplýsing um gitnaðarfyribyrging | 120401 | |
| 08 | Heilsukanningar av barnakonum | 120501 | |
| 08 | Læknakanningar av børnum | 120601 | |
| 08 | Sjúkrakassar | 120701 | |
| 08 | Serviðgerð uttanlands | 121720 | |
| 08 | Lánsafturgjald, heilsumál | 122001 | |
| 08 | Teknmálsmiðstøð | 122401 | |
| 08 | Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark | 122701 | |
| 08 | Kreppumiðstøð, stuðul til feløg | 122801 | |
| 08 | Reyði Krossur, stuðul til feløg | 122802 | |
| 08 | Ættleiðingarstuðul | 123401 | |
| 08 | Felagið Barnabati | 123501 | |
| 08 | Deyvahúsið, stuðul til feløg hjá brekaðum | 123701 | |
| 08 | Feløg teirra brekaðu, stuðul til feløg hjá brekaðum | 123703 | |
| 08 | ALV, stuðul til feløg hjá brekaðum | 123704 | |
| 08 | Javni | 123707 | |
| 08 | Landsfelag pensjónistanna, stuðul til feløg hjá eldri | 123802 | |
| 08 | Vardar íbúðir, rakstrarstudningur | 124401 | |
| 08 | Eldrasambýli | 124510 | |
| 08 | Løn til pedagogar í framhaldsútbúgving | 125420 | |
| 08 | Lán til Húsalánsgrunnin, lóg nr. 28 frá 14. feb.1995 | 125614 | |
| 08 | Almanna- og heilsumálastýrið, Tilbúgving | 130584 | |
| 08 | Sinnisbati | 130784 | |
| 08 | Stuðul til feløg, herberg | 133214 | |
| 08 | Eftirlønir fyri heilsuverkið | 133378 | |
| 08 | Serviðgerð uttanlands, flutningur | 133381 | |
| 08 | Blái krossur | 136512 | |
| 08 | Almanna- og heilsumálastýrið, ráð og nevndir | 136544 | |
| 08 | Medicoteknisk tól | 138588 | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 08 | Stuðul til feløg, PRO VITA | 138988 | |
| 08 | Stuðul til felagsskapir, ið virka fyri insestoffur | 139497 | |
| 08 | Søla av íbúðarbygningum | 140312 | |
| 08 | Útbúgving av yngri læknum | 145069 | |
| 08 | Heilsuátøk | 147085 | |
| 08 | Stuðul til feløg, Dagheim fyri minnisveik | 149107 | |
| 08 | Familju- og heilsumálaráðið, trivnaðarkanningar | 149517 | |
| 08 | Føroya blindafelag | 149760 | |
| 08 | Verkætlan til rehabilitering, AHR | 149950 | |
| 08 | Sorgbólkurin Berin, Stuðul til feløg | 149970 | |
| 08 | Suðuroyar Sjúkrahús | 121520 | |
| 08 | Suðuroyar Sjúkrahús | 121610 | |
| 08 | Klaksvíkar Sjúkrahús | 121420 | |
| 08 | Klaksvíkar Sjúkrahús | 146215 | |
| 08 | Rentustudningur til húsabygging | 125501 | 12 |
| 08 | Almannastovan | 122220 | |
| 08 | Hjálpartólamiðstøðin | 122320 | |
| 08 | Barnavernd (Barnaforsorg), frípláss | 123001 | |
| 08 | Barnavernd (Barnaforsorg),<br>tilmæli frá barnaverndarnevndum v.m. | 123002 | |
| 08 | Barnapeningur veittur í forskoti | 123101 | |
| 08 | Føroya Barnaheim | 123220 | |
| 08 | Ung við atferðartrupulleikum | 123320 | |
| 08 | Dagpeningaskipanin, løntakarar | 123601 | |
| 08 | Dagpeningaskipanin, sjálvstøðug og húshaldsfólk | 123602 | |
| 08 | Dagpeningaskipanin, gjald fyri læknaváttanir | 123604 | |
| 08 | Ansingarsamsýning | 124301 | |
| 08 | Vanlig forsorg, fyribils hjálp § 9 | 124601 | |
| 08 | Vanlig forsorg, varandi veiting § 13 | 124602 | |
| 08 | Vanlig forsorg, stakútreiðslur § 15 | 124603 | |
| 08 | Vanlig forsorg, meirútreiðslur, brekað barn § 17 | 124604 | |
| 08 | Vanlig forsorg, endurbúgving § 18 | 124605 | |
| 08 | Vanlig forsorg, hjálparamboð v.m. § 18 | 124606 | |
| 08 | Arbeiðsloysisforsorg | 124701 | |
| 08 | Fólkapensjón | 124801 | |
| 08 | Umsorgararbeiði, (Fólkapensjón, umsorganararbeiði) | 124803 | |
| 08 | Viðbót til ávísar pensjónistar | 125201 | |
| 08 | Stuðul til uppihaldspening | 130101 | |
| 08 | Hægsta fyritíðarpensjón | 132542 | |
| 08 | Reiðrið, (Dagstovnurin inni í Rók) | 133325 | |
| 08 | Miðal fyritíðarpensjón | 134064 | |
| 08 | Einkjubarnastyrkur, barnagjald | 134415 | |
| 08 | Fyritíðarpensjón, avlamisveiting | 136080 | |
| 08 | Lægsta fyritíðarpensjón | 138040 | |
| 08 | Slóðin (Børn og ung við atferðatrupulleikum, ung yvir 14 ár) | 140326 | |
| 08 | Stuðlar til børn | 140385 | |
| 08 | Høvuðsbarnaverndarnevndin | 143175 | |

| | | |
|---|---|---|
| 08 | Barnavernd | 147014 |
| 08 | Barnapeningur veittur í forskot, inngjøld | 147090 |
| 08 | Familjuhúsið (Serdagstovnur) | 147525 |
| 08 | Vanlig forsorg,<br>hjálp til viðgerð o.a. á serligum stovnum § 16 | 148517 |
| 08 | Læknaváttanir | 149790 |
| 08 | Fakliga nevndin fyri børn við serligum tørvi | 149920 |

Viðmerkingar frá landsstýrismanninum

Í september 2008 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at tíverri gongst striltið at fáa mánaðarroknskapirnar inn til tíðina frá fleiri stovnsleiðarum, sjálvt um rykkjarar verða sendir út. Almanna- og Heilsumálaráðið ivast í, um endamálið við mánaðarrokn-skapunum verður rokkið við verandi mannagongd. Talan er um nógva arbeiðsorku, sum er brúkt til uppgávuna. Almanna- og Heilsumálaráðið er av teirri áskoðan, at mannagongdin kundi verið smidligari við at broytt ásetingina um at senda inn góðkenningarskjøl mánaðarliga.

# 9 INNLENDISMÁL

## 9.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Neyðrættur, umhvørvisvernd | - | 7.893 | 7.893 |
| Lánsafturgjald | -179 | -35 | 144 |
| Føroya Náttúrugripasavn (rakstrarjáttan) | 3.077 | 3.254 | 177 |

### 9.1.1 **Neyðrættur, umhvørvisvernd** (rakstrarjáttan) 15.11.1.52.

Á fíggjarlógini er eingin játtan. Sambært landsroknskapinum eru útreiðslurnar 7.893 t.kr.

Á eykajáttanarlógini oktober 2007 varð skotið upp at játta 5.805 t.kr. í sambandi við oljudálkingina, tá russiski trolarin "Olshana" rendi á Flesjarnar og sakk 3. august 2007.

Í álitinum til eykajáttanarlógina kunnaði Fíggjarnevndin um, at landsstýrismaðurin hevði biðið um at fáa hækka eykajáttanina. Fíggjarnevndin setti tí fram broytingaruppskot um at játta 6.939 t.kr. Lógaruppskotið fall burtur, tí løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Sambært § 22 í havumhvørvisverndarlógini hevur aðalráðið ábyrgd av at basa olju- og kemikaliudálking á sjónum og á strondini. Sambært landsstýrismanninum var neyðugt at rinda hesar útreiðslur, hóast eingin játtan var, tí talan var um neyðrætt. Goldið varð út í samráði við Fíggjarmálaráðið.

### 9.1.2 **Lánsafturgjald** 15.11.2.07.

Á fíggjarlógini 2007 er ein inntøkujáttan 179 t.kr. ætlað afturgjaldan av lánum. Minniinntøkan er 144 t.kr.

Hesi lán eru veitt kommunum til at fíggja keyp av lendi til sethúsaøki, at gera sethúsaøki byggibúgvin, at stykkja út, til vegagerð og til at leggja kloakkir.

Sambært landsstýrismanninum hava tvær kommunur goldið skuld sína í 2005. Inntøkujáttanin 2006 – 2009 eigur tí at vera 35 t.kr. Av misgáum var játtanin á fíggjarlógini 2006 og 2007 ikki broytt samsvarandi.

### 9.1.3 **Føroya Náttúrugripasavn** (rakstrarjáttan) 15.24.3.13.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 3.077 t.kr. Meirnýtslan er 177 t.kr.

Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at strika játtanina, vísandi til at við skipanini av nýggju Umhvørvisstovuni er Føroya Náttúrugripasavn lagt til henda stovn at umsita. Lógaruppskotið fall burtur, tí løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Sambært landsstýrismanninum var játtanin ov lítil til virksemið.

## 9.2 Minninýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Innlendismálaráðið (rakstrarjáttan) | 12.071 | 9.824 | 2.247 |
| Ymiskar útreiðslur (rakstrarjáttan) | 1.594 | 946 | 648 |
| Dátueftirlitið (rakstrarjáttan) | 1.707 | 1.594 | 113 |
| Stuðul til útoyggjamenning | 770 | 295 | 475 |
| Umhvørvisstovan (rakstrarjáttan) | 5.443 | 5.126 | 317 |
| Tinglýsingarstovan (rakstrarjáttan) | -380 | -3.504 | 3.124 |
| Strandfaraskip Landsins (løgujáttan) | 2.150 | 1.307 | 843 |

### 9.2.1 **Innlendismálaráðið** (rakstrarjáttan) 15.11.1.39.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 12.071 t.kr. Minninýtslan er 2.247 t.kr.

Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at lækka játtanina 1.991 t.kr. Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina hevur Innlendismálaráðið higartil røkt Landsfólkayvirlitið. Við skipanini av nýggju Umhvørvisstovuni er Landsfólkayvirlitið lagt til henda stovn at umsita. Lógaruppskotið fall burtur, tí løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 11.921 | 9.820 | -2.101 |
| 22. Arbeiðsmarknaðarráð | 150 | 4 | -146 |
| **Tilsamans** | **12.071** | **9.824** | **-2.247** |

Ad undirkonta 20. Vanligt virksemi

Á hesari undirkontu eru útreiðslurnar 2.101 t.kr. lægri enn mett var. Sambært landsstýrismanninum vóru 1.500 t.kr. settar av til nýggja elektroniska skipan til landsfólkayvirlitið umframt 500 t.kr. til endurskoðan av nýggjari roknskaparskipan til kommunurnar. Hesar játtanir vóru at kalla ikki brúktar í fíggjarárinum.

Ad undirkonta 22. Arbeiðsmarknaðarráð

Á hesari undirkontu eru útreiðslurnar 146 t.kr. lægri enn mett var. Sambært landsstýrismanninum hevði Arbeiðsmarknaðarráðið ikki so nógv virksemi, sum upprunaliga ætlað.

### 9.2.2 **Ymiskar útreiðslur** (rakstrarjáttan) 15.14.1.01.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 1.594 t.kr. Minninýtslan er 648 t.kr.

Á fíggjarlógini vóru upprunaliga 1.194 t.kr. Við fíggjarnevndarskjali 2. november 2007 varð játtanin hækkað 400 t.kr. til at rinda útreiðslur í sambandi við fólkatingsvalið 13. november 2007.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Kunngerðarsavn og –blað | 440 | 416 | -24 |
| 21. Lógarsavn | 238 | 61 | -177 |
| 22. Dóms- og løgreglumál | 153 | 31 | -122 |
| 23. Útreiðslur av vali | 500 | 241 | -259 |
| 24. Navnanevndin | 153 | 87 | -66 |
| 25. Føroyskt lógarrit | 60 | 60 | - |
| 26. Rættarhjálp Føroya | 50 | 50 | - |
| **Tilsamans** | **1.594** | **946** | **-648** |

Sambært landsstýrismanninum hevur áðalráðið nærum onga ávirkan á útreiðslurnar til kunngerðasavn og –blað og heldur ikki á útreiðslurnar av vali.

### 9.2.3 **Dátueftirlitið** (rakstrarjáttan) 15.14.2.02.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 1.707 t.kr. Minninýtslan er 113 t.kr. Sambært landsstýrismanninum var Dátueftirlitið ikki fullmannað fyrr enn apríl mánaði í 2007.

### 9.2.4 **Stuðul til útoyggjamenning** 15.37.2.19.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 770 t.kr. Minninýtslan er 475 t.kr.

Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at hækka játtanina 959 t.kr. til

*at* keypa mobila oljupumpu til at pumpa oljuna frá einum av bátunum hjá Vaktar- og bjargingartænastuni upp í tangagarðarnar á útoyggjunum, og

*at* keypa mobila pumpueind at føra oljuna frá tangunum til húsarhaldini.

Lógaruppskotið fall burtur, tí løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Sambært landsstýrismanninum var partur av játtanini á fíggjarlógini ætlaður at keypa mobila pumpueind. Tá ið uppskotið um eykajáttanarlóg fall burtur, var ikki hildið ráðiligt at keypa hesar pumpueindir.

### 9.2.5 **Umhvørvisstovan** (rakstrarjáttan) 15.37.4.02.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 5.443 t.kr. Minninýtslan er 317 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er eingin einstøk orsøk til minninýtsluna.

Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at hækka játtanina 11.904 t.kr., í sambandi við at Umhvørvisstovan m.a. hevur fingið virksemið hjá Landsfólkayvirlitinum, Skógrøkt landsins, Náttúrugripasavninum, Tinglýsingarstovuni og umhvørvisdeildini á Heilsufrøðiligu starvsstovuni at umsita. Lógaruppskotið fall burtur, tí løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

### 9.2.6 **Tinglýsingarstovan** (rakstrarjáttan) 15.37.4.03.

Á fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 380 t.kr. netto. Meirinntøkurnar eru 3.124 t.kr. netto.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 6.620 t.kr. til útreiðslur og 7.000 t.kr. til inntøkur. Sambært landsroknskapinum eru inntøkurnar 9.841 t.kr. og útreiðslurnar 6.338 t.kr.

Á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 3.570 t.kr. til útreiðslur. Á eykajáttanarlógini mars 2007-5 varð játtanin til útreiðslur hækkað 3.050 t.kr.

Á eykajáttanarlógini september 2007 varð skotið upp at strika játtanina, vísandi til, at við skipanini av nýggju Umhvørvisstovuni er Tinglýsingarstovan løgd til henda stovn at umsita. Lógaruppskotið fall burtur, tí løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Sambært landsstýrismanninum vóru inntøkurnar hægri enn mett.

#### 9.2.7 Strandfaraskip Landsins (løgujáttan) 15.38.2.02.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 2.150 t.kr. Minninýtslan er 843 t.kr.

Á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 1.000 t.kr. Við fíggjarnevndarskjali 30. januar 2007 varð játtanin hækkað 1.150 t.kr., sum var ónýtta játtanin í 2006.

Sambært fíggjarnevndarskjalinum var upphæddin av misgáum ikki tikin við í fíggjarlógina 2007.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 13. Goymsluhøll við ferjuleguna á Krambatanga | 1.150 | 1.087 | -63 |
| 16. Nólsoyarskip | 1.000 | 220 | -780 |
| **Tilsamans** | **2.150** | **1.307** | **-843** |

Ad undirkonta 16. Nólsoyarskip

Á hesari undirkontu eru útreiðslurnar 780 t.kr. lægri enn mett var. Sambært landsstýrismanninum var ætlanin, at projekteringin av skipinum skuldi vera liðug í 2007. Arbeiðið byrjaði seinni enn ætlað, m.a. tí at stovnurin varð fluttur og øll starvsfólkini skiftu.

## 9.3 Góðkenningarmannagongdir

Reglurnar um góðkenningarmannagongdir eru gjøllari viðgjørdar undir Fíggjarmálum.

#### 9.3.1 Greinaroknskapurin

Sambært yvirliti, sum Gjaldstovan hevur dagført í juni 2008, hevur Gjaldstovan fingið váttaðan greinaroknskap frá Innlendismálaráðnum fyri desember (tíðarskeið 12), men ikki tey ískoytisskeið í 2007, sum eru at meta sum ársgreinaroknskapur.

Sambært landsstýrismanninum hava ávísir trupulleikar verið at fingið mánaðarroknskapin frá einum stovni. Trupulleikarnir tykjast nú at vera loystir, og Løgmálaráðið væntar, at roknskapurin verður latin Gjaldstovuni skjótari í framtíðini. Greinaroknskapurin fyri tíðarskeið 15 er móttikin 2. juli 2008 og verður avgreiddur skjótast gjørligt.

#### 9.3.2 Mánaðarroknskapurin

Sambært § 9, stk. 2, í roknskaparkunngerðini skulu stovnsleiðararnir góðkenna roknskapirnar viðvíkjandi stovnunum mótvegis hægri myndugleika.

Í juni 2008 spurdu vit, hvørjir stovnar, sum landsstýrismaðurin varðaði av í 2007, luku ásetingarnar um at góðkenna mánaðarroknskapirnar mótvegis hægri myndugleika, og

hvussu landsstýrismaðurin/aðalráðið hevur eftirlit við, at stovnarnir lúka ásetingarnar í kunngerðini.

Landsstýrismaðurin svaraði ikki spurningunum beinleiðis, men kunnaði um, at "*tá ið Løgmálaráðið móttekur mánaðarroknskapin verður hann samanborin við greinaroknskapin. Í teimum førum mánaðarroknskapurin ikki er í samsvari við greinaroknskapin, verður samband tikið við Føroya Gjaldstovu og avvarðandi stovn, soleiðis at møguligir feilir verða staðfestir og rættaðir.*"

### 9.3.3 Ársroknskapurin

Seinasti mánaðarroknskapurin er at rokna sum ársroknskapur, og stovnsleiðarin skal góðkenna ársroknskapin á serstøkum góðkenningaroyðublað.

Sambært yvirliti hjá Gjaldstovuni í juni 2008 hevur Gjaldstovan bert fingið góðkenningaroyðubløð fyri nøkur stovnsnummar undir landsstýrismanninum í Innlendismálum. Á yvirlitinum niðanfyri sæst, at bert ein stovnur hevur latið inn góðkenningaroyðublað, og er tað fyri tíðarskeið 12. Hinir stovnarnir hava ikki latið nakað góðkenningarblað inn:

| Grein | Stovnur/konta | Stovnsnr. | Tíðarsk.*) | Viðmerk. |
|---|---|---|---|---|
| 15 | Kunngerðasavn og -blað | 101420 | | |
| 15 | Lógasavn | 101421 | | |
| 15 | Dóms- og løgreglumál | 101422 | | |
| 15 | Útreiðslur av vali | 101423 | | |
| 15 | Stuðul til umhvørvisverndartiltøk | 119401 | | |
| 15 | Náttúrufriðingarnevndin | 119620 | | |
| 15 | Spilloljureinsing | 119701 | | |
| 15 | Lán úr Kommunala lánigrunninum | 120222 | | |
| 15 | Ítróttavedding | 132040 | | |
| 15 | Navnanevndin | 134099 | | |
| 15 | Umhvørvisvernd | 137466 | | |
| 15 | Stuðul til útoyggjar | 138313 | | |
| 15 | Søla av Dúgvuni | 141525 | | |
| 15 | Stuðul til útoyggjamenning | 142735 | | |
| 15 | Træplanting | 142841 | | |
| 15 | Føroyskt Lógar Rit | 143065 | | |
| 15 | Innlendismálaráðið | 144044 | | |
| 15 | Neyðrættur, umhvørvisvernd | 144050 | | |
| 15 | Arbeiðsmarknaðarráð | 145145 | | |
| 15 | Rættarhjálp Føroya | 145564 | | |
| 15 | Veðhaldsútlán til IRF | 146554 | | |
| 15 | Strandfaraskip landsins, óvanligt | 146654 | | |
| 15 | Útlendingamál | 149800 | | |
| 15 | Happadrátturin | 129901 | | |
| 15 | Happadrátturin, umsiting | 129920 | | |
| 15 | Dátueftirlitið (Skrásetingareftirlitið) | 101520 | | |
| 15 | Skógrøkt Landsins | 112120 | | |

*) "Tíðarskeið 12" er desember mánaður. Tá ið talan er um grundarlag undir ársroknskapinum, má í minsta lagi tíðarskeið 14 vera góðkent.

| | | | |
|---|---|---|---|
| 15 | Matrikulstovan | 114020 | |
| 15 | Føroya Náttúrgripasavn, (Djóra- og plantusavn) | 137555 | |
| 15 | Føroya Náttúrugripasavn | 139614 | |
| 15 | Skógrøkt Landsins, inntøkufíggjað virksemi | 146065 | |
| 15 | Tinglýsingin | 146865 | |
| 15 | Norðurlandasamstarv, ráðharraráð | 101220 | |
| 15 | Strandfaraskip Landsins | 108020 | |
| 15 | Tyrlutænastan | 108120 | |
| 15 | Nólsoyarskip | 151020 | |
| 15 | Goymsluhøll við ferjuleguna á Krambatanga | 141271 | |
| 15 | Føroya kærustovnur | 135075 | |
| 20 | Navnaprógv | 128804 | 12 |

Viðmerkingar frá landsstýrismanninum

Í juni 2008 bóðu vit landsstýrismannin um viðmerkingar til hesi viðurskifti. Vit fingu ikki svar.